LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Frágreiðing løgmans á ólavsøku 2024

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Ólavsøkurøða løgmans 2024

Frú forkvinna!

»Nøkur orð eru myrk og seta dimm spor.
Onnur eru ljós og kasta ongan skugga.

Eg vóni teimum góðan túr
og blomstrandi avkom«

Hesa yrkingina eftir Róa Patursson við lagi eftir Bjarna Restorff, sála, hoyrdu vit stóra ólavsøkukórið syngja her á Tinghúsvøllinum fyri løtu síðan.

Og ólavsøkukórið er í grundini ein áhugaverd mekanisma. Sangarar savnast úr øllum landinum við ymsum røddum og førleikum. Men tey sameinast í sanginum.

Eingin kann einsamallur taka sær æruna av úrslitinum. Eingin hoyrist burturúr – og tí hoyrast øll.

Hóast tey fyri vist eru ósamd um nógv uttan fyri sangin, so gera øll kortini sítt til at fáa breiða samstarvið at rigga.

Onkuntíð havi eg samanborið sangin her uttanfyri – við politikkin her innanfyri.

***

Stundum verður sagt, at í Føroyum eru vit bara samd um at vera ósamd – og mangan eru vit eisini rúkandi ósamd. Tað hava vit bæði rætt og pláss til.

Úteftir kann tað helst tykjast, sum vit eru longri frá hvør øðrum, enn vit veruliga eru. Tí heldur enn at leggja dent á stóru linjurnar, vit eru samd um, leggja vit dent á smálutirnar, vit eru ósamd um. Tí tað fær rúmd í miðlunum. Tí tað gagnar politiskt. Tí tað profilerar.

Hetta hevur leingi verið galdandi – og eg skal heldur ikki siga meg frían fyri tað.

Men – fyri at nýta myndina hjá Róa Paturssyni – so setur hetta dimm spor á politikkin.

Tíbetur hoyrast nú nýggir tónar. Hetta seinasta árið hava vit fingið nógvar breiðar semjur. Hesum eiga allir flokkar æruna av.

Eg kann nevna semjur um burðardygga ferðavinnu, tøkugjøld í alivinnuni, trygdarpolitikk, arktiskan politikk, broytingar í barsilsskipanini og at skerja ríkisveitingina. Vit vóru á einum máli um at yvirtaka farsóttarøkið, vitaverkið og sjórættin.

Tað gleðir meg. Tí tíðirnar krevja, at vit leggja okkum nógv meira eftir breiðum semjum. At vit skapa støðufesti og tryggleika. At vit gera avtalur, sum vara.

Tí frú forkvinna!

Í mong ár hevur okkara partur av heiminum verið støðufastur – við fáum vandum. Men nú síggja vit broytingarnar. Vit síggja álvaran. Vit síggja lond, sum klovna. Sum snara móti ekstremismu bæði vinstrumegin og høgrumegin.

Tað má ikki henda her. Okkum tørvar støðufesti. Vit mugu tí finna ein nógv týðiligari felags grundtóna, sum heldur fram í tíðina.

Vit bjóða tí øllum flokkum til borðið. Vit eru til reiðar at førka okkum. Hóast ósemjurnar mangan hava verið stórar, krevur tíðin, at gjáirnar smalka aftur. Og hóast vit hvørki kunnu ella skulu semjast um alt, so mugu vit semjast um sumt.

Tíðin er farin frá blokkpolitikki, tí summi mál eru ov stór til flokspolitiska togtogan. Ov breið til einstaklingaprofilering. Vit mugu vera meiri sum ólavsøkukórið, ið stendur sum ein, tá ið um ræður. Fleirraddað, men samfelt.

Tað krevur nakað av okkum øllum. Men eg eri bjartskygdur um, at vit fara at finna fleiri breiðar semjur.

Eitt nú um: langtíðarhaldførið, bústaðarmarknaðin, uttanríkispolitiska virkisførið, útlendingaøkið og hvussu vit knýta Suðuroynna upp í restina av landinum.

Tað týdningarmesta eru breiðar semjur um langtíðarhaldførið og vælferðina hjá børnunum.

Hóast búskapurin hevur tað gott, og Føroyar ikki eru serliga skuldarbundnar, er landskassin ikki langtíðarhaldførur. Tað er álvarsamt.

Ein orsøk er, at tað lutfalsliga verða færri, sum arbeiða – og fleiri, sum ikki arbeiða.

Tíbetur liva vit longur. Men tíverri fáa vit færri børn.

Samfelagið má laga seg eftir broyttu fortreytunum. Men tað hava vit – skiftandi landsstýri seinnu árini – gjørt ov lítið við.

At tryggja langtíðarhaldførið krevur langtíðarloysnir. Langtíðarloysnir krevja langtíðarsemjur.
Tí mugu allir flokkar loysa hesa avbjóðing í felag. Og vit mugu gera tað nú.

Saman við landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum havi eg kallað allar flokkar inn eftir ólavsøku. Vit mugu gera skipanir, sum draga – og gera Føroyar kappingarførar um fólkið.  Vit mugu finna semju um eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum avmarkar, hvussu nógvar pengar vit politikarar kunnu brúka, og tryggjar, at alt, vit gera, er fíggjað. Vit mugu reka almenna geiran bíligari og munabetur.

***

Frú forkvinna!

Á middegi í gjár var Trappan í Vágsbotni full av syngjandi børnum. Tá høvdu okkara smæstu sína egnu ólavsøkusangløtu.

Tað var ein lívsjáttandi løta. So látandi løtt.

Men byrðan, sum hesi smáu snýðini hava í væntu, verður tung, um vit lata standa til.

Tí tá ið vit tosa um haldførið, ja, so tosa vit júst um børnini. Vit tosa um tíðina, tá ið vit sleppa, og tey taka við. Og tað er eisini fyri børnini, at vit mugu hyggja at pensjónsaldrinum.

Tey, sum eru ella skjótt verða pensjónistar, fara ikki at merkja broytingarnar. Tað snýr seg einans um okkum, sum enn hava fleiri ár eftir á arbeiðsmarknaðinum.

Eru vit ikki øll samd um, at tey, sum orka, skulu kunna arbeiða longur? Og at tey, sum ikki orka, skulu kunna takka fyri seg?

Vit eru jú samd um grundtónarnar.

Øðrumegin skulu vit tryggja skjótt vaksandi eldra ættarliðinum góð livikor. Samstundis skulu vit tryggja yngra ættarliðið.

Í vár atkvøddi Tingið fyri at avtaka marglætispensjónina hjá løgtingsfólki, so okkara pensjónsaldur nú er tann sami sum hjá øllum øðrum. Eisini verða nýggir aðalstjórar settir eftir nýggjum treytum og hava nú somu pensjónsviðurskifti og sama pensjónsaldur sum øll onnur.

Og nú mugu vit so halda fram við arbeiðinum. Allir flokkar á Løgtingið eru bodnir við, so vit kunnu finna varandi loysnir.

***

Frú forkvinna!

Í kvøld savnast stórur partur av føroyingum til midnáttarsangin – har ólavsøkukórið júst hevur sungið.

Og um vit í kvøld royndu at finna semjur millum allar syngjandi føroyingarnar á Vaglinum, so vænti eg, at tað hevði eydnast.

Tí tá ið vit tosa um haldføri, snýr tað seg fyrst og fremst um menniskju.

Eru vit ikki øll samd um, at hjálp skal veitast teimum, ið tørva? At sjúk skulu fáa viðgerð? At her skal vera gott og trygt hjá børnum? Og at øll skulu hava tak yvir høvdið?

Eru vit ikki øll samd um, at politiska skipanin í stórum og smáum skal lætta um gerandisdagin?

Vit vita jú, at gerandisdagurin hevur verið trýstur.

Tí hava vit umskipað skattin, so lág- og miðallønt rinda minni av síðst vunnu krónu.

Vit hava latið helvtina av skattalættanum – restin kemur komandi ár. Tey flestu fara tá at rinda millum 7.000 og 13.000 kr. minni í landsskatti árliga samanborið við í fjør.

Hetta lættir um gerandisdagin.

Og lágløntu starvsfólkini á eldra-, dagstovna- og almannaøkinum hava fingið eitt søguligt lønarlyft – eins og verkafólk á privata arbeiðsmarknaðinum.

Hetta lættir um gerandisdagin.

Í breiðari semju hevur løgtingið hækkað útgjaldið í barsilsskipanini til 30.000 krónur. Barsilspeningurin kemur nú á kontu fyri mánaðarskifti. Í heyst fáa foreldur størri frælsi at býta barsilstíðina, og foreldur, sum fáa ov tíðliga følt børn, tvíburar ella fleirburar fáa longri barnsburðarfarloyvi. Ætlanin er eisini at tryggja eitt minstaútgjald úr skipanini.

Hetta lættir um gerandisdagin.

Nógv smærri mál eru eisini framd. Pantskipanin til fløskur kemur loksins. Vit fáa príseftirlit. Vit fáa nú bíleggingarskipan til øll strandfararskip. Automat til heilivág er sett upp. Og apotek letur upp í Vágum.

Hetta lættir um gerandisdagin.

Landsstýrið arbeiðir eisini við at finna fígging, so vit kunnu lækka ella strika mvg á til dømis breyði, mjólk, frukt og grønmeti.

Hetta fer at lætta um gerandisdagin.

Saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum hevur landsstýrið arbeitt við at stytta arbeiðsvikuna. Órógv á arbeiðsmarknaðinum hevur ávirkað arbeiðið, men vit halda nú fram.

Eisini hetta fer at lætta um gerandisdagin.

***

Frú forkvinna!

Hjá summum eru tað viðurskifti, ið vit onnur taka fyri givið, ið tyngja gerandisdagin mest – tí tey stríðast við brek ella sjúku. Tíbetur er full semja millum føroyingar: at hesi skulu hava hjálp.

Og nógvir ljósir tónar eru. Til dømis fáa foreldur at børnum við menningartarni og likamligum breki námsfrøðiliga ráðgeving. Børn við breki fara nú at rúmast í fosturforeldraskipanini. Og Barnahúsið – fyri børn, ið hava verið fyri kynsligum ágangi og harðskapi – hevur fingið betri umstøður.

Og hjá teimum sjúku verður lættari at fáa hjálp, nú vit fáa fleiri læknar. Kommunulæknaviðtalurnar eru øktar úr 34 upp í 37. Talið á útbúgvingarlæknum setur met í ár, og nýggja serlæknaætlanin fer at skapa munandi betri starvsmøguleikar.

Gongd er eisini á krabbameinsætlanini. Arbeiðið við screeningseind og ávísingar- og útgreiningar-skipan er byrjað, og serlæknar eru settir á palliativa økið. Næsta stigið verður tarmscreening í Føroyum.

Og øll skulu fáa eins góða atgongd til viðgerð. Tí arbeiða vit við at flyta heilsutænastur út til nærumhvørvini. Tí hava vit styrkt læknavaktina, so sálarliga sjúk fáa somu bráðneyðugu hjálp sum likamliga sjúk. Og tí var breið semja um at veita dialysu á Suðuroyar sjúkrahúsi.

Landssjúkrahúsið verður skipað sum universitetssjúkrahús. Fyri sjúklingin merkir tað betri viðgerð, tí vitanin verður størri – eitt nú um serføroyskar sjúkur. Og fyri heilsuverkið merkir tað betri um-støður at granska og útbúgva heilsustarvsfólk. Hetta fer at økja um áhugan hjá heilsustarvsfólki at starvast her.

***

Frú forkvinna!

Vit búgva ikki í Føroyum orsakað av veðrinum. Vit búgva her, tí tað er trygt. Tí samanhangsmegin er stór. Tí hetta er heimsins besta stað hjá børnum. Góðar skipanir til børn kunnu eisini eggja fólki til at koma heim aftur – og bøta um haldførið.

Tí er avgerandi, at vit halda fast um tryggleikan, trivnaðin og sterka tilknýtið.

Dagstovna- og skúlaøkið verða raðfest. Dagstovnalógin skal endurskoðast, og tilmælini um at broyta fólkaskúlalógina verða nú sett í gildi. Frá komandi skúlaári verða í mesta lagi 22 næmingar í 1. flokki. Vit arbeiða við tvílæraraskipan, at fækka undirvísingartímarnar og broyta tíma- og lærugreinabýti. Væntandi verður tað lagt fyri tingið í komandi tingsetu.

Og tað verður eitt stórt framstig, um vit fáa fartelefonirnar úr fólkaskúlunum. Hóast skíggjar eru hentir, er tað væl prógvað, at teir minka um evnini at hugsavna seg, tilknýtið til onnur og sálar-heilsuna. Alt tað, sum vit vilja menna í skúlanum.

Øll skúlastýri orða í løtuni reglur um telefonnýtslu í skúlanum.

***

Frú forkvinna!

“Summi orð eru ljós og kasta ongan skugga. Eg vóni teimum góðan túr og blomstrandi avkom” sang ólavsøkukórið fyri løtu síðani.

Fyri flestu okkara er orðið “heim” eitt slíkt ljóst orð við blomstrandi avkomi.

Men ikki fyri øll. Tí okkum manglar bústaðir.

Tí endurskoðar landsstýrið bústaðarpolitikk landsins, so vit kunnu økja um útboðið av bústøðum, samstundis sum vit tryggja sosialt rættvísi á bústaðarmarknaðinum.

Tilflytingin seinastu árini hevur verið stór. Bústaðarmynstrið er eisini broytt, og meiri enn fjórði hvør føroyingur býr nú einsamallur. Tí tørvar okkum lutfalsliga fleiri bústaðir fyri at nøkta tørvin. Fáa fólk einki at búgva í, kunnu tey ikki velja Føroyar.

Tí varð lógin um Húsalángrunnin broytt í vár. Nú kunnu kommunur stovna almannagagnlig bústaðarfeløg saman við Bústøðum. Endamálið er at byggja gott og bíligt. Endamálið er ikki at fáa stórt avkast.

Vit hava seinastu árini sæð, at hús og íbúðir verða keypt at leiga út til ferðafólk. Hetta ger tað truplari hjá familjum at finna eitt heim. Tí fer Landsstýrið at leggja tvey lógaruppskot fyri Løgtingið í heyst.

Annað uppskotið loyvir kommunum at taka gjald fyri tænastuveitingar til tóm hús, frá húsaeigarum, sum ikki búgva í kommununi. Hitt uppskotið loyvir kommunum at áleggja bústaðarskyldu á nýggjar útstykkingar.

Og hjá teimum, sum hava serligan tørv, er hend ein rúgva.

Á Argjum flyta fólk við menningartarni inn í nýggjar íbúðir fyrsta dagin. Heim, umlætting og frítíðartilboð til børn og ung við autismu er eisini liðugt – og tey eru flutt inn. Í Havn eru fólk við menningartarni og fólk við sálarligum avbjóðingum flutt inn í nýggjar íbúðir. Í løtuni eru tvær nýggjar byggiverkætlanir í gongd. Onnur í Havn til vaksin við autismu, hin í Vágum til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum.

Hjá hesum gott 80 fólkunum, sum nú fáa egið heim – og hjá foreldrunum, sum loksins kunnu sleppa endanum – merkir hetta ófatiliga nógv.

Kortini veit eg, at bíðilistarnir framvegis eru langir. Tí mugu allir flokkar semjast um eina langtíðarætlan um at keypa grundstykki og byggja vardar bústaðir og verkstøð. Ætlanin er at byggja 10–12 nýggjar stovnar kring landið næstu 10 árini.

Men ein nøktandi bústaðarpolitikkur snýr seg eisini um at tryggja bústaðir kring alt landið. Og tað er sigandi, at einki sethús er í gerð í Suðuroynni.

Hóast fólkatalið veksur í Føroyum, minkar tað í Suðuroynni. Miðalinntøkan er lægst í Suðuroynni – og arbeiðsloysið størst. Fyri at venda gongdini mugu vit knýta Suðuroynna í meginøkið.

Eg havi góðar vónir um breiða semju, tá ið vit leggja uppskot um fast samband millum Suðuroynna og Sandoynna fyri Tingið í heyst.

***

Frú forkvinna!

Ímillum fólkini á Vaglinum í kvøld verða helst fleiri, sum ikki duga at syngja okkara kendu slagarar. Sum ikki kenna løgini. Sum ikki skilja tekstin.

Tað merkist í gerandisdegnum, at vit ikki longur eru eitt eintáttað land. Í Føroyum búgva nú fólk úr 134 ymsum londum. Fólkini, sum ikki eru úr Norðurlondum, eru nú um 2000.

Javnan taka truplar støður seg upp, tá ið mentanarmunirnir eru stórir, tá ið útlendingar einki tilknýti hava til land og fólk – og vantandi málsligir førleikar gera samskiftið trupult.

Okkara viðbrekna samfelag má ikki skeiklast, men vit eru nú á markinum til, hvat vit kunnu lofta. Tí mugu vit tátta í. Stóra tilflytingin seinastu árini tyngir okkara skipanir – serliga dagstovnar og skúlar.

Eg veit, at hetta kann elva til ótryggleika millum føroyingar. Tilflytingin má tí stýrast neyvt. Vit síggja jú avleiðingarnar av miseydnaðari integratión nógvastaðni í Evropa.

Tey, sum koma higar at arbeiða, nøkta ein stóran tørv. Vit skulu taka okkum væl av teimum og tryggja teimum góðar arbeiðs- og liviumstøður.

Men vit kunnu ikki taka ímóti fleiri, enn vit megna at integrera.

Vit skulu hava skipanir, sum tryggja vinnuni atgongd til neyðuga arbeiðsmegi. Men sum politikar-ar mugu vit sanniliga eisini taka atlit til samanhangsmegina í samfelagnum. Gera vit ikki tað, missa vit meira fyri minni.

Serliga arbeiðsloyvini ígjøgnum fast-track fingu útlendingarnar at verða munandi fleiri. Men kravið um, at tey, ið vilja hava familju sína higar, sjálv skulu megna at forsyrgja henni, fer væntandi at tálma tilflytingini.

Vit eru farin at dagføra útlendingalógina, sum er meiri enn 20 ára gomul.

Og integratiónslógin er um at vera klár. Endamálið er at fáa fólk væl inn í føroyska samfelagið bæði málsliga og mentanarliga. Tey skulu vita, hvørji rættindi tey hava, og hvat vit vænta av teimum.

Útlendingar skulu vera vælkomnir. Men tað mugu ikki koma fleiri, enn vit megna at integrera. Vit mugu finna loysnir, so vit kunnu liva saman í samljóði og tryggleika.

***

Frú forkvinna!

Eg havi hug at venda aftur til sangløtuna á Trappuni í gjár, tá ið kláru barnarøddirnar úr øllum landinum sungu so hugagóðar. Um trygga barnalívið í Føroyum og vøkru náttúruna. Um blómur, djór, haga og sjógv.

Um alt, tey líta okkum til at ansa væl eftir, til tey gerast vaksin.

Seinastu tíðina er søguliga nógv hent á náttúru- og umhvørvisøkinum fyri at tryggja eftirkomar-unum reinari náttúru, betri umhvørvi og minni útlát.

Í fjør samtyktu vit eina náttúruverndarlóg við breiðum meiriluta. Fyrsta stigið var at verja Melina og bakkan oman fyri Lónna í Saksun. Eisini skipa vit eina náttúruskráseting og fáa yvirlit yvir ta stóru náttúruvitan, sum er í landinum.

Burturkastið er eisini tilfeingi, ið vit kunnu nýta aftur, tí skulu vit skilja meira við hús – og í vinnuni. Vit mugu flyta okkum frá "keyp-og-blaka-burtur" til endurnýtslu.

Á orku- og veðurlagsøkinum eru 18 av teimum 25 átøkunum, sum løgtingið hevur samtykt, sett í verk. Úr rúgvuni kunnu nevnast ein orkuráðgeving, at nýggir bygningar ikki skulu hava oljufýring, stuðul til at endurvinna oljufýringar, reglur um fjarhita og útbyggingarætlan fyri varandi orku.

Og SEV skal nú áseta ymiskar tímaprísir – og soleiðis eggja okkum til at brúka streym, tá ið nógv grøn orka er tøk.

Við eini løgtingslóg vilja vit binda okkum til at minka munandi um útlátið og at fylgja altjóða samtyktum.

Eins og við haldførinum snúgva veðurlagsbroytingarnar seg ikki um okkum, sum í dag eru til-komin, men um børnini. Um tað, vit lata teimum, tá ið tey taka við. Tað er átrokandi, og vit mugu seta høg krøv. Tað skylda vit syngjandi børnunum á Trappuni.

***

Og frú forkvinna!

Vit skulu duga betur at brúka náttúruna á burðardyggan hátt. At gerast meira sjálvbjargin við matvørum og minni bundin at tí, vit flyta inn.

Eisini her vænti eg, at vit kunnu semjast: latið okkum gagnnýta náttúruna og tað, hon kann geva. Latið okkum økja um útboðið av føroyskum matvørum og eggja føroyingum til at eta stuttflutt.

Vit arbeiða við eini heildarætlan, ið skal menna matvørur og nýggjar matvinnur í Føroyum. Málið er at framleiða fleiri landbúnaðarvørur, økja um lønsemið og mótstøðuførið í vinnuni og fáa skyn-samari lendisbrúk.

Flyta vit okkum á sjógvin, skulu vit eisini hava skynsaman fiskiskap. Vit mugu finna breiðar, burðardyggar og varandi semjur tvørtur um landamørk.

Og tað var bæði ábyrgdarfult og burðardygt, at Føroyar, Noreg og Bretland loksins skrivaðu undir semju um makrelin. Seinastu árini hava vit fiskað væl oman fyri tað, sum stovnurin ber.

Við semjuni sleppa vit at fiska í norskum og bretskum sjógvi. Hetta loyvir okkum at fiska, tá ið virðið er sum mest.

Makrelsemjan birtir vón um, at vit eisini semjast um svartkjaft og norðhavssild.

Og vit mugu verja botnfiskastovnin. Tíverri hava stovnarnir verið illa fyri í mong ár. Tí varð veiðu-trýstið tillagað, so fiskiskapurin hjá heimaflotanum verður burðardyggari. Tað er tó ein glotti, at gróðurin á landgrunninum í ár er metgóður.

Eisini í alivinnuni mugu vit áhaldandi tryggja burðardygd, tí náttúran jú er grundarlagið undir øllum.

Tá ið ILA herfyri varð staðfest á Vágsfirði, fingu vit eina áminning um, at vit altíð mugu vera á varðhaldi. Hendingin prógvaði kortini, at yvirvøkan og tilbúgvingin riggaðu, sum tær skuldu.

Náttúrufortreytirnar eru framúr í Føroyum, og vinnan hevur verið sera dugnalig.

Í mong ár hava yvirskotini verið sera stór. Tí er rímiligt, at vinnan rindar meiri til vælferðina. Fyrr í ár gjørdu samgonguflokkarnir og Sambandsflokkurin eina søguliga langtíðarsemju um tøkugjald og serskatt í alivinnuni.

Nú kennir vinnan fortreytirnar nógv ár fram og kann leggja virksemið til rættis.

Eisini ferðavinnan kann nú í nógv størri mun leggja virkemið til rættis, tí vit loksins fingu breiða semju um burðardygga ferðavinnu og atgongd til náttúruna.

Skipanin skal nú roynast í verki. Og hóast ósemjur kunnu stinga seg upp, er nú ein lógarkarmur at virka, samstarva og loysa ósemjurnar eftir.

Lógin tryggjar okkum, sum búgva her, rætt til frítt at ferðast í náttúruni undir ábyrgd. Samstundis tryggjar hon, at ferðavinnan kann skipast lokalt.

Gongd í náttúruni og ferðsla til bygdir skal skipast væl, og vit skulu marknaðarføra Føroyar til ferðafólk, sum virða umhvørvi, náttúru og fólk.

Komandi tíðina skulu kommunurnar stuðlast í at gera ferðavinnuætlanir og góða kunning til ferðafólk. Tey mugu skilja, hvørjar treytir vit seta, og hvat vit vænta av teimum.

***

Frú forkvinna!

Eins og einum kóri tørvar ymsar røddir, tørvar vinnulívinum ymsar førleikar. Skulu vit tryggja vinnuni skikkaða arbeiðsmegi – og halda ungdóminum í landinum – er avgerandi, at vit hava breitt útboð av útbúgvingum.

Tørvurin á handverkarum er framvegis stórur, men eg fegnist um, at seinastu fimm árini eru knapt fýrahundrað nýggir lærlingasáttmálar undirskrivaðir árliga. Ætlanin er at endurskoða og menna handaligu útbúgvingarnar saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Eisini Fróðskaparsetrið fer komandi árini at fáa í lag betri samband við arbeiðsmarknaðin. Størri smidleiki skal valda millum hægru útbúgvingarnar – og føroyska universitetssjúkrahúsið fer at styrkja samstarvið millum Setrið og Sjúkrahúsverkið.

Og Setrið fær betri hølir. Verklagslóg um at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum er samtykt, og projekteringin av Kampus er byrjað.

Eisini nýggi Húsarhaldsskúlin í Klaksvík verður ætlandi liðugur seint í ár. Á Miðnámi á Kambsdali verður stóra tilbyggingin liðug komandi ár. Og á Rásini í Saltangará var reisigildi herfyri.

Framvegis er tó stórur tørvur á útbúnum fólki á vælferðarøkinum. Tí er ætlanin, at tey, sum lesa á Heilsuskúlanum, skulu fáa løn undir útbúgving.

***

Frú forkvinna!

»Tey orðini, sum leitaðu eftir nýggjum landi
vendu sær í flognum og komu aftur
sum rovfuglar við sterkum klóm
og fremmandum eygum«

Hesar reglurnar í yrkingini "Orðini" eftir Róa Patursson eru ein góð lýsing. Tá ið vit senda orð út at leita eftir nýggjum landi, men tey koma aftur sum rovfuglar. Tá ið tað, vit vilja siga, umskapast,

so mótparturin hoyrir okkurt annað. Tá ið orðini ala fram sterkar kløur og fremmand eygu – heldur enn blomstrandi avkom.

Vit síggja nú, hvussu orð verða send út fyri at skapa ótta og ósamljóð. Hvussu fólk lata orðini týggja sær sum rovfuglar, ið eggja til stríð.

Vit síggja tað um allan heim. Vit sóu hetta í valstríðnum í Evropa, og vit síggja tað í USA.

Tað er vandamikið. Tí rovfuglaorð kunnu verða til gerðir – og vit síggja, at gerðir kunnu elva til kríggj og ræðuleikar. Nógv bera nú ótta fyri, at Russland fer at leypa á onnur lond. Og í krígnum millum Ísrael og Hamas hava aðrir partar lagt uppí. Tað er vandi fyri stórkríggi. Avleiðingarnar raka vanlig fólk og skapa oyðilegging, deyða og sorg.

Tað ávirkar sjálvandi eisini okkum. Men lat meg sláa fast: eingin ítøkiligur vandi er fyri Føroyar í løtuni.

Men vit fylgja væl við. Bæði her heima og saman við myndugleikunum í grannalondum.

Hinvegin sóu vit herfyri, hvussu viðbrekin vit eru, tá ið telduskipanir í fleiri londum gjørdust óvirknar – og alt frá flogferðslu til sjúkrahús legðist lamið.

Í hesum føri var talan um eitt brek. Men nú heimsstøðan er vorðin spentari, er eisini vandin fyri álopum á netinum vorðin størri.

Tí fingu vit í ár fyrstu nettrygdarætlanina. Tí fáa vit komandi ár fyrstu nettrygdarlógina.

Men frú forkvinna. Tá ið støðan er spent á so nógvum økjum, økist vandin fyri, at orð okkara venda sær í flognum og koma aftur við fremmandum eygum.

Tí mugu vit geva okkum far um, hvørji tekin vit senda. Hvat vit siga. Og hvønn vit samstarva við. Tað kann fáa avgerandi týdning.

Tí skrivaðu vit undir semjuskjal við ES, tá ið Ursula von Der Leyen vitjaði í vár – og tí vilja vit endurnýggja avtalurnar við ES.

Tí hava vit gjørt semjuskjal við USA, og tí letur sendistovan í Washington loksins upp í heyst.

Tí vilja vit styrkja handilssamstarvið við Bretland, Japan, Brasil, Kina, India og Suðurkorea.

Tí hava vit minkað samstarv okkara við Russland.

Og tí vilja vit í nógv størri mun umboða okkara egnu áhugamál úti í heimi.

Hóast samstarvið við donsku stjórnina er gott, er breið semja í Tinginum um, at vit mugu víðka uttanríkispolitiska virkisførið.

Allir flokkar halda, at Føroyar eiga at hava sjálvstøðugan limaskap í viðkomandi altjóða felagsskapum. Eitt nú heimshandilsstovninum WTO og í fiskivinnufelagsskapunum NEAFC og NAFO.

Og nú eru vit eisini farin at missa tolið við Norðurlandaráðnum. Í hálva øld hava vit roynt at fáa fullgildan limaskap – til fánýtis.

Eftir ólavsøku fari eg at kalla forfólkini í øllum flokkum inn, so breið semja kann fáast um, hvussu vit víðka rásarúmið á uttanríkispolitiska økinum.

Her krevst, at vit lata ósemjurnar um loysing/samband liggja og savna okkum um tað, vit eru samd um. Annars koma vit ikki úr stað.

***

Frú forkvinna!

Onkuntíð verður forhánisliga sagt, at Føroyar bara eru sum ein lítil bygd. Men hugsa vit um, hvussu nógv vit skapa, hvussu væl vit hava skipað okkum, hvussu framkomin vit eru og alt virksemið, so er tað skeivt.

Tí:

Hvør bygd hevur sítt egna symfoniorkestur, rithøvundar, tónleikarar og leiklistafólk?

Hvør bygd hevur so nógv ítróttafólk í fremstu røð? Til EM, HM og nú enntá tvey til OL.

Í hvørji bygd savnast fólkið at syngja egnar sangir á egnum máli á tjóðarhátíðini?

Vit arbeiða við at útbyggja og nútímansgera Listasavnið. Vit stuðla átøkum fyri føroyska málið og rinda gleðiliga fyri netorðabøkur. Vit stuðla Koltursverkætlanini, eftirløn hjá listafólki, stórhøllini – og vertskapi okkara fyri Oyggjaleikunum í 2027.

Siðsøga okkara, listin, málið og óteljandi ítróttabrøgdini bera boð um, at Føroyar ikki skulu metast eftir tali, men eftir dygd, avrikum og náddum málum.

Og júst ólavsøkan er á onkran hátt sum ein stemmigaffil. Hesar báðar dagarnar finna vit øll felagstónan og verða mint á tað, sum bindur okkum saman og ger okkum serstøk.

Her samantvinnast fortíð og framtíð, her fylgjast politikkur og kirkja, her kókar av mentanarligum og ítróttaligum avrikum.

***

Frú forkvinna!

Á ólavsøku myndar sangurin bæði semju og savningarmegi.

Eingin hoyrist burturúr, og tí hoyrast øll. Tað er fleirraddað, men kortini samfelt – og altíð í breiðari semju.

Í gjár vóru tað børnini. Fyri løtu síðan var tað kórið. Í kvøld verður tað Føroya fólk.

Eg vóni, at eisini vit fólkavaldu – nú vit fara undir nýtt tingár – í størri mun fara at leggja okkum eftir semjum og samstarvi. At sangurin so at siga verður samfeldur, hóast røddirnar eru ymiskar.

Tíðin krevur tað av okkum.

Og framtíðin krevur tað av okkum.

Góða ólavsøku.

Gud signi Føroyar.

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

Prime Minister´s Office

# Ískoytispartur til ólavsøkufrágreiðing løgmans 2024

# STJÓRNARMÁL

## Viðurskiftini við Danmark

Samstarvið og samskiftið við danskar myndugleikar er gott, ikki minst á verju- og trygdarpolitiska økinum, har føroyskir myndugleikar fáa regluliga kunning um viðkomandi mál. Samstarvsráðið er virkið og møtist nú tvær ferðir um árið. Har luttaka løgmaður, danski forsætisráðharrin og grønlendski landsstýrisformaðurin umframt onnur viðkomandi landsstýrisfólk og ráðharrar. Seinasti fundur var í Keypmannahavn í januar og næsti fundur verður í Danmark í august. Føroyar taka við formansskapinum 1. januar 2025.

Hóast samstarvið er gott, er neyðugt við broytingum í viðurskiftunum við Danmark, ikki minst á uttanríkispolitiska økinum, har breið politisk semja er um, at Føroyar mugu fáa størri heimildir. Støðan er vælkend og hevur verið óbroytt síðstu mongu árini. Allir flokkar í Føroyum eru samdir um, at Føroyar eiga at fáa sjálvstøðugan limaskap í altjóða felagsskapum, so sum heimshandilsstovninum WTO og Norðurlandaráðnum, umframt at vit kunnu umboða okkum í egnum navni í fiskivinnufelagsskapum sum NAFO og NEAFC, men danskir myndugleikar siga, at løgfrøðiligu karmarnir ikki loyva hesum. Løgmaður fer eftir ólavsøku at samla allar politisku flokkarnar til tess at kanna møguleika fyri breiðari politiskari semju um, hvussu komast kann víðari við at tryggja Føroyum neyðugu uttanríkispolitisku heimildirnar.

## Suðuroyartunnil

Arbeiðið at fyrireika undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy við hartil hoyrandi vegagerð v.m. heldur fram. Tað er P/F Suðuroyartunnil, sum stendur fyri arbeiðinum. Higartil hevur Løgtingið játtað 20 mió. kr. til fyrireikingararbeiðið. Forkanningar, sum fevna um jarðfrøðiligar kanningar, trygdarspurningar viðvíkjandi farleiðini, linjuføring o.a., eru lidnar. Harumframt verður arbeitt við einum fíggingarleisti, sum tekur støði í metingum um kostnað av verkætlanini, væntaðari ferðslu og inntøkum, og sparingum, tá ið verandi sjóvegis farleið verður niðurløgd. Ætlanin er í heyst at leggja fram lógaruppskot, sum gevur P/F Suðuroyartunnil heimild til at projektera og senda verkætlanina í útboð.

## Yvirtøka av Íleggingargrunninum

Í januar í ár undirskrivaðu løgmaður og danski forsætisráðharrin avtalu um, at Íleggingargrunnurin skal yvirtakast. Hetta hevur verið eitt mál, sum fleiri undanfarin landsstýri hava arbeitt við. Tað, at Íleggingargrunnurin kemur á føroyskar hendur, merkir, at Føroyar fáa fult ræðið á fænum í grunninum, sum er smáar 700 mió. kr., og at Løgtingið kann raðfesta, hvat fæið skal nýtast til. Løgmaður hevur víst á møguleikan, at helvtin av fænum skal brúkast til nýggja farstøð í Vága Floghavn, og

hin helvtin skal setast av til møguligan suðuroyartunnil. Í sambandi við yvirtøkuna verður uppskot til ríkislógartilmæli lagt fyri tingið, soleiðis at frameftir verður lóggivið við løgtingslóg í øllum grunsins viðurskiftum.

**Sjóhitaskipan í Tinganesi**
Løgmansskrivstovan hevur saman við Betri Trygging arbeitt við møguleikanum at gera eina sjóhitaskipan, sum skuldi veita hita til tey 22 húsini í Tinganesi og har um leiðir, sum Løgmansskrivstovan varðar av. Hetta arbeiðið er tó fyribils steðgað. Í staðin verður nú saman við Tórshavnar Kommunu og Fjarhitafelagnum arbeitt við at kanna møguleikan fyri at fáa fjarhitaleiðing út í Tinganes.

**Stokkastovan umvæld**
Arbeiðið at umvæla útveggirnar av stokkastovuni í Tinganesi, sum fór í gongd í 2021, er nú liðugt. Tó manglar enn at umvæla gólvið, sum eftir ætlan verður gjørt í heyst, og at styrkja tekjuna, so at flag kann verða lagt á. Hetta verður gjørt komandi summar. Arbeiðið er liður í heildarætlan at umbyggja og umvæla Tinganes. Stokkarnir, ið brúktir eru til umvælingina, eru feldir á sama stað í Noregi, sum upprunastokkarnir vórðu feldir fyri 340 árum síðani. Føroyskir og norskir handverkarar hava saman við Tjóðsavninum og Landsverki staðið fyri arbeiðinum. Men verkætlanin er eisini framd í samstarvi við norska ríkisantikvarin, universitetið í Göteborg og svenskar serfrøðingar í tílíkum umvælingum.

## FÍGGJAR- OG BÚSKAPARMÁL

**Føroyski búskapurin**
Útgangsstøðið hjá føroyska búskapinum er gott, og tað almenna í Føroyum er ikki serliga skuldarbundið sammett við onnur lond í vesturheiminum. Metingar benda á, at BTÚ veksur millum 4 og 5% í 2024 og 2025. Harafturat er nettotilflyting til Føroya. Men føroyska samfelagið hevur kortini stórar búskaparligar avbjóðingar, tá ið hugsað verður um afturvendandi sveiggini í búskapinum, ið stava frá okkara tilfeingisvinnum og vantandi haldføri í almenna búskapinum. Neyðugt er tí at stýra við skynsemi, um Føroyar skulu koma væl gjøgnum avbjóðingarnar, uttan at vælferðin verður sett í vanda.

**Skattaumskipan samtykt - skatturin lækkar hjá lág- og miðalløntum**
Samgongan hevur framt eina stóra skattaumskipan, sum serliga lættir um hjá lág- og miðalløntum. Endamálið við umskipanini var at lækka inntøkuskattin. Skattastigin hevur verið óbroyttur síðstu

átta árini. Samstundis eru lønirnar hækkaðar. Hetta hevur merkt økt skattatrýst á lønarinntøku, og at alsamt fleiri løntakarar rinda hægri skatt av síðst vunnu krónu. Við skattaumskipanini rindar stóra fjøldin av miðalløntum lægri skatt av síðst vunnu krónu. Fyri ein fastløntan arbeiðara merkir skattalættin í 2025 600 kr. meira um mánaðin og 10% meira útgoldið fyri yvirtíð. Stóra fjøldin av miðalløntum fáa um 1000 kr. um mánaðin í skattalætta, meðan landsstýrisfólk og onnur við høgum lønum fáa 300 kr.

**TAKS nýggja skattaskipan**
Neyðugt er at nútímansgera skattaskipanirnar hjá TAKS. Verandi skipanir eru so gamlar og ótíðarhóskandi, at TAKS kann ikki veita vissu fyri, at tær kunnu koyra longri enn 5-6 ár aftrat. Gongd er tí sett á eina stóra nýskipan, sum fer at taka eini seks ár at fremja. Verkætlanin verður kallað "Kjarnan". Partur av arbeiðinum er longu farin í gongd.

Verandi skipanir hjá TAKS stuðla ikki undir dagførd krøv, dagførdar arbeiðsgongdir og ætlanir hjá TAKS. Skipanirnar eru bygdar á gamla tøkni frá 1980unum og eru tí avbjóðandi at viðlíkahalda. Samtíðarskattaskipanin kom 1. apríl 1984. Tað eru tí 40 ár síðani, vit fingu núverandi tøkniliga grundvøll undir okkara skattaskipan.

**Lagaligari MVG-afturbering til grønar hitaloysnir**
Løgtingið samtyktið í februar 2024 lógaruppskot um at gera afturberingina av MVG fyri grønar hitaloysnir lagaligari, soleiðis at afturberingin av MVG fyri grønar hitaloysnir heldur fram í 2025, og at afturberingartíðarskeiðið verður longt til og við 2027.

Samtykta uppskotið hevur við sær fulla afturbering av MVG fyri grønar hitaloysnir í 2024. Minkingin í afturberingini byrjar ikki fyrr enn í 2025, og hon verður meira stigvís og lagalig enn tað, sum var samtykt í undanfarnu lóg. Nýggja lógin fer at leggja upp til, at í 2025 verður MVG frítøkan 75%, í 2026 50%, og í 2027 25%. Frá 2028 verður ongin frítøka.

**Sáttmálasamráðingar**
Í 2023 hava fleiri fakfeløg verið til sáttmálasamráðingar. Tað fyrsta stóra felagið var Felagið Føroyskir Sjúkrarøktafrøðingar. Hesar samráðingar endaðu við einum drúgvum verkfalli, áðrenn semja varð gjørd millum partarnar. Tá ið semja varð undirskrivað millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktafrøðingar og Fíggjarmálaráðið, komu fleiri aðrar semjur eisini uppá pláss við onnur feløg.

Í samgonguskjalinum varð avtalað, at samgongan vildi geva lægst løntu bólkunum á umsorganarøkinum eitt lønarlyft. Hesir bólkar vóru umfataðir av lønarlyftinum: námsfrøðingar, námsfrøði-

hjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar, heilsuhjálparar við og uttan útbúgving. Talan er um bólkar sum starvast innan eldra-, dagstovna- og almannaøkið, har trupult er at nøkta starvsfólkatørvin. Samlaðu almennu lønarútreiðslurnar vóru í 2022 3.511 mió. kr. Semjurnar sum eru gjørdar kosta 13,3 % yvir trý ár. Lønarvøksturin í umrødda 3 ára skeiði er tí umleið 467 mió. kr.

Lønarlyftið kom omaná lønarkarmin og var ikki partur av lønarsamráðingunum annars. Lønarlyftið kostaði umleið 47 mio. kr. brutto fyri land og kommunur, harav kostnaðurin fyri landið er 12 mió. kr. Lyftið merkti at lønin hjá umfataðu bólkunum var hækkað við millum 1.000 og 1.600 krónum. Lønarlyftið fekk virknað frá 1. januar 2024.

Í heyst byrjar eitt nýtt samráðingarumfar við Starvsfelagið, Heilsuhjálparafelagið, Heilsurøktarafelagið, Ljósmøðrafelagið, Kost- og Føðslufelagið, Felagið Maskinmeistaralærarar og Fakfelag Sjómansskúlalærara.

**Privati arbeiðsmarknaðurin**
Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðarafeløgini undirskrivaðu tann 9. juni 2024 ein nýggjan tvey ára sáttmála fyri tíðarskeiðið 1. mai 2024 til 1. mai 2026. Á lønarøkinum er nýggi sáttmálin bygnaðarliga í tveimum. Øðrumegin ein yvirskipaður karmur fyri lønarhækkingina, hinumegin eitt serstakt lønarlyft fyri ein láglønarbólk í samfelagnum. Tilsamans er lønarkarmurin fyri tveyára skeiðið uml. 8,2%. Harumframt verður verður givið eitt serstakt lønarlyft til ein láglønarbólk á tilsamans 7,25 kr. um tíman.

## <u>Átøk komandi tingár</u>

**Tryggja langtíðarhaldførið – styrkt fíggjarpolitiskt regluverk**
Framskrivingar hjá Fíggjarmálaráðnum í játtanarkørmunum fyri 2025 vístu, at fíggjarlógin fyri 2025 fer at geva hall, um ikki fíggjarpolitisk átøk verða sett í verk til tess at styrkja inntøkugrundarlagið og tálma útreiðsluvøkstrinum. Við átøkunum minkar væntaða hallið í 2025. Framskrivingar vísa, at serliga útreiðslurnar í almanna- og heilsugeiranum fara at vaksa komandi árini. Vøksturin kemur serliga av broyttu fólkasamansetingini, sum ger, at talið á eldri borgarum veksur skjótari enn talið á fólki í arbeiðsførum aldri.

Fyri at venda framskrivaða hallið til avlop er neyðugt at fremja átøk, sum tálma útreiðslunum og økja um inntøkurnar næstu árini. Landsstýrið fer at hyggja nærri at almenna geiranum við tí fyri eyga at fremja tillagingar, ið kunnu betra almenna raksturin frameftir. Eisini fer landsstýrið at gera

uppskot til fíggjarpolitiskt regluverk, sum skal vera við til at tryggja haldførið og vælferðina í framtíðini. Ætlanin er, at eitt fíggjarpolitiskt regluverk skal hava breiða semju ímillum flokkarnar á tingi.

**Umskipan av almenna bygnaðinum**

Samgongan heldur tað vera umráðandi at fáa kannað, um almenni geirin í Føroyum virkar nóg væl sammett við onnur lond. Tað hevur m.a. við sær, at kannað verður, um almennu skipanirnar í Føroyum hóska til støddina á samfelagnum, ella um skipanirnar í summum førum møguligar eru óneyðuga stórar og kostnaðarmiklar og betur egnaðar til størri samfeløg. Arbeiðið snýr seg eisini um at kanna, um tað ber til at fáa størri fyrimunir av stórrakstri í almenna geiranum, um almennar tænastur og stovnar kunnu verða skipað øðrvísi og møguliga í størri eindum. Endamálið er at kunna veita somu ella betri tænastur fyri færri útreiðslur. Politiska skipanin, landsstýrið og myndugleikar hava skyldu til at kanna javnan, um til ber at reka almenna geiran fyri færri útreiðslur. Arbeiðið verður væntandi skipað við fleiri slóðum og við íblástri frá líknandi arbeiði í okkara grannalondum, og ætlanin er eisini við breiðari politiskari semju at umskipa almenna bygnaðin.

**Útveiting av almennum uppgávum**

Har tað er møguligt og skynsamt, skal privata vinnan hava møguleika at bjóða upp á almennar tænastur. Treytin er, at tað fíggjarliga og tænastuliga er betri fyri brúkaran og landið. Í komandi tingsetu er ætlanin at orða ein útveitingarpolitikk.

**Styrkt eftirlit við innflutningi av rúsevnum**

Sambært heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu skulu átøk fremjast komandi árini, sum væntandi fara at bøta um eftirlitið við innflutninginum, so at tað verður torførari at flyta rúsevni inn í landið. Ætlanin er at fáa eina profileringsskipan, so at marknaðareftirlitið verður munadyggari og beinraknari. Tørvur er eisini á at dagføra skannararnar hjá TAKS. Í sambandi við komandi dagføring og útbygging av flogvøllinum í Vágum og terminalinum hjá Smyril Line í Tórshavnar havn fáa tollararnar hjá TAKS ætlandi betri eftirlitsumstøður.

**Talgildu Føroyar**

Í 2023 varð sjøtul settur á 2. umfar av Talgildu Føroyum. Nýggj heildarætlan er gjørd fyri árini 2024–2026. Nýggja heildarætlanin umfatar ymisk átøk, m.a. nýggjan talgildan myndugleika, talgilda tinglýsing, virkisvanga, fulltrúa-loysn, heilsutænastur á Vanganum og at gagnnýta nýggja tøkni, so sum vitlíki millum annað í eldrarøkt.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL

*Uttanríkismál*

**Trygdar- og verjumál**
Í vár samtykti Løgtingið einmælt uppskot til samtyktar um tjóðartrygdarpolitikk Føroya. Politikkurin fevnir um tíggju aðalmál, ið landsstýrið skal virka eftir fyri at samstarva um frið, fólkaræði, mannarættindi og støðufesti í heiminum, og fyri at fremja tryggleika Føroya fólks og fólkaræði tess, tryggja landa- og sjóumveldi og verja ta vælferð, undirstøðukervi og tær samfelagsskipanir, sum hava týdning.

Aðalmálið við einum føroyskum tjóðartrygdarpolitikki er, at trygd og friður skulu valda, og at føroyskir myndugleikar skulu hava virknan leiklut at røkka hesum máli.

Føroyar skulu taka lut og vera við til at mynda gongdina, nú NATO og limalondini í størri mun enn fyrr vísa norðurleiðunum ans. Føroyar skulu eftir førimuni fremja átøk, sum stuðla undir eina trúverda ræðingarætlan hjá NATO. Millum annað tá ið talan er um økt eftirlit á sjónum, í luftini og undir vatnskorpuni.

Somuleiðis verður raðfest, at Vørn og aðrir viðkomandi føroyskir myndugleikar og áhugapartar taka lut í t.d. flotavenjingum og øðrum viðkomandi átøkum, men føroyska íkastið til tílík átøk og samstørv er sivilt.

Hugtakið trygdarpolitikkur er seinnu árini víðkað munandi og røkkur í altjóða politikki í dag eisini inn á málsøki sum handil, fjarskifti, tøkni, orku, gransking og atgongd til ávíst tilfeingi, flutning og veiting. Tøknilig menning, undir hesum eisini vitlíki, hevur harumframt alsamt vaksandi ávirkan á vald í heimssamfelagnum. At trygdarpolitiska hugtakið víðkast, setir størri krøv til føroyskar myndugleikar, tá ið um ræður at fyrisita trygdarpolitisk atlit á yvirtiknum málsøkjum, har tað er Løgtingið, ið lóggevur.

Sostatt hevur tjóðartrygdarpolitikkurin til endamáls at leggja upp fyri teimum mongu avbjóðingum og møguleikum fyri samstørvum, ið taka seg upp, nú stórar rembingar eru á heimspolitiska pallinum.

**Samstarvið við USA**
Seinnu árini hevur samstarvið við USA verið fyri stórari menning. Í 2020 undirritaðu Føroyar og USA eina partalagsyvirlýsing um at økja samstarvið. Við umleið 13,8% av samlaða føroyska útflutninginum er USA vorðið ein týðandi útflutningsmarknaður fyri føroyskar fiskavørur. Harumframt hevur partalagsyvirlýsingin latið upp fyri víðkaðum politiskum, vinnuligum og mentanarligum samstarvi umframt innan fyri útbúgving og gransking.

Fyri at styrkja samstarvið millum londini uppaftur meira seta Føroyar á stovn sendistovu í Washington í heyst. Sendifólk er tilnevnt, og sendistovan letur upp 1. september 2024.

Alsamt fleiri amerikansk flotafør hava seinnu árini vitjað í Føroyum. Talan er um eina gongd, sum er avtalað millum partarnar, og sum er við til at stuðla undir góðu viðurskiftini millum Føroyar og USA.

Í partalagsyvirlýsingini er ásett, at ein árligur fundur skal vera millum Føroyar og USA fyri at fremja endamálið um tættari samstarv í verki. Fyrsti partalagsfundur varð hildin í Washington DC í februar 2023, og annar fundur varð hildin í mai í ár í Føroyum.

Átakið Fog Swept Islands – Faroe Islands Culture Days in New York sum var frá apríl til juli, er somuleiðis liður í at styrkja samstarvið við USA. Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Almanna- og mentamálráðið og Visit Faroe Islands stóðu fyri tiltakinum. Talan var um eina listaframsýning við sjey føroyskum listafólkum umframt eina røð av tiltøkum við føroyskum tónleiki, bókmentum, søgu, gastronomi, filmi og sniðgeving.

**WTO**
Í longri tíð hevur landsstýrið arbeitt fram móti, at Føroyar fáa sjálvstøðugan limaskap í heimshandilsfelagsskapinum, World Trade Organization. Drúgt samskifti hevur verið við donsku stjórnina um málið, men enn hevur ikki eydnast at fáa semju, sum kann slóða fyri føroyskum limaskapi í WTO. Sjálvstøðugur føroyskur limaskapur í WTO fer framhaldandi at verða raðfest frammarlaga í landsstýrinum.

**Marknaðaratgongd**
Landsstýrið virkar støðug fyri at tryggja føroyskum vørum kappingarføra marknaðaratgongd til viðkomandi marknaðir úti í heimi, og serliga arbeiðið mótvegis ES, Bretland, Brasil, Kina, Japan og Suðurkorea verður raðfest frammarlaga.

**Kina**
Gott samskifti er við kinverskar myndugleikar í løtuni um at styrkja handilssamstarvið millum Føroyar og Kina. Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum vitjaði Kina í fjør, og landsstýrismaðurin hevur eisini hitt kinverska handilsmálaráðharran í Keypmannahavn fyri stuttum. Partarnir eru samdir um, at farast skal undir at fyrireika neyðugu stigini til formligt samskifti um fríhandilssáttmála millum Føroyar og Kina.

Áhugi er á báðum síðum fyri at menna samhandilin. Í hesum sambandi kann nevnast, at ætlanin er at undirrita tvær heilsufrøðiligar protokollir í ár. Eina fyri lýsi og mjøl, og eina fyri veiddan fisk. Hesar protokollir fara at gera tað møguligt at útflyta hesar vørur til Kina.

**Brasilia**
Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Heilsufrøðiliga Starvsstovan hava í fleiri ár arbeitt við at fáa í lag heilsufrøðiligan sáttmála við Brasil. Føroyskir saltfiskaframleiðarar hava leingi strongt á at sleppa inn á brasilska marknaðin.

Fyri at seta ferð á málið var ein sendinevnd við umboðum frá Uttanríkistænastuni og Heilsufrøðiligu starvsstovuni á ferð í Brasil í apríl mánaði. Ferðin eydnaðist væl, og staðfest varð, at stórur áhugi er fyri at innflyta saltfisk og laks úr Føroyum. Fyri sum skjótast at koma víðari við spurninginum um heilsufrøðiligan sáttmála vitjaðu umboð fyri brasilsku heilsufrøðiligu myndugleikarnar Føroyar í juni 2024.

Avtala er somuleiðis gjørd um at skráseta Føroyar rætt í brasilsku tollskipanini, so føroyska vinnan ikki skal rinda meira í tolli enn okkara kappingarneytar í Evropa.

**ES**
Bæði verandi og undanfarin landsstýri hava arbeitt við at styrkja samstarvið við ES. Seinastu árini hava tingingar verið millum Føroyar og ES um eitt semjuskjal, og 14. mars í ár varð semjuskjalið undirritað í Tinganesi av løgmanni og Ursulu von der Leyen, nevndarforkvinnu í ES. Endamálið hevur verið at fáa ein yvirskipaðan karm um samstarvið millum Føroyar og ES og at menna viðurskiftini uppaftur meira, eitt nú innan fyri handil, útbúgving, mentan, grøna orkuskiftið, veðurlagsátøk og talgilding.

Semjuskjalið staðfestir harumframt, at tað er uttanríkistænastan hjá ES (EEAS), ið hevur ábyrgdina av viðurskiftunum við Føroyar. Við hesum verður tað fyri fyrstu ferð ein ES-myndugleiki, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av viðurskiftunum við Føroyar heldur enn sum higartil, at ymiskir sektormyndugleikar hava tikið sær av samstarvinum við Føroyar, eitt nú sambært handilssáttmálanum ella sáttmálanum um granskingarsamstarv.

**Avmarkandi tiltøk**

Føroyar hava sett í verk avmarkandi tiltøk móti Russlandi. Hesi tiltøkini taka støði í millumtjóða sanktiónum, tó við ávísum tillagingum. Talan er um rúgvismikið lógarverk, og verður arbeitt við dagføringum við tí endamáli at tryggja, at tiltøkini yvirskipað sæð og í tann mun, ES-tiltøkini eru viðkomandi fyri Føroyar, svara til tiltøkini hjá okkara sameindu. Hesi tiltøk vísa saman við egnum avmarkingum um havnaatgongd, at Føroyar taka ábyrgd í millumtjóða viðurskiftum.

**Arktis**

Løgtingið tók fyrr í ár einmælt undir við uppskoti til samtyktar um arktiska politikk Føroya. Talan er um eina dagførda útgávu av Arktiska politikkinum, ið táverandi landsstýri læt úr hondum í oktobur 2022.

Endamálið við dagførda arktiska politikkinum er at seta uttanríkispolitisku kós Føroya sum land í Arktis og í breiðum altjóða høpi. Politikkurin vísir á mál og átøk, ið Føroyar raðfesta í millumtjóða samstarvi um burðardygga menning í Arktis.

Arktiski politikkur Føroya er bygdur á grundregluna um fólkaræðisliga burðardygd. Tað er fólkið í Arktis og Norðurhøvum, ið eigur ábyrgdina av og avgerðarrættin í øllum, sum fer fram, og skal við beinleiðis og sjálvstøðugari umboðan í viðkomandi samstarvi og avtalum mynda gongdina í økinum. Hóast fortreytirnar fyri samstarvi eru grundleggjandi broyttar, halda vit fram í partalagi við okkara sameindu at virka fyri friði og betri livikorum um okkara leiðir.

Arktiski politikkurin fatar um málsøki á fleiri landsstýrisøkjum, eitt nú gransking, umhvørvi og tilbúgving. Skulu Føroyar reka virknan arktiskan uttanríkispolitikk, mugu neyðugar játtanir setast av til tað á øllum fakøkjunum, sum politikkurin fevnir um.

Komandi ár taka Føroyar saman við Danmark og Grønlandi við formansskapinum í Arktiska ráðnum. Eftir ætlan fara Føroyar at standa á odda fyri formansskrá um havið, umframt at hýsa altjóða havráðstevnu.

*Vinnumál*

**Lóg um burðardygga ferðavinnu**
Drúgva málið um ferðavinnu og atgongd til náttúruna er nú skipað í lóg um burðardygga ferðavinnu, sum varð samtykt við breiðum meiriluta, áðrenn løgtingið fór í summarfrí.

Lógin tryggjar landsins íbúgvum rætt at ferðast frítt í náttúruni undir ábyrgd. Samstundis er lógin karmur um, at staðbundna fólkaræðið kann skipa ferðavinnuna í sínum øki.

Endamálið er at skipa ferðsluna í náttúruni og ferðsluna til bygdir væl, samstundis sum arbeitt verður miðvíst við at marknaðarføra Føroyar fyri ferðafólki, sum virða og hava fyrilit fyri umhvørvi, náttúru og fólkinum, ið her býr.

Komandi tíðina verður dentur lagdur á at stuðla kommunum í at gera ferðavinnuætlanir og at skipa best hugsandi kunning til ferðafólk, so at tey trygt kunnu ferðast í Føroyum undir ábyrgd og sambært teimum skipanum, sum eru galdandi. Eisini verða gjørdar kunngerðir á teimum økjum, har nýggja lógin leggur upp til neyvari ásetingar.

**Nettrygd**
Okkara høga vælferð, virkisfýsna vinna og vanligi gerandisdagur er óloysiliga knýtt at talgildum loysnum. Loysnum, sum fevna um allar geirar og ávirka stórt sum smátt. Avleiðingarnar kunnu vera álvarsligar, um skipanir ikki virka, ella um dátur brádliga ikki eru atkomiligar ella koma í skeivar hendur. Tí skulu vit miðvíst byrgja fyri álopum og skipa munadygga tilbúgving, ið kann økja um mótstøðuførið og minka um avleiðingarnar, tá ið álop henda.

Nettrygdarætlanin 2024–26 setur átta yvirskipað mál, m.a. at verja samfelagstýðandi kt-undirstøðukervi; at skipa nettrygdartilbúgving; at skipa nettrygdarútbúgvingar og at menna hugburðin til nettrygd.

Hóast talan er um víðfevnda ætlan, og langt er á mál, so eru fleiri av málunum væl ávegis at verða framd. Við støði í broytingunum, sum í vár vórðu gjørdar í fjarskiftislógini, kann Fjarskiftiseftirlitið nú kortleggja kritiska undirstøðukervið í Føroyum. Hetta verður gjørt fyri at kunna meta um váðar, viðbrekni, sínámillum sambond og veikleikar í teimum skipanum, sum eru serliga týdningarmiklar fyri, at samfelagið virkar. Arbeiðið at smíða nettrygdarlóg er byrjað, og verður uppskotið lagt fyri tingið komandi setu.

**Vitaverkið yvirtikið**
1. juni í ár varð Vitaverkið yvirtikið, og Sjóvinnustýrið er nú myndugleiki fyri sjóuppmerking og vitaverk. Yvirtøkan fevnir um 24 vitar, sum verða riknir frá gomlu Loranstøðini á Eiði, umframt onnur sjómerki, starvsfólk, rakstrarúgerð, sum er knýtt at vitunum, og rakstrarútgerð í DGPS-støðini á Bøllureyni. Somuleiðis hava føroyskir myndugleikar, t.e. Sjóvinnustýrið, yvirtikið ábyrgd av avtalum og samstarvi, sum Søfartsstyrelsen hevur havt við m.a. Arktisk Kommando, MRCC og Landsverk.

**Fíggjarøkið**
Lógin um fíggjarligt virksemi, FIL-lógin, er dagførd tvær reisur higartil í valskeiðnum. Lóggávan kring føroysku peningastovnarar er sostatt dagførd og á hædd við lóggávuna í grannalondunum og í ES.

Lógin um at endurreisa og avtaka ávísar fíggjarfyritøkur, RAL-lógin, er somuleiðis dagførd. Í hesum sambandi bleiv lógin um fíggjarligt støðufesti sett úr gildi, tí allar viðkomandi ásetingar á økinum nú standa í RAL-lógini.

Hvítvasklógin á ikki yvirtiknum málsøkjum er eisini dagførd. Ætlanin er longu í komandi tingsetu at dagføra bæði donsku og føroysku hvítvasklógirnar fyri at tryggja at Føroyar lúka altjóða krøvini á økinum.

**Filmsframleiðsla**
Lógin um afturbering til filmsframleiðslu varð á várið 2023 broytt, so at filmsframleiðslur, ið brúka upp til 20 mió. kr. í Føroyum, og sum lúka treytirnar fyri afturbering, verða tryggjaðar afturbering upp á 25 prosent av hesum útreiðslunum. Afturbering til verkætlanir, sum kosta omanfyri 20 mió. at fremja, krevur serstaka játtan á fíggjarlógini. Broytingin setir Føroyar meira ájavnt við næstu kappingarneytar okkara og ger tað tí lættari at brúka afturberingarskipanina til at fáa altjóða filmsframleiðarar at framleiða í Føroyum. Ábendingar eru um, at betraða afturberingarskipanin økir um áhugan fyri at fremja filmsverkætlanir í Føroyum.

**Tónleikaútflutningur**
Tónleikaútflutningsstovan, FMX, sum byrjaði sera varisliga, fekk í 2023 hægri raðfesting. FMX hevur longu verið ein stór hjálp hjá teimum, ið selja tónleik út um landoddarnar. FMX samstarvar eisini við landsmyndugleikarnar, so at samanhangur fæst millum almenn átøk uttanlands, sum nýta tónleik sum part av umboðanini, og arbeiðið hjá FMX at útflyta føroyskan tónleik.

Hægra raðfestingin fevnir bæði um vanliga virksemið hjá FMX og um eina nýggja stuðulsskipan, sum tónleikarar, tónasmiðir, útgávufeløg og onnur í tónleikavinnuni kunnu søkja úr til útflutningsfremjandi átøk.

**Matmenning og matpolitikkur**
Vit skulu gerast sjálvbjargnari við matvørum og minni bundin at innfluttum landbúnaðarvørum. Landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eru tí báðir farnir undir átøk, ið skulu fremja matvørumenning og gera, at føroyskar matvørur verða betur atkomiligar.
Ein týðandi liður í arbeiðinum er at stimbra eftirspurningin og við hesum skapa betri grundarlag undir framleiðsluni av føroyskum matvørum. Endamálið er at styrkja og menna undirstøðukervið fyri menning av matvørum í øllum landinum og at fáa samvirkni millum tey átøk, sum longu eru sett í verk, m.a. í Veltuni á Sandi og á Grøna Háskúlanum, á iNOVA og eisini at knýta samband við átøk, sum útbúgvingarstovnar og kommunur hava tikið stig til.

Arbeitt verður við at gera eina heildarætlan fyri matmenning við tilmæli til tíðarhóskandi stimbrandi karmar um at menna nýggjar matvørur og matvinnur í Føroyum.

**Landbúnaður**
Í 2023 vórðu tilsaman 1,5 mió. kr. veittar í stuðli til framburð og menning í landbúnaðinum. Onnur helvtin varð nýtt til verkætlanir, sum høvdu til endamáls at skapa størri vitan, menning og vøkstur á landbúnaðarøkinum. Hin helvtin varð brúkt til at fremja royndarverkætlanir, ið kunnu økja framleiðsluna, nýtsluna, virðingina fyri og tilvitskuna um stuttfluttar føroyskar dygdar- og heilsugóðar matvørur.

Stuðulsskipanin heldur fram í 2024 og er økt nakað, soleiðis at játtanin tilsamans er 1,7 mió. kr. Landsstýrið ætlar komandi árið at fremja eitt tyssi av átøkum landbúnaðinum at frama. Málið er at framleiða fleiri landbúnaðarvørur, skapa grundarlag fyri størri lønsemi í vinnuni, størri mótstøðuføri og skynsamari tilgongd, tá ið um lendisbrúk ræður. Fleiri av hesum ætlanunum síggjast aftur í løglistanum fyri komandi tingsetu.

**Aling**
Arbeitt verður støðugt við at menna karmarnar fyri laksa- og taraaling. Laksaalingin er grundsúla undir føroyska samfelagsbúskapinum, men taraalingin er enn á royndarstigi.

Viðvíkjandi laksaalingini eru ymiskar tillagingar gjørdar í kunngerðum, so at tað ber til at betra raksturin á verandi aliøkjum. Slíkar tillagingar eiga altíð at hava í huga, hvat er lívfrøðiliga ráðiligt,

og verða tí gjørdar í samráð við myndugleikarnar á økjunum, sum eru Landsdjóralæknin og Heilsufrøðiliga starvsstovan. ILA útbrotið á Vágsfirði er áminning um, at vit altíð eiga at vera á varðhaldi, men eisini dømi um, at yvirvøkan og tilbúgvingin í sambandi við alingina tykist virka.

Tøkugjaldið varð broytt á vári 2023, og í hesum sambandi stóðst eitt sindur av orðadrátti av spurninginum um framleiðslu av liðugvørum. Hóast tøkugjaldið ikki er einasta grundgeving fyri, hvussu fyritøkur skipa sína framleiðslu, valdi samgongan í vár at gera langtíðarsemju við Sambandsflokkin um, hvussu gjøld eiga at verða skipað fyri laksaalingina. Tøkugjaldsstigin verður lækkaður frá 1. januar 2025, og samstundis verður álagdur ein serskattur á vinnuna. Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum leggur fram uppskot um serskatt seinni í heyst.

Landsstýrismaðurin í alimálum leggur seinni í heyst fram frágreiðing um alivirksemi.

**Yvirtøka av málsøkinum flogferðsla og eftirlit við loftrúminum**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at taka yvir málsøkið flogferðsla frá 1. januar 2026. Samskift verður í løtuni við danska samferðslumálaráðið fyri at leggja yvirtøkuna til rættis.

**Løggilding av handverksmeistarum**
Arbeiðið við at gera løggildingarskipan fyri handverksmeistarar kom ikki á mál í seinastu tingsetu. Arbeiðið verður tikið uppaftur, og vónandi ber til at leggja fram lógaruppskot um málið seint í komandi tingsetu.

## ALMANNA- OG MENTAMÁL

*Almannamál*

**Almannapensjónir**
Sambært galdandi løgtingslóg um almannapensjónir hækkar fólkapensjónsaldurin tann 1. juli 2024 til 67,5 ár, og 1. januar 2030 hækkar hann til 68 ár. Løgtingslógin ásetur harafturat, at pensjónsaldurin frameftir skal ásetast í løgtingslóg 10. hvørt ár við eini 10 ára freist – fyrstu ferð í 2025 galdandi frá 2035.

Búskaparráðið hevur víst á, at tað hevur avgerandi týdning fyri haldførið á føroyska búskapinum, at fólkapensjónsaldurin verður hækkaður meira enn tað, sum longu er ásett í almannapensjónslógini. Landsstýrið miðar eftir at gera eina breiða semju um pensjónsaldurin, og landsstýriskvinnan fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um at hækka pensjónsaldurin galdandi frá 2035.

Skipanin við umrokning og eftirrokning av pensjónum er stirvin, umsitingarliga tung og kann seta pensjónistar í eina trupla fíggjarliga støðu. Tøkniliga menningin í Almannaverkinum ger tað møguligt at broyta skipanina, men neyðugt er eisini við lógarbroyting. Landsstýriskvinnan ætlar tí at leggja uppskot fyri tingið um, at pensjónin hvønn mánað skal ásetast við støði í inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar. Á henda hátt verður pensjónin javnað, so hvørt sum inntøkuviðurskiftini hjá pensjónistunum broytast, og harvið slepst undan trupulleikanum við stórum eftirrokningum til fólkapensjónistar.

Harumframt er neyðugt at tillaga almannapensjónslógina soleiðis, at hon verður í samsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd. Ítøkiliga er neyðugt at fáa greiðari reglur um, hvussu persónar, sum eisini hava búð og arbeitt í øðrum londum enn í Føroyum, skulu innvinna rættin til almannapensjón.

**Almannatrygd og tænastur**

Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, sum tann 1. januar 2021 loysti gomlu forsorgarlógina av, hevur nú meira enn trý ár á baki. Tó at løgtingslógin á flestu økjum virkar eftir ætlan, er neyðugt við ymiskum tillagingum. Eitt nú er neyðugt at endurskoða grundarlagið fyri rættinum til fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur, eins og støða má takast til, hvussu onnur inntøka skal ávirka rættin til fyribils uppihaldsveiting.

Harafturat ætlar landsstýriskvinnan at broyta § 44 í løgtingslógini soleiðis, at virksemið á harðskapsøkinum og tilboðini til harðskapsrakt í størri mun fara at síggjast aftur í lógartekstinum.

**Avrik á almannaøkinum**

Á vári 2023 læt endurvenjingar- og rehabiliteringstilboðið Skálagarður í Klaksvík upp, og í februar í ár læt bú- og umlættingardepilin við Sílá upp á Tvøroyri. Heimið við Sílá, sum hevur fimm búpláss og tvey umlættingarpláss, er ætlað fólki frá 18 ár og upp í pensjónsaldur. Búfólkini hava ymsar avbjóðingar, og námsfrøðiliga og heilsufrøðiliga ráðgevingin og vegleiðingin er lagað til tørvin hjá tí einstaka.

Frádráttarfría inntøkuupphæddin, ið er tann upphæddin, sum fólkapensjónistar kunnu vinna, uttan at fólkapensjónin verður ávirkað, er hækkað. Eisini eru treytirnar fyri brennistuðlinum vorðnar lagaligari, og pensjónistar, ið hava kapitalinntøkur, fáa nú eisini brennistuðul.

Sum partur av lógarpakkanum um skattaumskipan, er løgtingslóg um familjuískoyti broytt soleiðis, at húski við lágum inntøkum kunnu fáa orkuískoyti, sum er 10.000 kr. í 2024 og 5.000 kr. í ávikavist 2025 og 2026.

Dugni hevur fingið størri játtan til m.a. lønarframskrivingar og lønarlyft. Hækkingin hevði eisini við sær, at Dugni kundi flyta inn í nýggj hølir í Suðuroynni. Sostatt er virksemið hjá Dugna í Suðuroy nú í tryggari legu.

Ásannandi at talið á herbergsplássum ikki stóð mát við tørvin, vóru 1,5 mió. kr. játtaðar til fyriskipanir til heimleys á fíggjarlógini fyri 2024. Játtanin er markað til at útvega fleiri herbergspláss. Hetta hevur higartil havt við sær, at talið á plássum á Herberginum er økt úr 35 upp í 41 pláss.

Virksemið í Fountainhúsinum er økt nógv seinastu árini, og hølini vóru ikki longur hóskandi. Stuðulsjáttanin til Fountainhúsið varð tí hækkað, soleiðis at Fountainhúsið kundi flyta í nýggj hølir, sum eru væl størri og rúmligari enn tey gomlu. Hetta ger, at virksemið hjá Fountainhúsinum, við sama innihaldi og somu starvsfólkaorku, kann halda fram.

**Heimaráðgevingin fult útbygd**

Heimaráðgeving er eitt námsfrøðiligt tilboð, ið verður veitt foreldrum at barni við breki ella varandi sjúku. Endamálið er at viðvirka til, at gerandisdagurin hjá familjuni verður lættari, og at barnið kann fáa neyðugan stuðul í familjuni. Tænastan varð sett á stovn í 2015 og var tá tilboð til foreldur at barni við autismu og hevur síðani verið stigvíst og miðvíst útbygd.

Frá mai 2024 hevur tænastan verið fult útbygt, og nú fevnir hon um øll børn í málbólkinum. Stóri eftirspurningurin eftir tænastuni hevur tó við sær, at bíðilisti er til Heimaráðgeving.

**Námsfrøðiliga eftirlitið á føroyskar hendur**

Sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur hevur landsstýrisfólkið í almannamálum námsfrøðiligt eftirlit við tænastum, ið verða veittar sambært kapitlum 5 og 6 í løgtingslógini. Endamálið við eftirlitinum er at tryggja, at tilboð og tænastur virka sambært ætlan og virkisætlan, at persónar, sum fáa tilboð og tænastur, trívast og mennast, at hølisviðurskiftini eru hóskandi, og at fakliga støðið hjá starvsfólki er nøktandi.

Eftirlitið, sum skal fremjast í minsta lagi annaðhvørt ár, hevur higartil verið framt av donskum eftirlitsfólki. Í eina tíð hevur verið arbeitt við at fáa námsfrøðiliga eftirlitið á føroyskar hendur, og eftir ætlan verður fyrsta føroyska eftirlitið framt í heyst.

**Brekumboðið og hoyring í breksáttmálanum**

Føroyar fáa nú eitt brekumboð. Løgtingslógin um brekumboð varð einmælt samtykt í mars 2024. Endamálið við brekumboðnum er at styrkja rættindi og kor hjá fólki, ið bera brek. Farið er undir fyrireikandi arbeiðið, soleiðis at brekumboðið kann fara til verka, tá ið lógin kemur í gildi 1. januar 2025.

Tann 23. august 2024 skulu Føroyar saman við Grønlandi og Danmark til hoyring í sáttmála Sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Hoyringin verður í Genève í Sveis, og tað er brekrættindanevndin hjá ST, ið stendur fyri hoyringini. Føroyar samtyktu at taka undir við sáttmálanum í 2009, og hetta er fyrstu ferð síðani 2014, at Føroyar skulu til hoyringar í breksáttmálanum. Fyrireikandi arbeiðið er í gongd.

**Tann góða tilgongdin**
Tann góða tilgongdin er ein tvørgeiraligur og tvørfakligur samstarvsleistur, skipaður í 2015, ið hevur sum endamál at skipa eina góða tilgongd fyri børn við autismu og familjur teirra. Samstarvsleisturin er nú eftirmettur, og ein frágreiðing varð í hesum sambandi handað landsstýriskvinnuni í almannamálum í mars 2024. Í arbeiðsbólkinum, sum hevur gjørt eftirmetingina, hava sitið umboð fyri allar samstarvspartarnar, t.e. Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsumálaráðið, Autismufelagið og Kommunufelagið. Eftirmetingin vísti, at tað er neyðugt at gera ymiskar tillagingar í samstarvsleistinum. Arbeiðið við at finna røttu loysnirnar skal eftir ætlan gerast liðugt í 2024.

**Heildagstilboð á Skúlanum á Trøðni**
Skúlin á Trøðni er einasti serskúli í Føroyum. Á skúlanum ganga børn, sum ikki væl tola broytingar, og sum ikki væl megna skiftið millum skúlan og frítíðartilboð teirra frá heimakommununi ella Almannaverkinum. Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum og landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum hava sett sær fyri miðvíst at arbeiða við at bróta niður geirar og at skipa tænastur við barninum í miðdeplinum. Tá ið talan er um børn í serskúla, er arbeiðsbólkur settur at gera tilmæli um, hvussu eitt heildagstilboð kann skipast, ið fevnir um bæði skúlatilboð og frítíðartilboð. Endamálið er at veita eina samanhangandi tænastu, sum kann fyribyrgja óneyðug skifti, ið kunnu hava við sær mistrivnað og strongd.

Landsstýrisfólkini eru samd um, at hetta tilboðið, umframt at tað kann gerast eitt nýbrot, tá ið tað snýr seg um at bróta niður geirar, eisini kann veita íblástur til, hvussu tænastur kunnu umskipast á øðrum økjum barninum at frama. Arbeiðið er eitt samstarv millum Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Kommunufelagið.

**Bygging av vardum bústøðum**
Arbeitt verður við at gera breiða semju millum allar flokkar á tingi um langtíðarætlan fyri at keypa grundøki og byggja vardar bústaðir og verkstaðir komandi árini. Ætlanin er at byggja umleið 10–12 nýggjar stovnar komandi 10 árini. Nakrir skulu koma í staðin fyri verandi stovnar, sum eru ov smáir, ótíðarhóskandi ella í ov vánaligum standi. Aðrir eru til nýggj búpláss, umlættingarpláss og frítíðartilboð.

Tvær størri byggiverkætlanir eru lidnar og virksemið byrjað. Talan er um Sambýlið á Mýrini í Hoyvík til fólk við menningartarni, og heimið, umlættingina og frítíðartilboðið í Kvíggjartúni á Argjum til børn og ung við autismu.

Sambýlið í Reynstúni er liðugt bygt, og búfólkini flyta inn eftir summarfrítíðina.
Í løtuni eru tvær nýggjar byggiverkætlanir í gongd. Onnur verkætlanin er í Tórshavnar kommunu til 24 vaksin fólk við autismu, hin verkætlanin er í Vága kommunu til 18 fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum.

**Heimarøkt og eldratænasta**
Landsstýriskvinnan í almannamálum er saman við Kommunufelagnum farin undir at kanna, hvussu eftirlitið á eldraøkinum skal skipast. Ætlanin er at endurskoða kunngerðina um samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum. Hetta arbeiðið verður eisini gjørt saman við Kommunufelagnum.

Harafturat er neyðugt at finna semjur við kommunurnar um, hvussu landið og kommunurnar betur samstarva um eldraøkið og fólk, sum hava tørv á røkt, men ikki eru pensjónistar enn, eitt nú persónar yngri enn 67 ár við sjúkum, sum standa við og versna, og um tey, sum eru eldri enn 67 ár, sum búgva hjá og fáa tænastur frá Almannaverkinum.

**Javnstøða**
Landsstýriskvinnan í javnstøðumálum hevur fyrst í árinum havt fundir við øll landsstýrisfólkini um í felag at menna eina javnstøðuætlan fyri Føroya landsstýri.

Javnstøðulógin, ið hevur 30 ár á baki, verður endurskoðað, og í hesum sambandi hevur Fróðskaparsetur Føroya gjørt eina víðfevnda kanning um javnstøðuna í Føroyum. Kanningin er gjørd fyri Almanna- og mentamálaráðið, Javnstøðunevndina og Demokratia. Harafturat hevur Hagstova Føroya, við fígging frá Almanna- og mentamáláráðnum, gjørt fyrireikandi arbeiði at menna hagtøl eftir altjóða leisti um javnstøðu og kyn.

Eftir tilmæli frá Hagstovuni hevur Almanna- og mentamálaráðið fyrireikað uppskot til, hvussu innsavnan av sosialum hagtølum kann bøta um tørvin á bæði sosialum hagtølum og hagtølum viðvíkjandi javnstøðu og kyn.

**Heildarætlan um harðskap í parlagi og øðrum nærsambondum 2023–2028**
Landsstýriskvinnan fekk í august 2023 handað nýggju heildarætlanina um harðskap í parlagi og øðrum nærsambondum fyri árini 2023–2028. Nýggja heildarætlanin hevur 20 nýggj átøk, flestu teirra snúgva seg um at menna og styrkja tey tilboðini, sum longu eru, og fleiri eru longu sett í verk.

Tvey átøk bróta burtur úr nýggjum. Tað fyrra snýr seg um at seta eina hjálparlinju á stovn fyri harðskapsrakt, avvarðandi og yrkisfólk – umframt til tey, ið fremja harðskap. Seinna átakið er at skipa ein vitanardepil við einum fulltíðarstarvi aftrat í Kvinnuhúsinum. Høvuðsendamálið við vitanardepilinum er at savna, menna og føroyska tilfar, ið hevur við harðskapsøkið og harðskaps-yrkisføri at gera, herímillum eisini undirvísingartilfar.

Heildarætlanin fyri 2023–2028 verður løgd fyri Løgtingið til aðalorðaskifti eftir ólavsøku.

*Mentamál*

**Kringvarp Føroya**
Ein sterkur public service stovnur er ein grundarsteinur undir fólkaræðinum. Neyðugt hevur tí verið at styrkja Kringvarp Føroya og at framtíðartryggja virksemið á stovninum. Løgtingið samtykti tí á vári 2024 uppskot frá landsstýriskvinnuni um hækking og prístalsjavning av kringvarpsgjaldinum fyri persónar, samstundis sum smærri virki og stovnar fáa ein lætta.

Hækkingin av gjaldinum fer at styrkja Kringvarp Føroya, eitt nú tøkniliga, fakliga og málsliga, meðan prístalsjavningin kann vera við til at framtíðartryggja virksemið á stovninum.

Eftir umrøðu í Løgtinginum fyrr í ár hava landsstýriskvinnan og stýrið fyri Kringvarp Føroya eisini undirritað nýggjan public service sáttmála fyri árini 2024–2028.

**Miðlastuðulin**
Privatu miðlarnir skulu styrkjast. Arbeitt verður tí við at endurskoða verandi skipan. Vónandi ber til at broyta skipanina, so at hon verður greiðari at umsita, samstundis sum miðlarnir gerast sterkari.

Miðlastuðulin er í 2024 øktur við nærum triðingi av upprunaligu játtanini, ið annars hevur staðið í stað øll árini frammanundan.

**Føroyska málið**
Frágreiðing um løgtingslóg um málráð bleiv handað landsstýriskvinnuni í vár, og frágreiðingin verður løgd fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis í august. Frágreiðingin og Málráðið eru týðandi liðir í at verja og menna føroyska málið. Í tí sambandi kann eisini nevnast, at Føroyar í vár fingu sína fyrstu løggildu stavsetingarorðabók, ið er at finna á heimasíðuni hjá Málráðnum.

**Tjóðleikhúsið**
Kappingin um staðseting og arkitektakappingin hava verið, og Tjóðleikhúsið er partur av heildarætlan hjá kommununi fyri økið á Bursatanga. Eftir ætlan verður ein verklags- og heimildarlóg løgd fyri Løgtingið í heyst, har Løgtingið setur ávísa upphædd av til verklagið, samstundis sum landsstýriskvinnan fær heimild at taka ímóti fígging frá útlendskum grunnum. Landsverk hevur gjørt ein faldara, ið skal brúkast í sambandi við umsóknir um uttanhýsis fígging.

**Eftirløn til listafólk**
Arbeitt verður við at tryggja føroyskum listafólkum betri eftirlønarviðurskifti. Tryggjast skal, at tey, ið fáa listafólkaløn og starvsløn sambært kunngerð um Mentanargrunn Landsins, frá komandi ári eisini fáa eftirløn.

**Nýggja bókasavnslógin**
Úrslitini av nýggju bókasavnslógini, sum kom í gildi tann 1. juni í fjør, byrja nú at síggjast. Størsta frambrotið er, at føroyskar ljóðbøkur nú eru til láns á heimasíðunum hjá bókasøvnunum. Eisini hevur nýggja bókasavnslógin við sær, at ljóðbøkur, sum Ljóðbókatænastan hevur framleitt til blind og sjónveik, kunnu verða seldar forløgum við útgávu til almenningin fyri eyga.

Sambært nýggju bókasavnslógini skulu øll hava atgongd til bókasavnstænastur. Arbeitt verður tí við at fáa gjørt avtalur við størru fólkabókasøvnini um at veita bókasavnstænastur til kommunur, har einki fólkabókasavn er, ella har fólkabókasavnið ikki hevur starvsfólk við bókasavnsfakligari útbúgving í starvi.

Arbeiðið við at tryggja blindum, sjónveikum og fólkum við skerdum lesiførleika víðkaða atgongd til ljóðbókatænasturnar heldur fram.

Landsbókasavnið er sambært nýggju bókasavnslógini eisini universitietsbókasavn. Universitetsbókasavnstænasturnar á Landsbókasavninum verða tí raðfestar.

Bókasavnsgjaldið, sum er gjald til føroyskar høvundar fyri, at bøkur teirra eru til taks á føroysku bókasøvnunum, er somuleiðis raðfest. Raðfestingin er ætlað til bókasavnsgjald fyri ljóðbøkur, e-bøkur og annað tilfar.

**Koltursætlanin av bakkastokki**
Tjóðsavnið hevur fingið góðar 60 mió. kr. í fígging til Koltursætlanina. Í Koltursætlanini verður oyggin býtt upp, so at norðari parturin fær frið fyri seyði, og fyri at upprunavøksturin kann koma fyri seg. Í sunnara parti verður býlingurin Norðuri í Gerði endurskaptur við sethúsum, bátasmiðju,

framsýningum og verkstøðum. Løgmaður boðaði í 2013 frá, at Koltur varð tikið úr landbúnaðarskipanini, og at ein antikvarisk serskipan skuldi gerast fyri oynna. Til arbeiðið at menna antikvarisku serskipanina, nevnd Koltursætlanin, eru játtaðar 5 mió. kr. úr Búnaðargrunninum.

**Goymsluviðurskifti á Tjóðsavninum**
Løgtingsins fíggjarnevnd samtykti í juli í ár at veita Tjóðsavninum 1,4 mió. kr. í eykajáttan til at fara undir bráðneyðug tiltøk í sambandi við at ógvusligur blámusoppur er staðfestur í goymsluni hjá Tjóðsavninum í Brekkutúni 6 í Hoyvík.

**Íløgur í ítróttin**
Løgtingið samtykti í fjør uppskot frá landsstýriskvinnuni um at stuðla verkætlanini at gera stórhøll í Hoyvík. Høllin hevur fingið navnið Við Tjarnir og verður væntandi klár at taka í nýtslu síðst í januar 2025. Stórhøllin fer eitt nú at tryggja, at Føroyar kunnu spæla sínar heimadystir í hondbólti heima í Føroyum.

Eisini samtykti Løgtingið uppskot frá landsstýriskvinnuni um at stuðla Oyggjaleikunum í Føroyum í 2027.

**Oyggjaleikirnir 2027**
Føroyar skulu vera vertstjóð fyri Oyggjaleikirnar í 2027. Upprunaliga skuldu leikirnir ikki vera í Føroyum fyrr enn í 2031, men av tí, at Ynis Môn bar seg undan at hýsa leikunum í 2027, fekk ÍSF tilboð um at hýsa leikunum í staðin. Og ÍSF valdi at taka av møguleikanum. Løgtingið hevur tí á vári 2024 samtykt eitt uppskot frá landsstýriskvinnuni, sum heimilar landsstýrisfólkinum at stuðla fyrireikingunum av Oyggjaleikunum 2027 við upp til 15 mió. kr.

Seinast, Føroyar vóru vertir fyri oyggjaleikunum, var í 1989, og hetta er bert aðru ferð, at Føroyar skulu vera vertstjóð.

**Listasavn Føroya**
Arbeitt verður við einari loysn at umvæla, útbyggja og nútímansgera alt Listasavnið, so at hølisumstøðurnar verða dagførdar og neyðugu ábøturnar gjørdar. Tilsøgn um tilsamans góðar 40 mió. kr. í fígging er fingin til vega frá ymiskum útlendskum grunnum. Aftrat hesum fer landið væntandi at stuðla við 17 mió. kr. Hetta er á hædd við størstu einstøku stuðulsupphæddirnar frá útlendsku grunnunum.

**Listprýði**
Arbeitt verður við at gera eitt rundskriv um listprýði í byggiverkætlanum hjá landinum, og á tann hátt verður tryggjað listini innivist, tá ið landið fer undir byggiverkætlanir.

**Fólkakirkjan**
Sambært lógarbroytingini um fólkakirkjuna frá 2023, sum heimilaði landsstýrisfólkinum at býta embætisuppgávurnar millum tveir próstar, hevur landsstýriskvinnan fyrr í ár sett ein próst aftrat. Embætisuppgávurnar eru býttar upp, og nýggi prósturin skal taka sær av strategisku málunum og skal eisini menna talgildar mannagongdir fyri fólkakirkjuna. Nýggi prósturin skal harafturat hava eftirlit við kirkjubókunum. Royndirnar við nýggju skipanini hava higartil verið góðar.

Tveir serprestar – ein diakonprestur og ein studentaprestur – vórðu í heyst settir í tíðaravmarkað størv í føroysku fólkakirkjuni. Royndirnar hava higartil verið góðar, men enn er ov tíðliga at gera nakrar endaligar niðurstøður, tí talan er um nýbrot í føroyskum høpi.

Biskupur tók undir við uppskotinum hjá landsstýriskvinnuni um at skipa eitt serprestaembæti sum integratiónsprestur í Føroyum. Uppskotið hjá landsstýriskvinnuni var grundað á eina royndarætlan, sum biskupur tók stig til í árunum 2021–2022. Øll formligu viðurskiftini kring setanina eru greidd, og embætið verður væntandi sett innan heilt stutta tíð.

Arbeitt verður við nýggjari kunngerð um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk í fólkakirkjuni í Føroyum.

Tvær kirkjubyggingar verða fyrireikaðar í løtuni – á Glyvrum og á Argjum.

**Mentanarstuðulin umsitast við armslongd**
Í samgonguskjalinum stendur, at filmsstuðulin skal umsitast sambært armslongdarmeginregluni. Armslongdarmeginreglan merkir, at tað ikki er landsstýrisfólkið sjálvt, ella politiska skipanin annars, sum tekur avgerð um stuðulin, men serkøn fólk við serligari vitan og førleikum á ymisku økjunum – við støði í almennum reglum, sum politiska skipanin hevur ásett.

Endamálið við armslongdarmeginregluni er at tryggja, at avgerðir um stuðul ikki eru grundaðar á eitt nú politisk, átrúnaðarlig ella persónlig atlit, men á listarliga dygd ella onnur viðkomandi og saklig atlit. Byrjað verður við filmsstuðlinum, sum ætlandi verður fluttur úr stjórnarráðnum til eitt nú Mentanargrunn Landsins, men í longdini verður eisini hugt at øðrum stuðulsskipanum á mentanarøkinum. Í hesum sambandi verður neyðugt, við heimild í løgtingslóg um stuðul til mentan og list, at gera eina kunngerð um, hvussu stuðulsskipanirnar skulu umsitast.

Samsvarandi armslongdarmeginregluni er biograflógin í farna ári tikin av, og tí krevst ikki longur góðkenning frá landsstýrinum til at reka biograf ella til staksýningar.

**Mentanarátak í New York**
Á vári 2024 var Almanna- og mentamálaráðið saman við Uttanríkis- og vinnumálaráðnum og Visit Faroe Islands við til at skipa fyri einum væleydnaðum mentanarátaki í New York, har fitt av føroyskum listafólkum fingu ein pall í Scandinavia House á Park Avenue at sýna fram list, filmar, tónleik, sniðgeving, gastronomi og bókmentir.

**Ókeypis atgongd til orðabøkur**
Avtalan við Sprotan, sum tryggjar øllum føroyingum atgongd til nógv brúktu orðabøkurnar hjá Sprotanum og Orðabókagrunninum, er dagførd, og rættindini til orðabøkurnar eru í avtalu millum Almanna- og mentamálaráðið og Sprotan tryggjað, so at tey ikki kunna avhendast øðrum enn landinum, um Sprotin ella Orðabókagrunnurin skuldu gjørt av at steðga virkseminum.

## FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁL

*Fiskivinnumál*

**Gýtingarfriðingar**
Støðan hjá toskastovninum hevur sambært Havstovuni ongantíð áður verið so vánalig sum nú, og gýtingarstovnurin er komin niður um ásetta minstamátið, sokallaða Blim. Í tilmælinum um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa mælti Havstovan til ein niðurskurð í fiskidøgunum fyri 2024. Harumframt mælti Havstovan til onnur tiltøk fyri at verja toskastovnin. Eitt avgerandi tiltak er at leingja gýtingarfriðingarnar, soleiðis at tær byrja fyrr og enda seinni. Samsvarandi hesum tilmæli varð kunngerðin um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum broytt, so at á teimum leiðum, har toskur gýtir, verður stongt fyrr og latið seinni upp aftur.

**Fiskidagatal á landgrunninum og umsitingarætlan**
Sambært sjófeingislógini skal landsstýrismaðurin áseta fiskidagatalið eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu, sum hevur meginreglur fyri burðardygga stovnsrøkt.

Í 2021, 2022 og 2023 var dagatalið sett eftir eini umsitingarætlan, sum ein arbeiðsbólkur legði lunnar undir í mai 2019, og sum landsstýrið seinni tók undir við. Umsitingarætlanin skal stuðla undir burðardyggan fiskiskap eftir toski, hýsu og upsa, og at vinnan í rímiliga tíð frameftir veit, hvørjir fiskimøguleikarnir vera.

Henda umsitingarætlan og veiðiregla skuldi eftirmetast triðja hvørt ár og í seinast lagi, áðrenn fiskidagar vórðu ásettir fyri 2024. Niðurstøðan í eftirmetingini var, at neyðugt er at broyta veiði-reglunaa, so hon betur leggur upp fyri støðum, har stovnar á landgrunninum eru illa fyri.

Stovnsmetingarnar vístu, at toskastovnurin á landgrunninum var niðan fyri ásetta vandamarkið. Tí var – samsvarandi nýggju veiðiregluni – fiskidagatalið hjá bólki 3 – 5 skert 20 prosent og fiskidagatalið hjá bólki 2 skert 10 prosent. Endurskoðaða veiðireglan er í fyrsta umfari bert galdandi fyri áseting av fiskidøgum í 2024. Hon skal eftirmetast, áðrenn fiskidagar verða ásettir fyri fiskiárið 2025. Tað arbeiðið verður skipað í einum bólki við umboðum fyri veiðibólkar í fiskidagaskipanini og við fólki frá Havstovuni, Vørn og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum.

**Fiskiskapur á Føroyabanka**

Føroyabanki var í nógv ár friðaður fyri nærum allari veiðu. Í 2022 varð varisliga latið upp fyri vinnuligum fiskiskapi við eini tíðaravmarkaðari serskipan. Í 2023 var eisini ein serskipan, har línuskip og útróðrarbátar kundu royna í avmarkað dagatal. Skipanin var nakað broytt sammett við 2022. Útróðrarbátarnir fingu lutfalsliga fleiri fiskidagar, og línuskipini fingu lutfalsliga færri dagar. Harafturat varð skipanin hjá útróðrarbátunum undir 15 tons broytt soleiðis, at bátarnir fiskaðu undir eini skipan við felags fiskidøgum við hámarki fyri hvønn bátin. Skipanin í 2024 er tann sama sum í 2023, tó so, at býtið av fiskidøgum millum bólkarnir er broytt nakað, so útróðrarbátarnir fáa fleiri dagar og línuskipini færri dagar.

**Brúksskylda**

Broytingarnar í sjófeingislógini um brúkstreyt fyri at avhenda veiðirættindi og í brúksskylduni, sum Løgtingið samtykti í desember 2023, fáa virknað í 2025.

Fyri at kunna avhenda egnar fiskidagar ella egnar kvotur í 2025 skulu í minsta lagi 60 prosent vera brúkt í 2024, tó undantikið makrelur. Harafturat fær ásetingin um generella brúksskyldu á loyvi, ið landið letur at reka vinnuligan fiskiskap, týdning í 2025. Hetta ber í sær, at hevur fiskifar við veiðiloyvi ikki verið til vinnuligan fiskiskap í tvey ár á rað, falla øll veiðirættindini hjá skipinum aftur til landið. Sama fiskifar kann hava fleiri fiskiloyvi til ymiskan fiskiskap. Er ávíst fiskiloyvi ikki brúkt í tvey ár á rað, fellur rætturin til hetta fiskiloyvið aftur til landið. Tíðarskeiðið fyri uppgerð av nýtslu av brúksskylduni byrjaði 1. januar 2023. Tað merkir, at við ársbyrjan 2025 verður kannað eftir, um brúksskyldan er hildin. Vísir tað seg t.d., at fiskifarið als ikki hevur avreitt í 2023 og 2024, falla øll veiðirættindini hjá fiskifarinum aftur til landið.

Fiskiloyvi og veiðirættindi hjá útróðrarbátum undir 15 tons eru undantikin brúksskyldu.

**Rættindahavarar í uppsjóvarvinnuni javnsetast**

Samgongan hevur sett sær fyri, at aktørarnir í uppsjóvarvinnuni skulu javnsetast, tá ið føroysku kvoturnar minka ella vaksa.

Í verandi skipan hava árligu nøgdirnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild at býta millum rættindahavarar ymiskan uppruna. Vit hava egnar kvotur, ið stava frá nøgdum, sum upprunaliga eru settar av til menningarkvotur ella til vinnuligar royndir og verkætlanir. Vit hava eginrættindi, sum eru keypt á uppboði í 2018 og í 2019. Og vit hava egnar kvotur, sum verða latnar søguligu rættindahavarunum.

Eftir sjófeingislógini verða árligu nøgdirnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild ikki ásettar eftir somu grundreglum.

Ætlanin er í heyst at leggja lógarbroytingar fyri Løgtingið, soleiðis at allir rættindahavarar í uppsjóvarvinnuni eru javnsettir og eru undir somu treytum í lógini.

Umframt javnseting verður við ætlaðu broytingunum miðað eftir samstundis at stuðla undir, at skipanin við útluting av uppsjóvarkvotum verður einfaldari, gjøgnumskygdari og lættari at umsita.

**Virðisvøkstur í fiskivinnuni**

Virðisøking í fiskivinnuni er ein av týðandi táttunum í fiskivinnupolitikkinum hjá samgonguni, og í samsvari við samgonguskjalið er gongd sett á arbeiðið at eggja vinnuni til at nýskapa, virðisøkja og meirvirka tilfeingið. Umframt at varpa ljós á nýskapan og virðisøking fevnir ítøkiliga arbeiðið m.a. eisini um eftirmeting av skipanini av fiskivinnuroyndum og fiskivinnugransking, samstundis sum nýggjar skipanir fyri gransking og menning í fiskivinnuni verða raðfestar og skipaðar.

Ein týðandi liður í at skapa møguleikar fyri øktari virðisøking av tilfeinginum er at seta krav um, at alt skal til lands. Kunngerð, sum áleggur, at alt lívfrøðiligt tilfar frá veiðu í føroyskum sjógvi skal fáast til høldar og avreiðast, verður lýst í næstum. Fram til 2030 økist prosentparturin av lívfrøðiliga tilfarinum, sum skal takast í land, og í 2030 er kravið, at alt verður tikið í land.

Orsøkin til stigvísu skipanina er at geva flotanum høvi at laga seg eftir nýggju krøvunum. Soleiðis sum kunngerðin er orðað, lúka flestu skip ásettu krøvini fyrsta tíðarskeiðið, men so hvørt prosentparturin økist, verður neyðugt við tillagingum umborð á skipum og bátum, so gjørligt er at goyma og føra alt til lands.

**Gransking og fiskivinnuroyndir**

Gransking og menning av veiðu og matvøruframleiðslu hevur stóran týdning fyri kappingarførið hjá fiskivinnuni. Ítøkiligar kvotur eru latnar í skipanunum “vinnuligar fiskiroyndir” og “vinnuligar royndir og verkætlanir”. Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið fylgir hesum ætlanum. Í skipanini við

royndarfiskiskapi eru latnar tilsagnir til royndarloyvi eftir reyðæti og tunfiski. Hóast nakað av tíð er fráliðin, síðan tilsagnirnar vórðu latnar, eru bert smærri royndir gjørdar eftir reyðæti, og eingin royndarfiskiskapur hevur verið eftir tunfiski.

Nýggjastu tilsagnirnar til royndarfiskiskap eru latnar til royndir eftir makrelgeddu. Einstøk skip hava verið til royndarfiskiskap, men enn eru veiðinøgdirnar avmarkaðar.

Fiskiskapurin eftir brislingi og fjarðarsild, stinglaksi og partvíst eisini eftir jákupsskel hava verið skipaðir sum royndarfiskiskapur. Ætlanin er at skipa hesar fiskiskapir við vanligum fiskiloyvi frá 2025 at rokna.

Gransking um fiskastovnar, havumhvørvi og fiskiskap á og kring Landgrunnin skal uppraðfestast, soleiðis at vit betur skilja, hvussu vistskipanirnar virka og samvirka, undir hesum eisini hvussu veðurlagsbroytingar ávirka vistskipanirnar. Eisini er av týdningi at kanna ávirkan av laksaaling á upsa og vistskipanina á føroyska Landgrunninum sum heild.

**Fiskiveiðisamráðingar**

Stórar avbjóðingar hava verið seinastu árini við samráðingunum millum strandarlondini um uppsjóvarfiskasløgini svartkjaft, norðhavssild og makrel. Nú londini hava tøkar dagførdar vísindaligar útbreiðslufrágreiðingar um allar tríggjar stovnarnar, eru ítøkiligar samráðingar millum londini um at býta stovnarnar.

Í juni 2024 gjørdu Føroyar, Bretland og Noreg semju um at býta makrelstovnin. Vónin er, at tað fer at eydnast at fáa hini strandarlondini við í semjuna. Samráðingarnar um svartkjaft og norðhavssild halda fram. Tó eru eru samráðingarnar um norðhavssild komnar nærri eini loysn.

Í 2023 hava Føroyar undirritað fiskiveiðiavtalu við Bretland, Grønland, Ísland, Noreg og Russland. Harumframt hava Føroyar eisini veiðirættindi í NAFO-øki, í NEAFC-øki og í SPRFMO-øki.

Síðani Bretland fór úr ES og gjørdist sjálvstøðugt strandarland, hevur ikki eydnast at finna semju um fiskivinnusamstarv ímillum Føroyar og ES, ið báðir partar kunnu góðtaka. Føroyar og ES hava tó umrøtt støðuna, og tykist vilji at vera frá báðum síðum at byrja samstarvið av nýggjum.

Í 2022 samdust Føroyar og Grønland um at fara undir at dagføra karmsáttmálan millum londini, sum er frá 1997. Í februar 2024 hitti landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum sín starvsbróður í Grønlandi. Teir fegnaðust um, at sínámillum fiskiveiðiavtalan er ment munandi seinastu árini. Eisini varð avrátt at seta ferð á at dagføra karmsáttmálan. Fundir á embætisstigi hava

verið á talgildum palli í 2024, og ætlanin er, at nýggi rammusáttmálin verður liðugt orðaður og klárur at undirrita og leggja fyri Løgtingið á heysti 2024.

Fiskiveiðisamstarvið við Russland fekk drúgva umrøðu í 2023 bæði í landsstýrinum og eisini í Løgtingsins uttanlandsnevnd. Úrslitið varð, at ein fiskiveiðiavtala varð gjørd við Russland fyri 2024. Avtalan var nakað minni í vavi enn undanfarna avtala, og avtalan hevði við sær skerdar møguleikar hjá russiskum skipum í føroyskum sjógvi. Russisk skip hava ikki longur rætt at fiska í serøkinum millum Føroyar og Bretland. Eisini eru møguleikarnir hjá russiskum skipum at brúka føroyskar havnir avmarkaðir til tað virksemi, sum er beinleiðis knýtt at fiskiveiðiavtaluni. Hetta seinasta hevur støði í lóggávuni um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina.

**Hvala- og grindamál**

Hvalateljingar verða aftur í Norðuratlantshavi á sumri í 2024. Hesar hvalateljingar, sum NAMMCO skipar fyri, eru regluliga umleið 5. – 7. hvørt ár. Seinastu teljingarnar vóru í 2015. Havstovan samskipar føroysku luttøkuna. Rannsóknarskipið Jákup Sverri fer sum partur av makrelkanningunum at gera hvalateljingar, og eisini verður eitt skip leigað til endamálið. Hvalateljingar eru grundarlagið undir vísindaliga arbeiðinum við stovnsmeting av grind og øðrum hvalasløgum.

Í 2022 varð ein fyribils kvotuáseting ásett fyri at gagnnýta springarar. Loyvt er at taka 500 springarar um árið, og hetta er galdandi í tvey ár. Frá 2024 verður veiðan ásett eftir tilmæli frá NAMMCO um burðardygga veiðu.

**Fiskiveiðieftirlit**

Vørn hevur eftirlit við føroyskum og útlendskum fiskiskipum í føroyskum sjógvi og føroyskum fiskiskipum, sum fiska uttan fyri føroyskan sjógv. Stovnurin hevur somuleiðis eftirlit í føroyskum havnum við landingum og umskipingum.

Í 2023 var játtanin til Vørn hækkað við tveimum milliónum krónum til at styrkja fiskiveiðieftirlitið. Royndirnar við eygleiðarum hava hilnast væl. Frá at hava leigað eygleiðarar inni í einstøkum førum á Flemish Cap, hevur Vørn í dag tveir eygleiðarar í føstum starvi. Hetta hevur eisini givið Vørn munandi størri møguleikar at brúka eygleiðarar umborð á fiskiskipum, sum royna í føroyskum sjógvi. At eftirlitið eisini er økt úr fýra upp í seks starvsfólk hevur ført við sær, at eftirlitið við umskipingum av millum annað russiskum fiskiførum og landingum í føroyskum havnum er økt munandi.

Skipini Tjaldrið og Brimil, ið Vørn hevur til tilbúgvingar- og eftirlitsvirksemi, eru ávikavist 49 og 25 ára gomul í 2025. Aldurin setur støðugt økt krøv til viðlíkahald og umvælingar. Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa til vega eitt nýtt skip fyri Tjaldrið, ið er gamalt og ótíðarhóskandi. Arbeitt verður við at fyrireika málið.

**Veðurtænasta**
Veðurstova Føroya er í eini menningartilgongd fram ímóti nøktandi tænastum, starvsfólkahópi, mátiskipan og undirstøðukervi. Sum frá líður kann virksemið hjá Veðurstovu Føroya eisini gerast partur av gransking um veðurlagsøkið.

Veðurtíðindi verða nú miðlað út bæði í útvarpi og sjónvarpi. DMI ger framvegis veðurforsagnir um vikuskiftið og eftir arbeiðstíð. Játtanin til Veðurstovuna varð hækkað við 750.000 kr. við tí endamáli at yvirtaka henda partin, sum væntandi verður liðugur um ársskiftið 2024/25.

*Samferðslumál*

**Landsins bygningar**
Viðlíkahald av landsins bygningum verður raðfest. Játtanin til at halda viðlíka og umvæla landsins bygningar er hækkað frá 2023 til 2024 og verður eftir ætlan eisini hækkað í 2025 og 2026.

**Grønar orkuloysnir**
Meginparturin av landsins bygningum verður hitaður við olju, og orkunýtslan er ov stór. Ætlanin er, at bygningar landsins í størri mun brúka varandi orku. Peningur er játtaður til grønar orkuloysnir, og arbeitt verður eftir eini ætlan fyri økið, sum verður dagførd eftir tørvi. Málsøkið verður raðfest, og eftir ætlan verða játtanirnar hækkaðar næstu árini til at leggja um til grøna orku í landsins bygningum.

**Samferðsluætlan fyri 2024–2036**
Verandi samferðsluætlan er fyri tíðarskeiðið 2018–2030. Arbeitt verður við at dagføra samferðsluætlanina, sum verður fyri tíðarskeiðið 2024–2036. Endamálið er, at politiska skipanin skal hava gott fakligt grundarlag fyri at kunna taka støðu til, hvørjar íløgur skulu gerast næstu árini.

**Asfaltering**
Ein partur av vegakervinum er ikki í nóg góðum standi. Asfaltering av landsvegum er raðfest, og 12 mió. kr. eru játtaðar til asfaltering í 2024 og eftir ætlan eisini næstu árini.

**Tunlar Norður um Fjall**
Arbeiðið við at gera tunlarnar Norður um Fjall gongur skjótt og væl. Verkætlanin verður eftir ætlan liðug í ár.

**Fámjinstunnilin**
Farið varð undir at bora Fámjinstunnilin í 2022. Talan er um eina sera avbjóðandi tunnilsverkætlan. Eftir ætlan verður nýggja farleiðin liðug í apríl 2025.

**Tunnil til Dals**
Farið varð undir at bora Dalstunnilin á vári 2019. Gongur sum ætlað, verður koyrandi til Dals tíðliga í 2025.

**Tunnil til Tjørnuvíkar**
Ein partur av játtanini til Tjørnuvíkarfarleiðina verður brúkt til at fyrireika tunnil til Tjørnuvíkar. Allar fyrireikingar verða gjørdar lidnar í ár, so at farast kann undir at gera tunnilin í 2025, um játtan verður til endamálið.

**Endurnýggjan av strandferðsluflotanum**
Ein av raðfestingunum hjá landsstýrinum er, at strandferðsluflotin skal endurnýggjast sum skjótast. Farið er undir at gera forkanningar, skitsur og aðrar fyrireikingar. Síðan verður farið undir at prosjektera. Um nóg stór játtan fæst til endamálið, verður arbeiðið boðið út, og síðani kann nýbyggingin byrja í stigum.

Føroysk skipasmiðja hevur fingið arbeiðið at prosjektera tvær nýggjar ferjur – ferju til Kalsoyarleiðina og ferju til Fugloyar- og Svínoyarleiðina. Ætlanin er at byggja Kalsoyarferjuna fyrst og síðan ferjuna til Fugloyar- og Svínoyarleiðina.

**Suðuroyarleiðin**
Tað er sera umráðandi at tryggja, at gott samband er á Suðuroyarleiðini, meðan ein møguligur Suðuroyartunnilin verður fyrireikaður og bygdur. Ein verkætlan, sum væntandi tekur eini 10 ár.

Smyril, sum er einasta farleiðin millum Suðuroynna og meginøkið, er 19 ára gamal, og tað standa fleiri stórar og kostnaðarmiklar umvælingar fyri framman næstu árini, fyri at Smyril skal kunna røkja farleiðina nøktandi.

Ein møguleiki at tryggja Suðuroyarleiðina er at keypa eitt skip afturat, sum kann røkja leiðina saman við Smyrli. Hetta hevði havt við sær minni slit á Smyril. Eisini hevði tað verið lættari at gjørt umvælingar, eins og dagføringarnar ikki høvdu verið eins kostnaðarmiklar, sum tá ið Strandferðslan bara hevur eitt skip á Suðuroyarleiðini. Hartil slepst eisini undan at leiga avloysaraskip.

**Broyttur prísbygnaður - javnseting av ferðaseðlakostnaðinum**
Arbeitt verður við at endurskoða prísskipanina hjá Strandferðsluni fyri at javnseta fólk í ymsu pørtunum í landinum. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt í heyst.

**Skaðanevnd**
Landsstýrið hevur raðfest, at ein skaðanevnd verður sett á stovn. Endamálið við einari skaðanevnd er at kanna og varpa ljós á møguligar orsøkir til, hví ferðsluvanlukkur henda, og á henda hátt vera við til at fyribyrgja aðrar ferðsluvanlukkur.

## HEILSUMÁL

**Yvirskipaðar ætlanir fyri heilsuøkið**
Nýggjur heilsupolitikkur skal orðast við yvirskipaðum ætlanum fyri heilsuøkið, har langtíðarætlanir verða lagdar við ítøkiligum málum og visjónum. Fólkaheilsuætlanin er eisini partur av hesum sum eitt av átøkunum. Eitt upplegg er orðað, har tað verður lýst, hvussu onnur Norðurlond hava gjørt heilsupolitikk. Eftir summarferiuna verður farið undir næsta stig.

**Serlæknaætlan fyri heilsuverkið**
Serlæknaætlanin “Tørvurin á serlæknum í føroyska heilsuverkinum” varð handað landsstýriskvinnuni í juni. Serlæknaætlanin verður eitt amboð hjá bæði politiska myndugleikanum og heilsuverkinum, tá ið støða skal takast til, hvar tørvur er á raðfestingum í heilsuverkinum. Ætlanin gevur eisini ábendingar um starvsmøguleikar í føroyska heilsuverkinum hjá teimum, sum antin eru farin undir læknaútbúgving ella umhugsa at fara undir víðari lesnað.

**Heilsutænastur í nærumhvørvinum**
Arbeitt verður í løtuni við eini ætlan at kunna veita borgarum enn fleiri tilboð um heilsutænastur í nærumhvørvinum. Í hesum sambandi verður eitt lógaruppskot orðað, sum eftir ætlan verður lagt fram í Løgtinginum í heyst.

Nýskipanin skal fremjast saman við kommununum fyri at tryggja sama tænastustig um alt landið og fyri allar borgarar. Vit skulu í felag tryggja, at borgarar fáa samanhangandi viðgerðargongd, og samstarvið millum ymisku geirarnar – heilsuverkið, almannaverkið og eldrarøktina – verður styrkt. Fakligur stjóri er settur at gera uppskot til skipan og bygnað.

**Verkseta átøk í krabbameinsætlanini**
Eitt tvørfakligt krabbameinsráð er sett, sum m.a. skal ráðgeva, hvussu tilmælini í krabbameins-ætlanini frá 2022 verða sett í verk. Krabbameinsráðið hevur sum tað fyrsta raðfest fýra tilmæli í Krabbameinsætlanini, sum Sjúkrahúsverkið hevur fingið boð um at seta í verk.

Játtan er sett av til krabbameinsátøk í 2023 og 2024. Arbeitt verður áhaldandi við at seta tilmælini í verk. Í løtuni verður m.a. arbeitt við at seta eina screeningseind og nýggja ávísingar- og útgrein-ingarskipan í verk.

Í næstum fer ein arbeiðsbólkur at koma við tilmæli um, hvussu tarmscreening skal skipast í Før-oyum. Harumframt eru serlæknar settir til at taka sær av palliativa økinum í Sjúkrahúsverkinum.

**Nýggja THS-skipan**
Veitarin av talgildu heilsuskipanini (THS) hevur sagt avtaluna upp, so neyðugt er at fáa nýggja skipan til vega, sum kann takast í nýtslu innan fyri nøkur ár (2028).

Stýrisbólkur er settur við umboðum úr Heilsumálaráðnum, Sjúkrahúsverkinum, Apoteksverkinum, Heilsutrygd, Gjaldstovuni og Kommunufelagnum.

Ein verkætlanarbólkur verður settur at gera uppskot til kravfesting. Játtaðar eru 4 mió. kr. á fíggjar-lógini 2024. Forstjórin í Sjúkrahúsverkinum hevur dagligu ábyrgdina av verkætlanini. Tá ið kravfestingararbeiðið er liðugt, er næsta stigið útbjóðing av arbeiðinum at veita skipanina.

Í hesum árinum verður ein frágreiðing gjørd, ið m.a. lýsir viðurskifti av týdningi fyri kravfestingar-arbeiðið. Eftir hetta kann sjálv kravfestingin byrjað. Hon verður gjørd í samráð við viðkomandi partar í Føroyum. Eftir tað verður skipanin boðin út.

**Roykilógin skal dagførast og átøk at minka tubbak- og nikotinnýtsluna setast í verk**
Heilsustýrið gjørdi seinasta heyst eina kanning, “Hvussu hevur tú tað?” Henda kanningin vísti, at føroyingar roykja nógv meira enn aðrir norðurlendingar.

Aðalmálið við at dagføra lóggávuna og at skipa fyri átøkum á økinum er at tryggja øllum rættin at liva og virka í roykfríum umhvørvi og at víðka rásarúmið hjá teimum, sum ikki roykja. Tað verður

serliga hugsað um børnini og tey ungu. Endamálið er at betra fólkaheilsuna við at minka heilsuskaðar og andlát vegna royking og at minka nikotinnýtsluna.

Arbeiðið við at dagføra lóggávuna tekur støði í galdandi roykilóg, tubbakssáttmálanum hjá WHO og tubbaksdirektivinum hjá ES.

Arbeitt verður eisini við at skipa fyribyrgjandi tiltøk, so fólk ikki fara at roykja. Málið er, at árgangirnir hjá teimum sum eru fødd eftir 2010 eru roykfríir og ikki nýta aðrar tubbaks- ella nikotinvørur.

Harumframt verður eisini arbeitt við tilboðum um stuðul at leggja av til tey, ið vilja gevast at roykja ella brúka aðrar nikotin- og tubbaksvørur.

Lógaruppskotið verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið í hesari tingsetuni.

**Antibiotikapolitikkur**
Avbjóðingar eru av, at fleiri antibiotikabólkar, sum verða fyriskrivaðir at basa ígerðir, gerast minni virknir, tí bakteriur gerast alsamt meira mótstøðuførar. Ein sannroynd er, at hóttanin av antibiotikamótstøðuføri er ein veruleiki, sum vit ikki kunna síggja burtur frá, og tí er tað av størsta týdningi, at vit her í Føroyum eisini taka ábyrgd og gera munandi átøk, soleiðis at avleiðingin verður sum minst fyri borgararnar.

Ein støðulýsing skal gerast av tilmælunum í “Virkisætlan fyri mótstøðuføri móti antibiotika í heilsuverkinum í Føroyum” frá 2018. Heilsumálaráðið skal saman við Sjúkrahúsverkinum gera uppskot til landsstýriskvinnuna um, hvørji tilmæli í virkisætlanini skulu raðfestast næst.

**Yvirtøka av landslæknaembætinum**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá føroyskum og donskum myndugleikum er settur at fyrireika yvirtøkuna av landslæknaembætinum. Fyrsti fundurin í arbeiðsbólkinum var í Føroyum í juni í ár. Miðað verður ímóti, at arbeiðsbólkurin verður liðugur við sítt arbeiði í desember 2024.

Arbeiðsbólkurin skal útgreina og lýsa hvat liggur í yvirtøkuni av Landslæknaembætinum, hvørji øki náttúruliga hoyra til yvirtøkuna, hvar markið gongur ímillum donsk og føroysk málsøki, og hvørjar fíggjarligar avleiðingar verða mettar at vera av yvirtøkuni. Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum verður síðan nýtt sum grundarlag hjá landsstýrinum at taka støðu til, hvørt málsøkini skulu yvirtakast.

**Universitetssjúkrahús**
Ein arbeiðsbólkur handaði álit um universitetssjúkrahús til landsstýriskvinnuna 13. september 2023. Landsstýriskvinnan hevur fylgt tilmælinum frá arbeiðsbólkinum og hevur sett 1,5 mió.kr. av á fíggjarlógini til at fyrireika Sjúkrahúsverkið til universitetssjúkrahús. Samstarvsavtala millum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið varð undirskrivað í juni í ár við tí endamálið at fyrireika Sjúkrahúsverkið til universitetssjúkrahús.

**Lógin um Apoteksverkið og heilivág skal dagførast**
Ein arbeiðsbólkur hevur endurskoðað Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág, sum er frá 1989. Uppskot til munandi broytingar eru gjørdar í lógini. Í uppskotinum verður lógarverkið býtt í tvær lógir, eina um bygnaðin í Apoteksverkinum og eina lóg um heilivág. Væntandi verða nýggju lógaruppskotini klár at leggja fyri Løgtingið í oktober.

## BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁL

**Barnaverkætlanin**
Aftan fyri Barnaverkætlanina liggur ein greið visjón um at betra barna- og ungdómsøkið í Føroyum. Verkætlanin tekur støði í ásannanini av, at vælferðin hjá børnum og ungum er avgerandi fyri eitt sunt og burðardygt samfelag. Verkætlanin miðar ímóti at stovna ein meira inkluderandi og stuðlandi karm fyri børn, ung og familjur teirra. Hetta fevnir um samskipað átøk, tillagingar av lóggávukørmum og nýggjar samstarvsleistir tvørtur um geirar. Við virknum íkasti frá einum breiðum skara av fakfólkum á økinum, áhugafelagsskapum og umboðum fyri Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Løgmálaráðið og Kommunufelagið kannar verkætlanin nýggjar mátar at styrkja tað góða barna- og ungdómslívið. Virksemið er samansett av fýra høvuðssporum við serligum undirliðum, sum tilsamans skulu tryggja, at ítøkiliga broytingartilgongdin verður framd sum ein heildarætlan. Tey fýra høvuðssporini eru hesi:
1) Vitanarmenning, 2) Royndarverkætlaninir, 3) Strategi og 4) Verkætlanarleiðsla og -skipan.

**Barnaverndarøkið**
Barnaverndarlógin er broytt, so øktir møguleikar eru at boða donskum barnaverndarmyndugleikum frá átaluverdum viðurskiftum hjá einum barni. Fyriskipanir kunnu nú setast í verk fyri foreldramyndugleikan, tá ið eitt barn er sett heiman. Barnaverndarnevndin kann avgera ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, eins og barnaverndarmál kunnu flytast til aðra barnaverndarnevnd at umsita. Arbeitt verður víðari við at víðka fosturforeldraskipanina við styrktum og serkønum fostur-

foreldrum, soleiðis at børn við størri avbjóðingum kunnu rúmast í einari fosturfamilju. Hetta fer væntandi at hava við sær, at talið á børnum á barnaverndarstovnum fer at minka. Ætlanin er eisini at endurskoða arbeiðsbýtið millum land og kommunur.

**Dagstovnaøkið**

Dagstovnalógin skal endurskoðast, og saman við kommununum verður fyrireikandi arbeiði gjørt, og útgangsstøðið fyri hesum arbeiðinum er tilmælið, sum Dagstovnaráðið hevur mælt til. Meiri tíð skal vera til námsfrøðiligt virksemi, trivnaðarskapan og málsliga menning millum børn. Saman við Hagstovuni er arbeiði í gongd við at menna eina dagførda hagtalsskipan eftir altjóða leisti á dagstovnaøkinum. Ætlanin er at hava aðalorðaskifti um dagstovnaøkið í vár.

**Fólkaskúlin**

Meira lærаratíð skal vera til hvønn einstakan næming, og samtykt er at minka næmingatalið til 22 næmingar í hvørjum flokki, og henda broyting verður galdandi frá skúlaárinum 2025–2026, tá ið byrjað verður við 1. flokki, og síðani sett endaliga í gildi eftir nýggju árum. Arbeitt verður víðari við at fremja aðrar broytingar til tess at styrkja Fólkaskúlan. Fyrireikað verður nú at minka undirvísingartímatalið, at endurskoða tíma- og lærugreinabýtið, samstundis sum tvílæraraskipanin verður styrkt, umframt at meira tíð verður til flokslæraran. Málið er at fáa ein skúla á høgum fakligum stigi, har næmingarnir trívast, mentast og læra. Leisturin at skipa royndar- og menningarvirksemi í fólkaskúlanum er broyttur soleiðis, at tað frameftir eisini verða drúgvari royndarverkætlanir, har førleikamenning, gransking og eftirmeting verða partur av virkseminum. Komandi ár verða drúgvari royndarverkætlanir royndar í samlæring/co-teaching og í støddfrøði í verki. Harumframt er áhugaverd royndarverkætlan í gongd í skúlanum á Fløtum við styttum skúladegi og við tillagingum í tíma- og lærugreinabýtinum. Námsvísindadeildin fylgir hesi verkætlan.

**Skúlin á Trøðni**

Skúlin á Trøðni er einasti serskúli í Føroyum. Í skúlanum ganga næmingar, sum ikki kunnu ganga í vanligu skúlum, heldur ikki við teimum sertilboðum, sum eru har. Í løtuni ganga 61 næmingar í skúlanum. Teir flestu næmingarnir megna ikki at vera einsamallir heima og hava tí tørv á frítíðartilboði eftir skúlatíð. Hesi børn tola illa broytingar og megna illa skiftið millum skúla og frítíðarskúla. Ætlanin er, at næmingarnir í ovaru lonunum í Skúlanum á Trøðni fáa í boði at hava bæði skúla og frítíðarvirksemi í Skúlanum á Trøðni.

**Næmingaráð**

Tað hevur stóran týdning bæði fyri trivnað og demokratisku menningina, at næmingarnir koma til orðanna og kunnu siga sína hugsan um viðurskifti, sum eru tongd at skúla og læring. Ein kunngerð fyri næmingaráð er fyrireikað í góðum samstarvi við næmingaráð, skúlar og myndugleikar. Eitt

landsráð fyri næmingaráð er í umbúna. Harumframt fer Nám at skipa fyri skeiðum um næmingaráðsarbeiði.

**Snildfonir í skúlanum**
Í øllum okkara grannalondum verður arbeitt við at avmarka ávirkanina, sum nýtslan av snildfonum kann hava bæði á trivnað og læring. Serliga er hetta við atliti at sosiala felagsskapinum og hugsavnanini hjá næmingunum. Tilgongd er sett í verk, har øll skúlastýri skulu áseta reglur um telefonnýtsluna í skúlunum.

**Eftirútbúgvingarvirksemi**
Arbeiði er sett í verk at gera nýggja skipan av eftirútbúgvingum til fólkaskúlan og miðnám. Longru eftirútbúgvingarnar á fólkaskúla- og miðnámsøkinum skulu fáast í fasta legu, so tey eru regluliga við ávísum áramáli ímillum. Málið er, at allir partar draga eina línu, so skipanin verður gjøgnumskygdari, og betri fyritreytir verða fyri at nøkta eftirútbúgvingartørvin og at førleikamenna lærarar og leiðslur.

**Føroyskt sum annaðmál**
Tørvurin á undirvísing í føroyskum sum annaðmál er í vøkstri grundað á stóru fólkatilflytingina. Løgtingslóg um føroyskt sum annaðmál (FSA) er samtykt, og verður nú sett í verk. Undirvísingarstýrið samskipar undirvísingina, sum í fyrstu atløgu fer fram í miðnámsskúlum kring landið.

**Gymnasiala miðnámsøkið**
Gymnasiala breytaskipanin hevur virkað í meiri enn 10 ár, og spurningurin er, hvørjar væntaðar førleikar framtíðin krevur av okkara gymnasialu miðnámsnæmingum, bæði tá ið tað kemur til framhaldslestur, arbeiðsmarknað og samfelagið sum heild. Arbeiðsbólkur orðar tilmæli um kósina frameftir fyri gymnasialu breytaskipanina, sum kemur til orðaskifti millum allar áhugapartar á miðnámsøkinum.

**Útbygging á Miðnámi á Kambsdali**
Á Miðnámi á Kambsdali er stór tilbygging í gongd, sum bindur skúlan betur saman við felagsfunktiónum. Verkætlanin fevnir m.a. um at nýbyggja náttúruvísindaliga økið við nýggjum undirvísingarhølum, og at útbyggja felagsøkið, køkin og undirvísingarhøli. Talan er um triðja byggistig, ið er seinasti liðurin í heildarætlanini frá 2012 um útbygging og umbygging í sambandi við samanlegging av miðnámsskúlanum á Kambsdali. Eftir ætlan skal verkætlanin vera liðug á sumri í 2025, tá ið skúlaárið byrjar.

**Yrkisútbúgvingarøkið**
Í miðal 375 nýggir lærlingasáttmálar hava verið um árið tey seinastu fimm árini. Tað er at frøast um, at føroyski ungdómurin bæði velur handaligar og bókligar útbúgvingar, tí eitt samfelag hevur brúk fyri báðum. Ætlanir eru støðugt at endurskoða og menna útbúgvingarnar og viðgera tørvin á nýggjum útbúgvingum saman við arbeiðsmarknaðarpørtunum.

**Tekniski skúli í Klaksvík**
Fyrireikað hevur verið at byggja eina samkomuhøll til Tekniska skúla í Klaksvík. Prosjekteringin er liðug, og næsta stig í verkætlanini er at gera jørð-, lendis- og kloakkarbeiðið, ið væntast at verða liðugt í ár. Ætlanin er at fara undir bygningsarbeiðið í 2025.

**Maritima útbúgvingarøkið**
Føroyar eru ein maritimur miðdepil, og tí hevur tað týdning, at vit støðugt menna okkara maritimu útbúgvingar sambært altjóða krøvum og eftirspurningi. Aspirantskipanin og skipsatstøðingsútbúgvingin eru í hesum sambandi endurskoðar, og ætlanin er at laga tær til. Eitt nú er ætlanin, at tað skal bera til at taka skipsatstøðingsútbúgvingina í modulum, soleiðis at tú fært júst teir førleikar tær tørvar, eftir styttri tíð. Harumframt verður kannað, hvørjar nýggjar útbúgvingar kundu verið skipaðar á sjóvinnuøkinum.

**Heilsuskúlin**
Stórur tørvur er á fleiri útbúnum fólkum á vælferðarøkinum, og tí verða møguleikarnir fyri løn til teirra, sum taka útbúgving sum heilsuhjálpari, heilsurøktari og námsfrøðihjálpari, nú viðgjørdir. Tað hevur týdning, at land og kommunur finna ein felags leist fyri, hvussu hetta kann skipast. Harumframt verður arbeitt við eini loysn fyri, hvussu tey, sum taka útbúgving í Heilsuskúlanum, eisini kunnu uppstiga seg, so at tey fáa atgongd til hægri lestur aftan á lokna útbúgving, um tey vilja tað.

**Fróðskaparsetrið**
Nýggja lógin um føroyskan førleikakarm er týdningarmikil liður í altjóðagerðini av føroyskum útbúgvingum og ein fortreyt fyri at kunna vera við í Bologna-tilgongdini. Førleikakarmurin fer at økja um flytførið á øllum føroyskum útbúgvingum, ikki einans teimum hægru. Fróðskaparsetur Føroya hevur samtykt nýggja strategi, sum skal seta kósina fyri Setrið tey komandi fimm árini (2025–2030). Í strategiini verður miðað ímóti at fáa betri samband til arbeiðsmarknaðin í lag. Eisini skal strategiin brynja Setrið til komandi ætlanir við Erasmus+. Ein breitt mannaður arbeiðsbólkur endurskoðar økið fyri hægri yrkisrættaðar útbúgvingar. Málið er at fáa størri smidleika millum hægri útbúgvingar í Føroyum. Samstarvið millum Fróðskaparsetur Føroya og Sjúkrahúsverkið er

styrkt við at gera Landssjúkrahúsið til universitetssjúkrahús, har samstarvsavtalur um felagsfunktiónir eru gjørdar. Ætlanin er, at Granskingar- og framtakseindin á Fróðskaparsetri Føroya verður stuðlandi eind undir granskingini í heilsuverkinum.

**Kampus Setrið**
Høliskarmarnir hjá Fróðskaparsetrinum verða mentir við støði í yvirskipaðu heildarætlanini frá 2018 um at savna alt virksemið hjá Fróðskaparsetrinum í ein samanhangandi lestrar- og granskingarbýling, Kampus. Ein nýggjur felagsbygningur verður prosjekteraður, og byggingin av honum kann eftir ætlan byrja í 2026. Samstundis verður arbeitt miðvíst við at høvuðsumvæla og nútímansgera skúlabygningarnar hjá Setrinum á Frælsinum. Í løtuni verður lon 5 høvuðsumvæld, og tá ið tað arbeiðið er liðugt, verður farið víðari við verkætlanini at høvuðsumvæla restina av skúlabygningunum á Frælsinum. Ein heildarætlan fyri allar setursbygningarnar verður gjørd, sum fer at verða grundarlag fyri framhaldandi arbeiði.

**Rásin**
Um- og útbyggingin av Rásini í Saltangará er í gongd og verður liðug í 2025. Bygdur verður ein nýggjur bygningur omanfyri verandi bygning. Hann er í tveimum hæddum við kamarslon í ovaru hæddini og undirvísingarhølum og felagshølum í niðaru hæddini. Ein nýggjur millumbygningur við m.a. køki knýtir gamla og nýggja bygningin saman. Við útbyggingini fer Rásin at kunna taka tvífalt so nógvar næmingar inn í skúlan, soleiðis at tað fara at verða tiknir sjey næmingar afturat inn á hvørjum ári frameftir.

**Húsarhaldskúlin**
Byggingin av nýggja húsarhaldsskúlanum í Klaksvík er í gongd og væntast at verða liðug í ár. Flytast kann inn í 2025. Tað er sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya, ið stendur fyri verkætlanini.

**Gransking**
Nýggja lógin um gransking, menning og nýskapan er farin at virka. Granskingarráðið kann umsita granskingarjáttanir í øllum geirum og á øllum málsøkjum, soleiðis at umsitingin kann sameinast.

Gransking og menning hevur verið ein høvuðsháttur í samstarvinum millum Føroyar og ES, síðan Føroyar á fyrsta sinni í 2010 fingu atlimaskap í ES-samstarvsætlanini. Samstarv millum Føroyar og Evropasamveldið um gransking og menning er ein berandi súla undir leikluti Føroya í altjóða granskingarsamstørvum. Í 2017 skrivaðu Føroyar undir millumtjóða sáttmála at styrkja granskingarsamstarvið í Arktis. Og frá 1. januar 2023 hava Føroyar fingið sjálvstøðugan limaskap í stýrinum fyri norðurlendska stovnin Nordforsk.

**Erasmus+**
Ætlanin er, at Føroyar verða partur av Erasmus+ útbúgvingarsamstarvinum hjá Evropasamveldinum. Fyrsta liðið er at skipa eina nationala umsitingareind sambært krøvunum frá ES um Erasmus+.

## UMHVØRVIS-, ARBEIÐSMARKNAÐAR-, OG BÚSTAÐARMÁLMÁL

**Náttúruvernd**
Nýggj náttúruverndarlóg kom í gildi 1. januar 2024, og náttúrufyrisitingin á Umhvørvisstovuni er í ferð við at taka skap. Arbeitt verður bæði við at fáa yvirlit yvir tøka nátturuvitan og skipa framtíðar náttúruskráseting, so at náttúrufyrisitingin fær eitt vitanargrundarlag at virka á, og við at taka tey fyrstu stigini at fremja endamálini í lógini í verki.

Samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at tryggja burðardygd í øllum samfelagnum, og í tí sambandi hevur verið arbeitt við at orða landinum ein politikk fyri burðardygga náttúruumsiting. Ætlanin er eisini at gera eina lívmargfeldisstrategi í samsvari við skylduna, sum Føroyar hava sambært lívmargfeldissáttmálanum hjá Sameindu tjóðum, og lagt eigur eisini at verða upp fyri teimum nýggjastu málunum í Kunming-Montreal-karminum fyri heimsins lívmargfeldi, sum partafundurin undir lívmargfeldissáttmálanum (COP 15) samtykti í desember 2023.

Av málum, sum hava bráðskund, eru reglur um innflutning av fremmandum lívverum. Endamálið er at forða fyri, at fremmandar lívverur, sum hava ella kunnu hava skaðiliga ávirkan á føroyskt lívmargfeldi, verða innfluttar, settar út ella breiða seg í náttúruni. Gjørdar verða m.a. reglur um innflutningsbann, innflutningsloyvi, váttanir, útseting, sølu og fráboðan.

**Nýggj pantskipan**
Tað hevur í mong ár verið arbeitt við at gera eina felags pantskipan fyri alt landið, sum ger tað léttari fyri fólk at sleppa av við pantíløt, og sum er smidlig fyri allar partar. Fyri vanlig fólk hevur tað verið ein avbjóðing at sleppa av við allar pantfløskur á sama stað. Í dag hava vit einar 12 ymiskar skipanir, har tú sum viðskiftafólk skalt lata pantaðar fløskur inn aftur í sama handli, sum tær vórðu keyptar – ella í einum handli, sum selur fløskur frá sama innflytara.

Hetta verður nú broytt. Frameftir verður ein felags pantskipan skipað fyri alt landið, fyri allar handlar og fyri íløt úr glasi, plasti og metali. Í fyrstuni verður talan um íløt við vørum sum øli, vatni og leskidrykkjum, men lógin letur upp fyri, at pant kann leggjast á onnur íløt, t.d. djús, saft, smoothie o.a.

Tað hevur við sær, at fólk fara at sleppa av við øll íløt á einum stað. Somuleiðis verður tað lættari hjá handlunum at handfara íløtini. Hóast summir handlar hava automatir, ið taka ímóti pantíløtum, so eru fleiri handlar, ið manuelt taka ímóti pantíløtum og skulu skilja tey ímillum 15 og 18 bólkar. Frameftir verður skilt í tríggjar bólkar; glas, plast og metal.

IRF verður umsitari av pantskipanini. IRF fer at hava ábyrgd av at heinta frá handlum, gjalda handlum pantið og at fáa íløtini til endurnýtslu og endurvinningar. Nýggja pantskipanin kemur í gildi 1. oktober 2025.

**Burturkast**

Verkfallið fyri nøkrum vikum síðan vísti okkum, hvussu nógv rusk vit føroyingar framleiða.

UNDP, ið er menningarstovnurin hjá ST, metir, at um vit halda fram við at nýta náttúrutilfeingið, eins og vit gera í dag, so fara vit at hava tørv á trimum klótum í 2050. Náttúrutilfeingið er ikki endaleyst, og tað eri ikki haldført áhaldandi at økja framleiðsluna av nýggjum lutum úr nýggjum tilfari, ið eftir stutta tíð verður brent ella tyrvt.

Fyri at avmarka okkara nýtslu av náttúrutilfeingi og minka um dálking og útlát skulu vit brúka tilfeingið so nógvar ferðir, sum til ber, heldur enn at tyrva ella brenna tað. Vit skulu flyta okkum úr einum linjubúskapi, har vit troyta og blaka burtur, til ringbúskap, har vit avmarka okkara tørv á náttúrutilfeingi og endurnýta og endurvinna tað, ið vit framleiða.

Tí skulu vit hava nýggjar reglur fyri burturkastøkið. Nýggj burturkastkunngerð skal seta karmarnar fyri einum undirstøðukervi til ringbúskap við meira endurnýtslu og endurvinning av burturkasti frá húsarhaldum og vinnu. Kunngerðin ásetur, at kommunur skulu handfara burturkast sambært burturkaststiganum:

1. Endurnýta (brúka lutin umaftur)
2. Endurvinna (brúka lutin til okkurt annað við at broyta hann)
3. Orkuendurvinna (fáa hita burturúr)
4. Beina burtur ( t.d. brenna uttan orkuútvinning, ífylla til veg ella tyrving)

Lutir kunnu einans fara niður í burturkaststiganum, um tað ikki er møguligt ella ráðiligt sambært ringbúskapi og útláti at hava teir longri uppi í stiganum.

Ein høvuðsháttur í nýggja kunngerðaruppskotinum er, at land og kommunur saman skulu gera eina landsætlan fyri burturkasti og henni á baki eina kommunala ætlan fyri burturkasti. Ætlanirnar skulu galda í 10 ár, men broytingar kunnu gerast í gildistíðini.

Landsætlanin skal áseta, hvørji mál kommunurnar skulu røkka á burturkastøkinum næstu tíggju árini við serligum atliti at teimum fyrstu fimm árunum. Ásett er í umhvørvisverndarlógini, at hetta arbeiðið skal gerast saman við kommununum, og tær skulu síðan gera eina kommunala ætlan fyri burturkast, sum skal stuðla upp undir stevnumiðini í landsætlanini.

Vit mugu seta okkum langtíðarmál, betra um fyriskipanir, sum loyva ringbúskapi, samstundis sum vit tryggja eina hugburðsbroyting millum fólk, stovnar og fyritøkur.

**Orku- og veðurlagsmál**

Samgongan hevur sett sær fyri, at nú skal verulig ferð koma á orku- og veðurlagsøkið. Landsstýrið arbeiðir miðvíst við at seta átøkini í orku- og veðurlagspolitikkinum frá 2022 í verk. Higartil eru 18 av teimum 25 átøkunum framd ella sett í verk. Nevnast kann, at vit hava fingið góðkendar viðskiftatreytir og prísir til smærri vatnorkuverk, oljufýringar verða ikki longur loyvdar sum upphitingarkelda í nýggjum bygningum, og stuðul hevur verið latin fyri at senda oljufýringar til endurvinningar, um tað samstundis verður skift til elrikna upphiting, og reglur eru gjørdar um fjarhita við broytingum í elveitingarlógini.

Vit eru farin undir eina skipaða tilgongd so líðandi at minka um F-gass sum kølievni í køli- og frystiskipanum á landi og sjógvi, og prísir og viðskiftatreytir skulu gerast fyri uppsetan av sólorkuskipanum á vinnubygningar, sethús og aðrastaðni. Ein óheft orkuvegleiðing er sett á stovn, og fokus skal setast á grøna almenna ferðslu og orkuvirkni hjá skipum.

Komandi ár skulu enn fleiri átøk setast í verk. Ein skipað tilgongd við útboði av vindorku er byrjað. Vit skulu trífalda orkuframleiðsluna úr vindi komandi fimm árini. Eisini skulu treytir fyri stór sólorkuverk á vinnubygningum gerast og almenn útboð av útbygging av sólorku fyrireikast, eins og eitt lógarverk fyri útboð av orkuframleiðslu á sjónum skal fyrireikast.
Samgongan vil í øllum arbeiðinum við orku- og veðurlagspolitikki tryggja sær, at eingin dettur niðurímillum. Soleiðis fáa vit eina rættvísa, grøna umlegging.

Umframt arbeiðið við orku- og umhvørvispolitikkinum her heima, viðurkenna vit tørvin á altjóða samstarvi á hesum økinum. Havið og veðurlagið fevnir tvørtur um landamørk, og tað er umráðandi, at vit standa saman um at basa veðurlagsbroytingunum. Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum luttók í heyst á árliga partsfundinum á veðurlagsøkinum, COP 28. Har varð dentur serliga lagdur á samráðingarnar um hav og veðurlag. Hetta er eitt týðandi evni í veðurlagssamráðingunum, sum hevur ómetaliga stóran týdning fyri okkum, sum í stóran mun liva av tí, sum havið gevur okkum. Í heyst verður aftur tikið lut á altjóða veðurlagsráðstevnuni COP 29.

Vit í Føroyum hava skyldu til at gera okkara í heimshøpi. Í meira enn tíggju ár hava vit økt um útlátið av vakstrarhúsgassum á hvørjum ári. Men nýggjastu tølini, sum Umhvørvisstovan hevur latið úr hondum, vísa, at útlátið av vakstrarhúsgassi minkaði í 2022. Men sambært Paríssáttmálanum skulu londini alsamt seta sær hægri mál, og tí mugu vit eisini seta fleiri átøk í verk.

**Veðurlagslóg**

Veðurlagsbroytingarnar eru ein av teimum størstu og mest átrokandi avbjóðingunum, sum samfelagið nakrantíð hevur havt. Og veðurlagsbroytingarnar hanga óloysiliga saman við øktu avbjóðingunum, vit hava á náttúru- og umhvørvisøkinum. Í samgonguni síggja vit tað sum okkara skyldu at lata komandi ættarliðum ein burðardyggan heim. Skulu vit røkka hesum máli, mugu vit seta stór krøv til okkum sjálvs.

Tí er ætlanin at leggja fram uppskot til løgtingslóg um veðurlag. Endamálið við veðurlagslógini er at áseta bindandi stutttíðar- og langtíðarmál at minka útlátið, og at Føroyar skulu fylgja altjóða samtyktum og tilmælum. Tað er alneyðugt, at veðurlagsátøkini eru grundað á nýggjastu vitanina á økinum. Harafturat skulu vit regluliga eftirmeta, um málini at minka um útlátið eru nøktandi og verða rokkin. Ætlanin er tí eisini at seta á stovn eina ráðgevandi orku- og veðurlagsnevnd við serkønum fólkum at ráðgeva landsstýrinum á orku- og veðurlagsøkinum.

**Útbyggingarætlan fyri varandi orku**

Skulu vit náa á mál við orkuskiftinum, mugu vit byggja framleiðsluna av varandi orku munandi út tey næstu árini. Landsstýriskvinnan í orkumálum fekk í vár handað eina tíðarfesta útbyggingarætlan fyri komandi fimm árini, sum slóðar fyri, at útbyggingararbeiðið kann skipast betur og gerast meira støðugt. Vit skulu nærum trífalda grønu orkuna næstu fimm árini.

Útboð av varandi orku og útbyggingar av elskipanini skulu ganga neyvari hond í hond, so at elkervið megnar at taka ímóti framleiddu orkuni. Tað fyrsta vindútboðið sambært ætlanini er longu sett í verk í Sandoynni.

**Elveitingarlóg**

Løgtingið samtykti í vár broytingar í elveitingarlógini. Við lógarbroytingini er staðfest, at SEV varðveitir sín samhaldsfasta leiklut sum neteigari og kervisábyrgdari. Til tess at eggja til størri gagnnýtslu av grønari orku skal SEV fyrireika eina prísskipan, sum skal bjóða el fyri lægri prís í tíðarskeiðum við lítlari ella ongari olju í elframleiðsluni.

Fjarhitavirksemi verður nú fevnt av eini loyvisskipan, sum er rættiliga lík henni, sum er galdandi á eløkinum. Krøv kunnu frameftir setast fjarhitafeløgum, sum tryggja fjarhitabrúkarum størri

gjøgnumskygni í prísum og betri brúkaravernd, og sum tryggja, at fjarhitafeløg ikki brúka ov nógva olju í hitaveitingini.

Eisini varð ein ognartøkuheimild útvegað til orku- og fjarhitaútbyggingar. Mett verður, at tørvur er á heimildini, tí at skjótar orkuútbyggingar eru týðandi fyri samfelagið í grøna orkuskiftinum.

Samgongan ætlar at taka arbeiðið at skipa ein elmarknað við fjølbroyttum søluliði og eginfram-leiðslu fram aftur í heyst.

**Barsilsskipanin**
Síðani barsilskipanin varð sett á stovn, hevur støðugt verið arbeitt fyri at geva foreldrum uppaftur betri kor til at vera saman við barninum fyrstu tíðina. Skiftandi samgongur hava arbeitt við at leingja barsilsfarloyvisskeiðið við barsilsútgjaldi, sum í dag er eitt heilt ár. Barsilsfarloyvisskeiðið er støðugt longt, men hámarkið fyri útgjaldi frá barsilsskipanini hevur staðið í stað síðani 2004, hóast munandi vøkstur hevur verið í lønarlagnum. Nú hevur Løgtingið einmælt loksins hækkað hámarkið fyri útgjaldi frá barsilsskipanini við 5.000 kr. Samstundis eru korini hjá nýútbúnum foreldrum vorðin betri, so at tey ikki longur detta ímillum ymiskar skipanir, men verða loftað av barsilsskipanini.

Í heyst verður barsilsskipanin aftur betrað, so at foreldur at ov tíðliga føddum børnum og foreldur at tvíburum ella fleirburum fáa fleiri vikur við barsilspeningi og tryggjað størri fleksibilitet í skipanini. Ætlanin er eisini at fáa sett eitt lágmarksútgjald, so at foreldur altíð eru tryggjað eitt ávíst minstaútgjald úr skipanini.

Miðað verður eftir breiðari politiska semju um hesar broytingar.

Løgting samtyktið einmælt í vár, at ein nýggj KT-skipan til Barsilsgrunnin skal mennast. Tað fyrsta ítøkiliga úrslitið er, at útgjøld úr barsilsskipanini nú koma á bók áðrenn mánaðarskiftið. Hetta hevur leingi verið eitt ynski, soleiðis at peningurin er á bók, tá ið rokningarnar skulu gjaldast seinast í mánaðinum.

**Arbeiðsskaðatryggingarlógin**
Arbeiðsskaðatryggingarlógin varð í heyst broytt soleiðis, at endurgjald fyri mist vinnuføri verður javnað í mun til lønarvøksturin í samfelagnum. Av tí sama varðveitir endurgjaldsveitingin real-virðið, so hvørt sum lønirnar í samfelagnum hækka.

Umsitingin av Vanlukkutryggingarráðnum er í árinum flutt frá Føroya Rætti til Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Sorinskrivarin hevur í longri tíð heitt á landsstýrið um at flyta umsitingina til ein stovn undir landinum. Umsitingin er somuleiðis uppraðfest, so borgarar kunnu fáa endaligar avgerðir skjótari.

**Arbeiðsvikan**
Arbeitt verður við at stytta arbeiðsvikuna. Arbeiðið hevur tikið longri tíð enn ætlað – serliga tí at tað hevur verið so nógv órógv á arbeiðsmarknaðinum. Hildið verður fram við hesum arbeiðinum.

**Bústaðarmál**
Bústaðarpolitikkur er vælferðarpolitikkur. Og í Føroyum skulu øll hava rætt til eitt trygt og gott heim. Fjølbroyttur bústaðarmarknaður er fortreyt fyri einum vælvirkandi samfelag. Men vit hoyra næstan dagliga um familjur, sum mangla bústað. Tað er alneyðugt at gera okkurt munagott við bústaðarneyðina.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa fleiri og fjølbroyttari bústaðir, og sum liður í hesum varð lógin um Húsalánsgrunnin broytt í vár fyri aðru ferð í hesum samgonguskeiðinum.

Broytingin ger, at kommunur í framtíðini kunnu stovna feløg saman við Bústøðum, sum útvega, eiga og umsita leiguíbúðir í viðkomandi kommunu. Hetta slagið av bústaðarfeløgum hevur til endamáls at byggja gott, men bíligt og uttan stórt vinnuligt avkast. Lániheimildin hjá Húsalánsgrunninum varð eisini hækkað við 350 milliónum fyri at tryggja, at Bústaðir framhaldandi kunnu vera við til at menna føroyska bústaðarmarknaðin. Við lógaruppskotinum fekk Húsalánsgrunnurin eisini heimild til at læna til bústaðabygging frá útlendskum lánveitarum, sum vil økja um møguleikan fyri bíligari fígging. Eisini er arbeiðið í gongd við at fyrireika lóggávu, sum skal heimila kommunum at áseta bústaðarskyldu í nýggjum útstykkingum.

Hóast allar hesar batar er enn langt á mál at fáa ein bústaðarmarknað í javnvág – enn er sera stórur tørvur á leigubústøðum. Og tað er ein sannroynd, at høga rentan og prísvøksturin seinastu tíðin hava við sær, at leiguprísurin fyri nýggjar íbúðir er farin nógv upp. Familjur og borgarar við lágum inntøkum hava tí trupult við at svara hvørjum sítt við hækkandi leiguprísunum.

Tí ætlar landsstýrið í komandi tingsetu at endurskoða bústaðarpolitikk landsins, har dentur verður lagdur á, hvussu vit kunnu økja um útboðið av leigubústøðum, samstundis sum vit tryggja sosiala rættvísi á føroyska bústaðarmarknaðinum.

# ÚTLENDINGA- OG LÓGARMÁL

**Fólkasamanseting – útlendingamál**

Í apríl í ár búðu 54.642 fólk í Føroyum. 83,8% vóru fødd í Føroyum, 8,3% í Danmark, 1,4% í øðrum Norðurlondum, 2,7% í Evropa annars og 3,9% í øðrum londum.

Prosentparturin av teimum, sum búgva í Føroyum, men eru fødd í Danmark ella øðrum Norðurlondum, hevur so at siga staðið í stað seinastu fimm árini, men prosentparturin av teimum, sum bæði eru fødd og búgva í Føroyum, er fallin 3% seinastu fimm árini.

Hinvegin er prosentparturin av teimum, sum eru fødd í Evropa annars, vaksin úr 1,8% upp í 2,7% seinastu fimm árini, og prosentparturin av teimum, sum eru fødd í øðrum londum, er vaksin úr 2% upp í 3,9% seinastu fimm árini.

**Útlendingamál**

Talið á útlendingum í Føroyum er sostatt økt alsamt seinastu árini. Tørvurin á arbeiðsmegi í ávísum vinnugreinum, serliga byggivinnuni, fiskivinnuni á landi og sjógvi og tænastuvinnuni, hevur verið stórur, og neyðugt hevur verið at fara út um landoddarnar at finna hesa arbeiðsmegi.

Stóra tilflytingin av útlendingum til Føroyar hevur bæði jaligar og neiligar avleiðingar. Tilflytingin er við til at nøkta tørvin á arbeiðsmegi, sum er ein treyt fyri samfelagsbúskaparligum vøkstri. Tilflytingin av útlendingum kann eisini ríka okkara samfelag við nýhugsan og nýmenning. Hinvegin tyngir stóra tilflytingin eisini okkara skipanir, eitt nú dagstovnar og skúlar, tí tað eru so nógv børn, sum ikki duga føroyskt. Mentanarmunir og vantandi málførleikar hjá foreldrunum elva ofta til truplar støður í samstarvinum við dagstovnar og skúlar.

Fyri at gera tað smidligari at fáa útlendskar arbeiðstakarar til Føroyar, varð Fast Track-skipan sett í gildi í november 2021. Skipanin hevur havt við sær, at nógv fleiri útlendskir arbeiðstakarar, serliga ófaklærd fólk, eru komin til Føroya seinasta hálvtriðja árið. Tølini niðanfyri vísa talið av arbeiðs- og uppihaldsloyvum, sum eru latin fyrstu ferð frá 2021 til og við 2. ársfjórðing 2024, og talið av uppihaldsloyvum til samfylgjandi familju:

| | 2021 | 2022 | 2023 | pr. 1. juli 2024 |
|---|---|---|---|---|
| **Arbeiðsloyvi** | | | | |
| ES-skipanin | 620 | 839 | 699 | 282 |
| Útlendingalógin, arbeiðsloyvi | 176 | 21 | 144 | 57 |
| Ítróttaloyvi | 45 | 23 | 51 | 27 |
| Fast Track | 60 | 635 | 372 | 224 |
| **Arbeiðsloyvi íalt** | **901** | **1518** | **1266** | 590 |
| | | | | |
| **Samfylgjandi familja** | | | | |
| Hjúnafelagi o.a. | 26 | 40 | 49 | 7 |
| Børn | 22 | 78 | 76 | 20 |
| **Samf.familja íalt** | **48** | **118** | **125** | 27 |

Í 2021 vóru 60 arbeiðsloyvir latin eftir Fast Track skipanini, í 2022 vóru 635 arbeiðsloyvir latin fyrstu ferð eftir Fast Track-skipanini, í 2023 vóru 372 arbeiðsloyvir latin fyrstu ferð eftir Fast Track-skipanini, og teir fyrstu 6 mánaðirnir í ár vóru 224 arbeiðsloyvir latin fyrstu ferð eftir Fast Track-skipanini.

Fyri at tryggja, at útlendskir arbeiðstakarar eru førir fyri at uppihalda familju síni í Føroyum, setti landsstýrið í september 2023 inntøkumørk í sambandi við arbeiðsloyvir til arbeiðstakarar, sum hava familjuna við sær til Føroya. Enn ber ikki til at siga, hvørja ávirkan inntøkumørkini fara at fáa, tí flestu umsóknirnar um uppihaldsloyvir til samfylgjandi familju, sum eru latnar inn aftan á 1. september 2023, eru framvegis í viðgerð. Tað snýr seg um eini 54 mál. Avgerðir í hesum málunum verða væntandi tiknar í næstum

**Flóttafólk úr Ukraina**
Í apríl 2022 samtykti Løgtingið einmælt eitt uppskot um at taka ímóti 200 flóttafólkum úr Ukraina. Flóttafólkini fingu fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum til 17. mars 2024. Av tí at støðan í Ukraina er óbroytt, vórðu fyribils uppihaldsloyvini longd í heyst til tann 17. mars 2025. 140 uppihaldsloyvi vórðu longd.

Løgtingið samtykti í vár at hækka kvotuna av fyribils uppihaldsloyvum til ukrainsk flóttafólk úr 200 loyvum upp í 250 loyvir. Higartil (22. mai 2024) hava í alt 230 ukrainsk flóttafólk søkt um fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum. 193 persónar hava fingið fyribils uppihaldsloyvi – 110 kvinnur, 27 menn og 56 børn. 13 hava fingið sýtt uppihaldsloyvi.

Fleiri myndugleikar eru partur av arbeiðinum at taka ímóti flóttafólkum úr Ukraina. Landsstýrið hevur sett eina samskipandi eind at tryggja samanhang í arbeiðinum. Í samskipandi eindini luttaka umboð fyri Løgmálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Almannaverkið, Útlendingastovuna, Undirvísingarstýrið, Barnaverndarstovu Føroya, Familjufyrisitingina, Kommunufelagið, Tórshavnar kommunu, Heilsutrygd, Føroya Politi og Reyða Kross.

Sum heild hevur tað gingið væl at taka ímóti ukrainsku flóttafólkunum, men tað hevur kravt nógv av almennum myndugleikum, kommunum og av eitt nú Reyða Krossi. Útlendingastovan hevur lagt stóra arbeiðsorku í at finna bústaðir til ukrainsku flóttafólkini, og hetta er trupult. Móttøkuhúsini eru full, og flóttafólkini mugu búgva longur í móttøkuhúsunum enn teir fimm dagarnar, sum málið annars er. Útlendingastovan hevur tí leigað ávegishús, har flóttafólk kunnu búgva eitt sindur longur, meðan leitað verður eftir varandi bústaði.

**Nýggj útlendingarlóg**
Løgmálaráðið ætlar saman við Udlændinge- og Integrationsministeriet (hereftir UIM) at gera uppskot til nýggja útlendingalóg fyri Føroyar. Útlendingalógin fyri Føroyar er frá 2001 og er sprottin úr donsku útlendingalógini. Danska útlendingalógin hevur javnan verið dagførd síðani 2001, men bert heilt fáar broytingar eru gjørdar í føroysku útlendingalógini. Síðani 2001 er føroyska samfelagið nógv broytt viðvíkjandi útlendingum. Føroyska útlendingalógin er tí á nógvum økjum afturúrsigld í mun til støðuna í føroyska samfelagnum í dag.

Útlendingaøkið er felagsmál. Tað er tí UIM, sum stendur fyri arbeiðinum at gera uppskot til nýggju føroysku útlendingalógina í tøttum samstarvi við Løgmálaráðið. UIM hevur sett á stovn eina nýggja eind við fýra starvsfólkum, sum burturav skal arbeiða við at gera nýggja útlendingalóg fyri Føroyar. Ein arbeiðsbólkur er settur við føroyskum og donskum embætisfólki. Arbeiðið at gera lógaruppskotið fer væntandi at taka tvey ár. Løgmálaráðið fer at arbeiða við lógaruppskotinum í tøttum samstarvi við Útlendingastovuna.

Ein politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum flokkum á Løgtingi er eisini settur. Limirnir í fylgibólkinum skulu fylgja arbeiðinum hjá UIM og Løgmálaráðnum og so hvørt koma við sínum hugsanum til lógaruppskotið.

**Delegatiónin sett í verk 1. september**
Við fyriskipan frá januar 2020 bleiv útlendingalógin fyri Føroyar broytt, so at danski útlendinga-ráðharrin fekk heimild eftir tingingar við landsstýrið at delegera myndugleikan at taka avgerð í málum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum til føroyskar myndugleikar. Endamálið við broytingini var at geva Útlendingastovuni avgerðarmyndugleikan í hesum málum. Avgerðir hjá Útlendingarstovuni kunnu kærast til Udlændingenævnet. Tað hevur drigið út av fáa delegatiónna setta í verk. Nú eru fyrireikingarnar komnar so mikið áleiðis, at delegatiónin væntandi verður sett í verk 1. september 2024.

**Integratión**
Landsstýrið leggur í løtuni síðstu hond á lógaruppskot um integratión, sum ætlandi verður lagt fyri løgtingið í heyst. Í sambandi við arbeiðið at evna eitt uppskot til integratiónslóg er stór orka løgd í at inndraga viðkomandi partar fyri at fáa eitt væl gjøgnumhugsað uppskot. Yvirskipað eigur ein integratiónslóg at fevna um kunning, skeið og ymisk integratiónsfremjandi tiltøk. Málfrálæra er eisini ein hornasteinur í integratiónstilgongdini, men hetta verður regulerað í aðra lóggávu.

Høvuðsdenturin í integratiónslógini eigur at leggjast á tey, sum ætla at verða verandi í Føroyum. Neyðugt er at kunna væl um rættindi, skyldur og væntanir í føroyska samfelagnum, og at tilflytarar fáa neyðugan kunnleika um føroyska samfelagið og mentanina.

Tað kann eisini hava stóran týdning at kenna rættindi og skyldur hjá útlendingum, sum koma til Føroya at arbeiða. Tað er ein sannroynd, at nógv sum koma til Føroya at arbeiða, seinni velja at verða verandi. Tí eigur hesin bólkurin eisini at fáa ymisk tilboð.

Tilflytarar við børnum eru ein bólkur, har tað hevur serligan týdning at tryggja, at hon verður tikin um familjuna, so at børnini verða integrerað í føroyska samfelagið. Hetta hevur stóran týdning fyri, at tey skulu trívast.

Yvirhøvur er integratión eitt samansett og torgreitt øki, har tað er neyðugt, at arbeitt verður uppá tvørs av geirum, fakmørkum og kommunum fyri at fáa besta úrslitið. Samstundis hevur tað stóran týdning, at lóggávan er smidlig.

**Neyð- og menningarhjálp**
Altjóða tørvurin á hjálp veksur fyri hvørt ár. Tá ið fólk vórðu rikin frá heimi sínum undir eldgos-inum í Grindavík í Íslandi í januar í ár, vóru føroyingar skjótir at stuðla innsavningini hjá Reyða Krossi. Landsstýrið læt somuleiðis 250.000 kr., so samlaði stuðulin úr Føroyum gjørdist ein hálv millión.

Eisini hevur landsstýrið stuðlað flóttafólki í Armenia móti vetrarkuldanum, tiltøkum til tess at bøta um sálarheilsuna hjá palestinskum flóttabørnum í Libanon, og lokalum tilbúgvingartoymum í Irak, so tey kunnu at brynja seg móti vanlukkum.

Størsti stuðulin í ár fer tó til Ukraina, har landsstýrið hevur játtað 10 mió. kr. til frama fyri børn og ung. Yvir 8 milliónir verða latnar beinleiðis til hjálpararbeiði í Ukraina. Bróðurparturin av peninginum fer til smærri ukrainskar felagsskapir, sum vilja hjálpa í sínum nærumhvørvi. Her heima ger hjálparfelagsskapurin Berin eitt megnararbeiði at stuðla medmenniskjum í sorg. Í ár læt landsstýrið Beranum eykastuðul, so hesi tilboð eisini kunnu veitast til ukrainar, ið eru komnir higar sum flóttafólk.

**Útoyggjamál**

Í samgonguskjalinum stendur, at samferðslan til útoyggjarnar skal lyftast og nútímansgerast, og at møguleikin at seta búgv á útoyggj skal betrast. Fyri at røkka hesum málum og fyri at stuðla upp undir eina politiska viðgerð av, hvønn leiklut útoyggjar skulu hava í framtíðini, skal eitt nýtt útoyggjaálit orðast við greiðum málum fyri, hvussu tað skal bera til at virka og trívast á smáplássum.

Síðan seinasta útoyggjaálitið varð orðað, er vegasambandið í restini av landinum munandi betrað, so at í dag hava meira enn 90 prosent av fólkinum beinleiðis vegasamband hvørt við annað. Hetta merkir, at fólk á útoyggj eru ein meira marginaliseraður samfelagsbólkur enn áður. Hinvegin er talgilda samskiftið blivið høgligari, og møguleikar at arbeiða við frástøðu til arbeiðsplássið eru eisini betraðir. Tí er neyðugt at lýsa samfelagsliga leiklutin hjá útoyggjum og møguleikarnar fyri at búleikast á útoyggj. Ferðavinnan setur í vaksandi mun sín dám á útoyggjar, og tí skal nýggja útoyggjaálitið lýsa, hvussu tað kann bera til at virka og trívast á útoyggj við støði í teimum møguleikum og avbjóðingum, sum ferðavinna hevur við sær. Arbeiðið at gera eitt nýtt útoyggjaálit er byrjað.

**Føroysk revsilóg**

Í tingsetunum 2016–2022 er revsilógin dagførd, nútímansgjørd og føroyskað, og beint fyri jól samtyktið Løgtingið seinasta partin av revsilógini, sum nú øll er á føroyskum.

Revsilóggáva er ein tann mest grundleggjandi lóggávan í einum samfelagi. Revsilóggáva ásetir, hvat skal revsast í einum samfelagi, og hvør revsing sømir seg til hvat brotsverk.

Yvirskipað eigur revsilóggávan at taka støði í okkara egna samfelagi, søgu, mentan og virðum. Hetta er galdandi fyri innihaldið, men eisini fyri málið, sum verður brúkt, og fyri hvussu lóggávan er sett saman. Hóast føroyska samfelagið hevur fleiri felags eginleikar við danska samfelagið, so víkir tað eisini frá. Eitt dømi er okkara skyldskapur í Føroyum, sum er nógv tættari knýttur enn í londunum rundan um okkum. Hetta ger, at sosiala eftirlitið er sterkt, sum samstundis hevur við sær færri álvarsom brotsverk her enn í okkara grannalondum. Tí hóskar danska revsilógin ikki altíð neyvt til lógarbrot í Føroyum.

Ætlanin er nú at fara undir at orða eina nýggja føroyska revsilóg, sum í størri mun byggir á føroyska mentan, virði og samfelagsgongd. Ein føroysk revsilóg eigur í størst møguligan mun at taka støði í føroyskari gransking, og Fróðskaparsetur Føroya verður tí ein týdningarmikil samstarvsfelagi í hesum arbeiði.

**Broyting í revsilógini**
Ætlandi verða eisini ymiskar aðrar broytingar gjørdar í revsilógini í hesi tingsetuni, so sum at seta inn §119a um chikanu móti almennum starvsfólki, §216, stk. 2 um kynslig brotsverk móti børnum, §242 um tráfylging, §243 um sálarligan harðskap, §244, stk. 2 um harðskap, §264e um samleikastuldur, §299c viðvíkjandi broti á kappingarlóggávuna.

**Skipan við fótfjøtri**
Broyting er gjørd í revsifulnaðarlógini sum heimilar skipan við fótfjøtri. Tað merkir, at persónar, sum eru dømdir fongsulsrevsing upp til 6 mánaðir, eftir umstøðunum kunnu fáa loyvi til at sita dómin heima við elektroniskum fótfjøtri móti at vera áhaldandi yvirvakaðir og undir eftirliti hjá kriminalforsorgini. Skipanin kom í gildi 1. juli 2024.

**Nýtt fongsul byggjast í Føroyum**
Fyrireikingarnar at byggja nýtt fongsul í Føroyum eru byrjaðar. Í november 2023 vóru umboð frá Løgmálaráðnum, Justitsministeriet, Ríkisumboðnum, Kriminalforsorgini við ráðgevum og hugdu at sjey møguligum økjum, sum kommunur høvdu víst á, at eitt nýtt fongsul kundi byggjast. Kriminalforsorgin hevur gjørt fakliga meting av ymsu støðunum, og eisini løgreglan og Ríkispolitiið eru hoyrd. Landsstýrið er eisini við í arbeiðinum. Væntandi verður støða tikin til staðsetingina í summar.

**Rúsdrekkalógin**
Í Føroyum hava vit eina avmarkandi rúsdrekkalóggávu, sum hevur til endamáls at tálma nýtsluna og at minka um skaðan á einstaklingin og samfelagið. Hagtølini vísa, at síðan Rúsdrekkasøla Landsins læt upp, hava fólk drukkið minni av sterkum brennivíni og spyrja eftir veikari rúsdrekka í betri góðsku í staðin.

Skipanin er góð, og gongdina vilja vit hava at halda fram. Matstovuvinnan hevur tó eftirlýst at kunna keypa rúsdrekka beinleiðis úr útheimi, uttan um einkarsøluna. Hetta verður ikki mett at hava neiliga ávirkan á nýtsluna, men kann hava nógv at siga fyri ferðavinnuna. Ferðavinnan hevur stóran týdning fyri at fáa ein fjøltáttaðan og mótstøðuføran búskap, og tí fara vit at virka fyri at broyta rúsdrekkalógina, so vinnan fær betri karmar at virka eftir.

**Endurskoðan av fosturtøkulógini**

Galdandi lóg um fosturtøku er frá 1956 og er í nógvar mátar ótíðarhóskandi. Løgmálaráðið hevði seinasta heyst fundir við áhugabólkar, felagsskapir og onnur, ið kundu metast at hava týðandi vitan ella áhuga á hesum økinum, og lógaruppskot varð gjørt samsvarandi tí, sum flestu partar mæltu til. Uppskotið varð lagt fyri Løgtingið, men tá ið atkvøtt varð um uppskotið, stóð á jøvnum 15–15, og uppskotið fall.

**Heimild til kommunur at taka gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi**

Landsstýrið ætlar at koma við uppskoti til løgtingslóg, sum hevur til endamáls at heimila kommunum at taka hóskandi gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi. Í nøkrum kommunum eru nógv tóm hús, sum í mestan mun verða brúkt sum frítíðarhús hjá fólki, sum ikki býr í kommununi. Ein kommuna hevur skyldu at veita øllum húsum vatnveiting, kloakering, renovatión o.tíl. Fyri eina lítla kommunu við nógvum tómum húsum og frítíðarhúsum kann tað vera rímiligt, at kommunan kann taka gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi og tí ikki gjalda skatt til kommununa.

**Familjumál**

Løgtingslógin um foreldramyndugleika og samveru er broytt, soleiðis at ásett ella avtalað samvera bara dettur burtur, tá ið foreldrini hava avtalað tað, ella tá ið avgerð er tikin um tað.

Endamálið er at forða fyri sonevndari samverusjikanu. Við hesi lógarbroyting er enn eina ferð sligið fast, at barnið hevur rætt til bæði síni foreldur, og at barnið er saman við samveruforeldrinum, tá ið samvera er ásett ella avtalað. Við lógarbroytingini er tryggjað, at avtalað ella ásett samvera sum meginregla ikki dettur burtur, og at bústaðarforeldrið tí skal leggja sína feriu við virðing fyri longu avtalaðari ella ásettari samveru.

**Ættleiðing**

Tann 16. januar 2024 boðaði felagsskapurin Danish International Adoption (DIA) frá, at tey fara at steðga við at miðla altjóða fremmandaættleiðingar. DIA er einasti felagsskapur í Danmark, sum tekur sær av at miðla ættleiðingar í Danmark og harvið eisini í Føroyum.

Verandi samstarvsavtala millum Føroyar og Danmark um ættleiðing hevur heimild í løgtingslóg um ættleiðing. Soleiðis sum lógin er orðað, er samstarvið avmarkað til bara at fevna um Danmark. Arbeitt verður tí við at broyta ættleiðingarlógina, soleiðis at heimild fæst til vega at gera samstarvs-avtalu við onnur norðurlond, um hetta gerst neyðugt.

Somuleiðis verður arbeitt við at tryggja heimildargrundarlagið fyri fyribils staðseting av einum barni, sum verður ættleitt uttan samtykki. Hetta fyri at tryggja møguleikarnar fyri innanlands fremmandaættleiðing, so at føroyingar kunnu greipast við eitt barn á innanlandslistanum.

Ættleiðingarkunngerðin verður broytt, so at umsøkjarar kunnu standa á bíðilista til bæði innanlands og altjóða ættleiðing samstundis.

**Sektir**

Seinasta árið hava fleiri mál verið frammi um møguligar stórar sektir, ið skulu gevast føroyskum fyritøkum á yvirtiknum málsøkjum, eitt nú á aliøkinum og á fjarskiftisøkinum. Útgangspunktið er, at sektir falla til ríkiskassan. Undantak er tó á fiskiveiðuøkinum, har avtala frá 1981/1982 millum Statsministeriet og landsstýrið ásetir, at sektir falla 50/50. Strikaða reglan í §15 í gomlu politilógini staðfestir sum so høvuðsregluna um, at sektir falla til ríkiskassan, men undantekur tó sektir, sum verða álagdar og innheintaðar av føroyskum myndugleikum uttan hjálp frá løgreglu og dómstólum.

Rákið í ES seinastu árini er, at serliga fyritøkur skulu fáa álagt nógv størri sektir, enn fyrr var vanligt. Landsstýrið heldur, at tíðin er komin at gera eitt øðrvísi og rímiligari býti av sektunum. Tað kundi t.d. verið, at sektir, sum verða álagdar eftir lóggávu undir føroyskum málsræði, falla til landskassan. Í teimum førum er tað vanliga føroyskir myndugleikar, sum hava útreiðslur av slíkum málum, t.d. Kappingareftirlitið, Kappingarráðið, Heilsufrøðiliga starvsstovan og Føroya Kæru-stovnur. Málið er tikið upp við ríkismyndugleikarnar.

**Tilbúgving – Haga-samstarvið**

Tilbúgvingarøkið varð yvirtikið í 2007. Nógv er hent seinastu árini, og veðurlagsbroytingar eins og trygdarpolitisk atlit gera, at vit hava stóran tørv á at samstarva við grannar okkara, so vit standa saman um at avmarka vandan av hóttanum, ið kunnu taka seg upp.

Haga-samstarvið er eitt norðurlendskt samstarv um tilbúgving, men Føroyar eru ikki vorðnar partur av hesum samstarvi enn. Vit vilja virka fyri fullum limaskapi, ið vit meta er ein sjálvfylgja, tá ið málsræði heilt er á føroyskum hondum.

**Heimatilbúgving**
Vaksandi hóttanir úr útheimi seinastu árini hava elvt til endurskoðanir á tilbúgvingarøkinum í Føroyum eins og í grannalondum okkara. Í Føroyum verður arbeitt við at gera eina váðamynd, sum skal hjálpa okkum at raðfesta og taka neyðug stig í góðari tíð, m.a. um onkur slík hóttan gerst veruleiki. Váðamyndin verður væntandi klár tíðliga í heyst. Við støði í váðamyndini verður gjørd ein tilráðing til føroysku húskini um, hvørji atlit skulu takast, so at húski kunnu klára seg uttan hjálp uttanífrá í eitt ávíst tíðarbil.

**Partafeløg – ognarlig sundurskiljing av Føroya Tele**
Uppgávan hjá tí almenna er at geva vinnuni greiðar lógarkarmar at virka undir og at tryggja rímiliga og rættvísa kapping í ymsu vinnugreinunum. Landsins myndugleikar eru ofta í óhepnari tvístøðu, tí landið í fleiri kappingarkendum vinnum eigur størstu fyritøkurnar, samstundis sum tað eisini ásetur kappingarreglur og hevur eftirlit við, at kappingin gongur reiðiliga fyri seg. Týðandi infrakervi má vera á føroyskum hondum, men landið virkar fyri, at annað virksemi verður skipað í fríari kapping. Komandi árið verður hugt at, hvat kann gerast við hetta á fjarskiftisøkinum, har fleiri mál hava verið um slíkar óhepnar tvístøður.

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Løglisti 2024

LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum flogferðsla – eftirlit við loftrúminum)**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at yvirtaka málsøkið flogferðsla. Talan er um lóggávu innan fyri málsøkið hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum, og UVMR fyrireikar uppskotið, sum løgmaður leggur fyri Løgtingið. Ætlanin er, at lógaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið í vár, og at málsøkið verður tikið yvir frá 1. januar 2026 at rokna.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af partistøtteloven**
Eftir uppskotinum verða flokkstuðulsreglurnar sum galdandi eru fyri flokkarnar í Danmark eisini settar í gildi í Føroyum. Í nógv ár hava tær verið praktiseraðar á óformligum grundarlagi í Føroyum, men fyri einum tveimum árum síðan steðgaðu danir útgjaldinum, til lógagrundarlagið var komið formelt upp á pláss, og tað tí arbeitt verður við nú. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um Lov om ændring af lov om en investeringsfond for Færøerne m.v. (Overdragelse af investeringsfonden til Færøerne)**
Lógarbroyting í sambandi við yvirtøkuna av Íleggingargrunninum. Eftir uppskotinum verður frameftir lóggivið við løgtingslóg í øllum grunsins viðurskiftum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um investeringsfond for Færøerne m.v.**
Heimild at geva P/f Suðuroyartunnil og P/f Vága Floghavn pening úr Íleggingargrunninum. Annaðhvørt sum studning ella lán, avdráttarfrítt og við ongari ella lagaligari rentu.

**Uppskot til løgtingslóg um at fyrireika og projektera undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy við hartil hoyrandi vegagerð v.m.**
Uppskotið gevur P/F Suðuroyartunnil heimild til at prosjektera og senda verkætlanina um undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy við har tilhoyrandi vegagerð v.m. í útboð. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

*Játtanar- og roknskaparviðurskifti*

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2025**
Samsvarandi stýrisskipanarlógini skal landsstýriskvinnan fyri 1. oktober á hvørjum ári leggja uppskot fyri Løgtingið fyri komandi álmanakkaár. Uppskotið verður lagt fyri tingið 30. september 2024.

**Uppskot til játtanarkarmar fyri 2026–2030**
Sambært játtanarskipan landsins skal landsstýriskvinnan leggja fram uppskot til løgtingssamtykt fyri 1. apríl, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár. Uppskotið verður lagt fyri tingið 31. mars 2025.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (fíggjarpolitiskt regluverk)**
Sum partur av einum fíggjarpolitiskum regluverki er neyðugt við dagføringum í landsins játtanarskipan. Lógin skal hava eina fyriskipan um fíggjarpolitiska stýring av almenna búskapinum. Aðrar broytingar í lógini fevna um neyðugar tillagingar og nágreiningar, nýggj játtanarsløg, møguleikan fyri at flyta avlop og hall fram o.a. Broytingarnar eru eitt nú knýttar at møguligum broytingum í lóggávuni um roknskaparhaldið hjá landinum, t.d. um avskrivingar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald o.a. (fíggjarpolitiskt regluverk)**
Sum partur av einum fíggjarpolitiskum regluverki er møguliga neyðugt við dagføringum í almennu roknskaparlógini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

*Skattir, avgjøld o.a.*

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi**
Ætlanin er m.a. at gera broytingar viðvíkjandi afturkeypi av egnum partabrøvum, dagføring av stovnsheitum, herdar revsireglur umframt málsligar nágreiningar o.a. Endamálið við uppskotinum er at dagføra kapitalvinningsskattalógina við at áseta, broyta og nágreina reglur, sum annaðhvørt hava víst seg at mangla, at vera óskynsamar ella at vera ov leysliga orðaðar. Uppskotið varð lagt fyri tingið í mars 2023, men fall burtur. Uppskotið verður lagt aftur fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin)**
Samgonguflokkarnir og Sambandsflokkurin eru komnir ásamt um eina endurskoðaða skipan fyri gjøld frá alivinnuni. Skipanin verður sett saman av ávikavist tøkugjaldi og einum eykaskatti. Uppskot til løgtingslóg um eykaskatt, umframt aðrar dagføringar, verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin)**
Talan er fyrst og fremst um tekniskar dagføringar av eftirlønarlógini, Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum**
Samgongan ætlar at gera stigvísa lækking av stuðlinum til rentuútreiðslur. Lækkingin verður framd yvir eitt longri áramál. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um toll**
Dagføring av toll- og vøruskránni, sum er partur av Tolllógini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um búskapargrunn**
Ætlanin er at broyta uppgerðina av inntøkum frá avgjøldum á tilfeingisvinnurnar soleiðis, at frá 2025 verður størri partur fluttur beinleiðis í Búskapargrunnin. Samstundis verða mørkini broytt. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um javning av skatti og avgjøldum**
Ætlanin er, at skattastigin í inntøkuskattinum skal javnast við støði í lønarindeksi, sum Hagstovan framleiðir. Somuleiðis er ætlanin, at avgjøld skulu javnast við støði í prísindeksi, sum Hagstovan framleiðir. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um áseting av skatti**
Skattur av húsaleigu skal allur fara til ta kommununa, har húsið er staðsett. Eisini er ætlanin at gera eina bruttoskattaskipan til stutttíðarleigu. Hetta fer at gera tað lættari hjá fólki at leiga síni summarhús út og gera inntøkuna upp í skatti. Inntøkurnar skulu allar skattast í kommununi, har húsið er staðsett. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um vegskatt á útlendskar bilar**
Við uppskotinum verður álagt eitt avmarkað avgjald á útlendskar bilar, sum skal viðvirka til at fíggja ábøtur á veganetið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um vektgjald**
Ætlanin er, at el-bilar frameftir fara at rinda sama vegskatt (vektgjald) sum vanligir bilar og eftir vekt á bilinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um tinglýsingaravgjald**
Ætlanin er, at Føroya Kærustovnur skal taka avgerðir í kærum um tinglýsingaravgjald. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (meirvirðisgjaldslógin)**
Fari verður undir at endurskoða undantøkini í meirvirðisgjaldslógini. Í hesum sambandi verður kannað í hvønn mun tilber at tillaga meirvirðisgjaldið á gerandisvørum. Tillagingar verða fult fíggjaðar og framdar soleiðis, at tað ber til hjá TAKS at fremja eitt munagott eftirlit. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

*Talgilding*

**Uppskot til verklagslóg fyri Talgildu Føroyar 2025 til 2027**
Ætlanin er at halda fram at Talgilda føroyska samfelagið samsvarandi tilmæli fyri 2025 til 2027. Millum annað fleiri vangatænastur, talgilda tinglýsing og talgilding í heilsutænastum. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski og fígging av yvirgangi**
Broytingarnar snúgva seg fyri tað mesta um nágreiningar og tillagingar, sum serliga hava týdning fyri teir myndugleikar, ið hava umsitingarligar uppgávur sambært hvítvasklógini, m.a. nágreining í ásetingini um tagnarskyldu. Harafturat verða tillagingar gjørdar, so samsvar verður millum hvítvasklógina og ta donsku hvítvasklógina, sum er í gildi í Føroyum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ársroknskaparlógini**
Lógin treingir til at verða dagførd, og við uppskotinum verða neyðugar dagføringar gjørdar, sum føroyska grannskoðaravinnan og Skráseting Føroya hava mælt til, og lógin verður dagførd samsvarandi ES-lóggávuni, heruppií ígildissetan av nýggju ES-reglunum um frágreiðing um burðardygd. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtinslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirki, vinnufelagalógini, lóg um vinnurekandi fyritøkur, lóg um vinnurekandi grunnar, løgtingslóg um tryggingarvirksemi**
Fylgibroyting orsakað av broytingum í ársroknskaparlógini, sum snúgva seg um at seta í gildi ES-reglurnar um frágreiðing um burðardygd, ið m.a. hava við sær serstøk eftirútbúgvingarkrøv til grannskoðarar, ið grannskoða burðardygdsfrágreiðingar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um dagføring av sjólógini**
Sjórættur verður yvirtikin sum málsøki tann 29. juli 2025. Sjólógin, sum er galdandi í Føroyum, er dagførd samsvarandi donsku sjólógini fram til 2012. Skotið verður upp, at lógin nú verður dagførd samsvarandi galdandi donsku sjólógini og lóggávuni í hinum norðurlondunum áðrenn yvirtøkudagin. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Lóg um nettrygd**
Á heysti 2023 legði landsstýrið fram ætlan um hægri nettrygdarstig í Føroyum til tess at verja týðandi tænastur í okkara samfelag. Sum liður í nettrygdarætlanini fer landsstýrið undir at gera eina nettrygdarlóg við støði í nýggjastu felagsevropeisku NIS2 fyriskipanini. Endamálið er at styrkja net-kreppustýringina, økja um mótstøðuførið og minka um samfelagsavleiðingarnar, tá ið álop henda. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskráseting**
FAS-lógin verður endurskoðað. Ætlanin er m.a. at kanna og broyta krøvini til eigarar, so at krøvini kunnu líkjast altjóða skipaskrásetingum í londunum rundan um okkum. Eisini verður álagt umboðsfólkum fleiri skyldur, tá ið tey skráseta skip í FAS. Ætlanin er samstundis at hyggja at skattaskipanini, sum knýtir seg at FAS. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsjørð og uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn**
Broytingarnar hava sum meginendamál at seta í verk komandi landbúnaðarpolitikkin, sum hevur til endamáls at fáa betri lønsemi í landbúnaðinum, økta matvøruframleiðslu úr landbúnaðartilfeingi, burðardygga lendisnýtslu og økta djóravælferð umframt størri vitan, útbúgving, gransking og hagtøl. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um stuðul til landbúnaðin**
Uppskotið hevur til endamáls at savna allar stuðulsskipanir til landbúnaðin og við tí fáa gjøgnumskygni í landbúnaðarstuðlinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Samleanordning om ikrafttræden for Færøerne af visse bestemmelser i forskellige love om ændring af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)"**
Uppskotið hevur til endamáls at dagføra hvítvasklóggávuna á ikki yvirtiknum málsøkjum. Talan er um at seta í verk fyri Føroyar átta ymisk lógaruppskot, sum longu eru framd í danskari lóggávu. Hetta verður gjørt samstundis, sum føroyska hvítvasklógin verður dagførd. Tá ið hesar dagføringar eru framdar, eru Føroyar at meta sum javnlíkar við ES á hvítvaskøkinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes ved overførsler af midler"**
Uppskotið hevur til endamáls at seta ES-fyriskipan EU 2023/1113 frá 31. mai 2023 í gildi fyri Føroyar. Neyðugt er at fremja hesa broyting, um føroysku peningastovnarnir framvegis skulu verða javngildir við peningastovnar í ES, tá ið tað snýr sum um peningaflytingar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um løggilding av handverksmeistarum í byggivinnuni**
Ætlanin er at gera eina skipan, soleiðis at handverksmeistarar, sum bjóða seg fram at byggja fyri onnur, eru løggildir og hava staðið ta útbúgving, sum verður kravd fyri at gerast løggildur handverksmeistari. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Alifrágreiðing**
Sambært § 6 a, stk. 9 í løgtingslóg um aling av fiski v.m. skal landsstýrismaðurin fjórða hvørt ár áðrenn 1. november leggja fyri Løgtingið frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um støðuna í alivinnuni, og hvørjar ætlanirnar eru fyri víðari menning av vinnuni í mun til aling á sjógvi og landi, útlendskan ognarskap, um metingarnar av vistfrøðiligu støðuni í firðunum og aðrar viðkomandi tættir. Frágreiðingin verður løgd fyri tingið í heyst.

## ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir – hækka fólkapensjónsaldurin**
Løgtingslógin um almannapensjónir ásetur, at pensjónsaldurin frameftir skal ásetast í løgtingslóg 10. hvørt ár við eini 10 ára freist – fyrstu ferð í 2025 galdandi frá 2035. Landsstýriskvinnan fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um at hækka pensjónsaldurin galdandi frá 2035. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið fyrst í 2025.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir – umrokning og eftirrokning av fólkapensjón**

Verandi skipan við umrokning og eftirrokning av fólkapensjón er stirvin, umsitingarliga tung og kann seta pensjónistar í eina trupla fíggjarliga støðu. Landsstýriskvinnan fer tí at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta skipanina, soleiðis at pensjónin verður umroknað so hvørt heldur enn eina ferð um árið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur**

Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, sum tann 1. januar 2021 loysti gomlu forsorgarlógina av, hevur nú meira enn trý ár á baki. Tó at lógin á flestu økjum virkar eftir ætlan, er neyðugt við ymiskum smærri broytingum og tillagingum. Eisini er ætlanin at broyta § 44 í lógini, soleiðis at virksemið á harðskapsøkinum og tilboðini til harðskapsrakt í størri mun fara at síggjast aftur í lógartekstinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.**

Sambært samgonguskjalinum skal rætturin hjá smærri vinnufyritøkum til sjúkradagpengaskipanina endurskoðast. Landsstýriskvinnan fer tí at leggja uppskot fyri Løgtingið um, at smærri vinnufyritøkur í ávísan mun skulu fáa endurgjald fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, ið verða sjúkir. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Frágreiðing til orðaskifti um heildarætlan um harðskap í parlagi og øðrum nærsambondum**

Landsstýriskvinnan fekk í august 2023 handað nýggju heildarætlanina um harðskap í parlagi og øðrum nærsambondum fyri árini 2023–2028. Í hesum sambandi verður ein frágreiðing til aðalorðaskifti løgd fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul**

Í samgonguskjalinum stendur, at miðlalandslagið skal styrkjast, og at miðlastuðulsskipan skal stuðla undir hetta. Arbeitt verður tí við at endurskoða verandi skipan. Vónandi ber til at broyta skipanina, so at hon gerst greiðari at umsita, samstundis sum miðlarnir gerast sterkari. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um heimild til at útvega uttanhýsis fígging til at byggja tjóðleikhús**

Landsstýriskvinnan fer at leggja uppskot til verklags- og heimildarlóg fyri Løgtingið, sum setur eina ávísa upphædd av til verklagið, og sum gevur landsstýriskvinnuni heimild at taka ímóti fígging frá útlendskum grunnum til tjóðleikhúsið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um at umvæla Listasavn Føroya**
Listasavn Føroya hevur tørv á týðandi umvælingum, útbygging og nútímansgering. Uppskot til verklags- og heimildarlóg verður fyrireikað til at fíggja landsins part av arbeiðinum. Aftrat væntaða stuðlinum frá landinum hevur Listasavnið fingið tilsagnir um nærum fullan stuðul til verkætlanina frá útlendskum grunnum. Tá ið útboðið hevur verið í heyst, fer landsstýriskvinnan at leggja uppskot fyri Løgtingið um heimild til at veita og móttaka stuðul til verkætlanina. Uppskotið verður lagt fyri tingið seint í heyst.

**Frágreiðing um løgtingslóg um Málráð**
Landsstýriskvinnan fekk tann 14. mai 2024 handað frágreiðingina um, hvørt løgtingslógin virkar eftir ætlan, og um tað ber til at hava reglur um Málráð, Staðarnavnanevnd og Navnanevnd í somu løgtingslóg. Frágreiðingin verður løgd fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fornminni**
Uppskot verður lagt fyri Løgtingið um at broyta fornminnislógina, soleiðis at forngripir, ið verða funnir í føroysku náttúruni, eru ogn hjá landinum og skulu latast Tjóðsavninum. Møguliga verða aðrar dagføringar gjørdar í løgtingslógini, ið er frá 1948. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um at veita landskassastuðul til kirkjubygging á Glyvrum**
Fyrireikingarnar at byggja nýggja kirkju á Glyvrum tykjast nú at vera komnar undir land. Uppskot til heimildarlóg, sum heimilar landinum at veita tilsøgn um stuðul til byggingina yvir nøkur fíggjarár, verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um at veita landskassastuðul til kirkjubygging á Argjum**
Fyrireikingarnar at byggja nýggja kirkju á Argjum tykjast eisini at vera komnar undir land. Uppskot til heimildarlóg, sum heimilar landinum at veita tilsøgn um stuðul til byggingina yvir nøkur fíggjarár, verður lagt fyri tingið í heyst.

## FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
Uppskotið er ætlað at javnseta aktørarnar í uppsjóvarvinnuni, soleiðis at árligu nøgdirnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild verða ásettar eftir somu grundreglum og tí eru undir somu treytum í lógini. Broytingar skulu eisini stuðla undir, at skipanin við útluting av uppsjóvarkvotum verður einfaldari, gjøgnumskygdari og lættari at umsita. Uppskotið verður eftir ætlan latið Løgtinginum eftir ólavsøku.

**Frágreiðing til aðalorðaskiftis um sjófeingi**
Sambært sjófeingislógini leggur landsstýrismaðurin áðrenn 20. februar á hvørjum ári, fyri Løgtingið frágreiðing um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja. Uppskotið verður latið Løgtinginum í februar 2025.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Trygdargrunn fiskivinnunnar**
Avgerðir, sum Trygdargrunnurin tekur viðvíkjandi inntøkutrygd og forskoti, kunnu kærast til kærunevndina hjá Trygdargrunninum. Limirnir í kærunevndini verða valdir av landsstýrismanninum fyri fýra ár í senn. Tíðarskeiðið hjá núsitandi kærulimum er runnið. Í staðin fyri at seta nýggjar limir í nevndina er ætlanin at niðurleggja kærunevndina og leggja avgerðirnar hjá Trygdargrunninum til Føroya Kærustovn at kæruviðgera. Hetta krevur, at løgtingslógin um Trygdargrunnin verður broytt. Uppskotið verður latið Løgtinginum í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (Ferðslulógin)**
Broytingar verða gjørdar í ferðslulógini um rúsevnakoyring. Rúsevnakoyring er blivin ein vaksandi trupulleiki, og tí er neyðugt at endurskoða ásetingarnar um rúsevnakoyring. Uppskotið verður latið Løgtinginum í heyst.

**Lóg um Skaðanevnd**
Arbeiðið við at gera eina nýggja løgtingslóg um skaðanevnd er farið í gongd. Eftir ætlan verður uppskotið latið Løgtinginum í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í landsvegalógini**
Løgtingslógin um landsvegir er frá 1972. Innihaldsliga er lógin ongantíð broytt. Tí verður lógin nú dagførd. Ætlanin er, at uppskotið verður latið Løgtinginum í heyst.

**Uppskot til verklagslóg um nýggja farleið til Tjørnuvíkar**
Uppskot til løgtingslóg (verklagslóg) um nýggja farleið til Tjørnuvíkar verður gjørd og løgd fyri Løgtingið í heyst.

**Uppskot til verklagslóg um at byggja nýggja kalsoyarferju**
Uppskot til løgtingslóg (verklagslóg) um at byggja kalsoyarferju verður gjørd. Ætlanin er, at lógaruppskotið verður latið Løgtinginum í heyst.

## HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um at dagføra starvsfólkabygningin hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi**
Starvsfólkabygningurin hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi skal dagførast. Fyrireikingar eru farnar í gongd. Tá ið fyrisitingin á Klaksvíkar sjúkrahúsi er flutt í Gulu húsini, ber til at fara undir arbeiðið. Tá ið prosjekteringin er liðug, kann tað tilfarið verða brúkt sum grundarlag fyri nýggjari verklagslóg. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í februar 2025.

**Uppskot til løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgarunum**
Yvirskipaða málið er, at tryggja øllum fólkum kring landið atgongd til støðugt fleiri tilboð um dygdargóðar heilsutænastur í nærumhvørvi teirra. Somuleiðis at seta sjúklingatrygdina í hásæti, tryggja sama høga góðskustig í øllum landinum og skapa betri møguleikar fyri, at heilsustarvsfólk kunnu starvast og mennast í heilsufakligum umhvørvi kring landið. Skipanin við heilsumiðstøðum fer serliga at vera gagnlig og viðkomandi hjá eldri fólki, fólki við varandi sjúkum og fólki við serligum tørvi. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í september 2024.

**Uppskot til løgtingslóg um at betra fólkaheilsuna við at minka um heilsuskaðar vegna royking, snús v.m.**
Umleið 130 føroyingar doyggja árliga av sjúkum, sum verða settar í samband við royking. Hesi andlát kundu verið fyribyrgd, um fólk ikki royktu. Tørvur er á nýggjari lóg, har høvuðsdentur verður lagdur á at: a) fyribyrgja at børn og ung byrja at roykja ella nýta aðrar tubbaks- og nikotin-vørur, b) tryggja, at royking, nikotinvørur v.m. ikki eru partur av gerandisdegnum hjá børnum og ungum, og c) tryggja støðugt fleiri roykfrí umhvørvi. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í februar 2025.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (gjald fyri liðugt viðgjørdar sjúklingar)**
Neyðugt er at finna eina loysn fyri liðugt viðgjørdar sjúklingar, sum ikki kunnu útskrivast av sjúkrahúsinum orsakað av, at Almannaverkið ella kommunur ikki kunnu taka ímóti teimum. Mett verður, at tíðin er komin til at seta í verk somu skipan sum í okkara grannalondum. Henda skipan hevur virkað væl og virkar soleiðis, at ásett verður eitt gjald fyri seingjardag, sum kommunurnar ella teir myndugleikar, sum varða av teimum liðugt viðgjørdu gjalda tá ið ikki verður tikið ímóti eftir lokna viðgerð – t.d. vegna vantandi heimarøkt ella búpláss. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í februar 2025.

**Uppskot til løgtingslóg um afturrindan av heilsutrygdargjaldi**
Útisiglarar og onnur, sum eru búsitandi í Føroyum, sum eru fevnd av "Nordisk konvention om social sikring", og sum rinda fyri heilsutrygdarskipan í øðrum landi, hava ikki skyldu at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum. Ætlanin er at tilevna lógaruppskot, sum gevur heimild til og ásetir, hvussu heilsutrygdargjaldið, sum er kravt frá omanfyri nevndu útisiglarum og øðrum, kann rindast aftur. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í oktober 2024.

**Uppskot til løgtingslóg um heilivág**
Reglur um undantøk til einkarættin hjá apoteksverkinum at flyta inn heilivág verða tillagaðar og nágreinaðar. Heilivágshugtakið verður dagført. Kapittulin um lýsingar um heilivág verður dagførdur. Eftirlitsheimildirnar hjá landsapotekaranum verða styrktar. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í oktober 2024.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág**
Apotekari skal kunna seta í starv heilsustarvsfólk at koppseta fyri apoteksverkið. Hetta verður viðvirkandi til at fyribyrgja sjúku og styrkja smittuverjutilbúgvingina í Føroyum. Harumframt verða partur B og ávísar greinar í parti A í lógini strikað og ásett í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í oktober 2024.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttædelse af lov om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed og sundhedsloven"**
Virkisøkið hjá sjúkrarøktarfrøðingum verður ásett, og virkisøkið hjá ljósmøðrum verður víðkað. Uppskotið hevur við sær, at bíðitíðin hjá sjúklingum at koma fram at einføldum viðgerðum verður stytt, og at læknar ikki skulu taka støðu til lutfalsliga einfaldar viðgerðir av formligum og løgfrøðiligum ávum. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í oktober 2024.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om assisteret reproduktion i forbindelse med behandling, diagnostik og forskning m.v."**
Í dag hava vit sjúkrahúsverkslógina, ið yvirskipað ásetur, hvør hevur rætt til veitingar í sjúkrahúsverkinum. Harumframt er orðað ein leiðregla, sum ítøkiligari ásetur rættindi í sambandi við viðgerð fyri barnloysi. Í okkara grannalondum eru hesi rættindi ásett í serstakari lóg, so at tað er greitt, hvør hevur rætt til viðgerð fyri barnloysi og undir hvørjum treytum. Mett verður ikki, at tað er haldgott ítøkiliga at áseta rættindi og treytir um barnloysi í eina leiðreglu – hesi viðurskifti eiga ístaðin at verða ásett í lóg. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri løgtingið í februar 2025.

## BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
Broytingar í fólkaskúlalógini viðvíkjandi undirvísingartímatalinum og tíma- og lærugreinabýtinum. Broytingarnar verða framdar í kjalarvørrinum av álitinum, sum varð handað í 2023. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingtingslóg um løn undir útbúgving**
Arbeitt verður við at tryggja lesandi á Heilsuskúla Føroya løn ella hægri inntøku, enn verandi lestrarstuðul gevur. Enn er ikki greitt, hvør leisturin verður, men lógarbroyting skal helst til fyri at fáa hetta framt. Eftir ætlan verður hetta framlagt á vári 2025.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul**
Lógin um lestrarstuðul má broytast, um møguleiki skal vera hjá t.d. tilflytarum at fáa lestrarstuðul, áðrenn tey hava búð í Føroyum í tvey ár. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
Broytingar í Barnaverndarlógini skulu fremjast, soleiðis at fosturforeldraskipanin verður styrkt og víðkað. Harnæst skal markamótið millum land og kommunu á barnaverndarøkinum nágreinast. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**
Broyting í dagstovnalógini skal gerast, so at § 3 verður nágreinað við atliti at, hvat er fevnt av lógini sambært stk 1. og viðvíkjandi upplatingartíðini sambært stk. 2. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til verklagslóg viðvíkjandi framhaldandi umvæling av Kampus**
Verklagslóg skal gerast, sum tryggjar, at hildið verður fram at umvæla Kampus. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studning til fólkaháskúlar**
Dagføra lóg um studning til fólkaháskúlar. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Aðalorðaskifti um dagstovnaøkið**
Dagstovnalógin varð sett í gildi í 2000, og síðan lógin varð sett í gildi, eru einans smávegis broytingar framdar (í 2005 viðvíkjandi børnum við serligum tørvi, sjá § 5, í 2006 viðvíkjandi fíggjarligum fríplássi, sjá § 6, og í 2018 m.a. viðvíkjandi námsfrøðiligu ábyrgdini og dagstovnaráðnum,

sjá § 2 og § 2a). Samfelagið hevur ment seg nógv, síðan dagstovnalógin varð samtykt, og krøvini og avbjóðingarnar á dagstovnaøkinum eru harvið eisini broytt sera nógv. Út frá hesum verður mett neyðugt at taka eitt aðalorðaskifti, har m.a. fakligu krøvini til starvsfólkini (eitt nú útbúgving) og normering av starvsfólkum verður umrødd. Frágreiðingin verður løgd fyri tingið í vár.

## UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir**
Endamálið við broytingini er at tryggja kommunum heimild til at áseta bústaðarskyldu í øllum bústaðareindum í nærri avmarkaðum natúrliga samanhangandi økjum. Heimildin kann brúkast, tá ið nýggjar útstykkingar verða gjørdar. Heimildin kann sum meginregla ikki brúkast í økjum, sum longu eru bygd. Tó kann kommunan áseta bústaðarskyldu at galda fyri einstakar búeindir í longu bygdum økjum, tá ið talan er um búeindir, sum kommunan eigur og selur. Somuleiðis verða aðrar dagføringar gjørdar í lógini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í oktober.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um elriknar hitapumpuskipanir**
Endamálið við uppskotinum er at fyribyrgja møguliga dálking frá jarðhitaboringum. Ávís krøv til jarðhitaboringar verða herd, og onnur verða gjørd meira tíðarhóskandi. Ábyrgd og uppgávubýti millum ymsu partarnar verður nágreinað, og kommunurnar fáa betri heimildir til at fremja ásetingarnar í lógini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í november.

**Løgtingslóg um bindandi veðurlagsmál**
Endamálið við uppskotinum er at áseta bindandi veðurlagsmál fyri Føroyar í samsvari við Parísavtaluna. Ásett verður, at útlátið av vakstarhúsgassum skal skerjast við 45% áðrenn 2030 og 50% áðrenn 2035. Málið er somuleiðis, at Føroyar skulu vera veðurlagsneutralar í 2050.  Uppskotið verður lagt fyri tingið í november.

**Løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging**
Eftir verandi lóg er sorinskrivarin fastur formaður í Vanlukkutryggingarráðnum, og umsitingin av Vanlukkutryggingarráðnum hevur ligið hjá Føroya Rætti. Sorinskrivarin hevur í longri tíð heitt á landsstýrið um at flyta umsitingina av ráðnum til stovn undir landinum og at tryggja, at sorinskrivarin ikki longur er fastur formaður. Farið er undir at flyta umsitingina til Arbeiðs- og Brunaeftirlitið, og endamálið við uppskotinum er at broyta ásetingina um, at sorinskrivarin er fastur formaður í Vanlukkutryggingarráðnum. Eisini verður heimild fingin til vega at áseta nærri reglur um talgilt samskifti. Uppskotið verður lagt fyri tingið í september.

**Broyting í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum**
IMO-sáttmálin um upphøgging av skipum (Hong Kong sáttmálin) fær altjóða gildi 26. mai 2025. Umráðandi er, at Føroyar taka støðu til Hong Kong sáttmálan og tillaga lóggávuna, so at skip undir føroyskum flaggi og skip undir FAS ikki verða sýtt at koma í fremmanda havn, tá ið sáttmálin fær altjóða gildi. Føroyar hava sum strandarland somuleiðis eftirlit við, at útlendsk skip lúka reglurnar í Hong Kong sáttmálanum, tá ið tey koma í føroyskt sjóøki ella í føroyska havn. Uppskotið verður lagt fyri løgtingið í februar.

**Broyting í løgtingslóg um umhvørvisvernd**
Endamálið er at tillaga føroyska lóggávu sambært IMO-sáttmálanum um upphøgging av skipum (Hong Kong sáttmálin), ið fær gildi 26. mai 2025. Uppskotið verður lagt fyri løgtingið í februar.

**Broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni**
Endamálið er at gera reglur um øktar møguleikar at framleiða el til egna ídnaðarframleiðslu og reglur um eitt fjølbroytt sølulið. Uppskotið verður lagt fyri løgtingið í desember.

**Løgtingslóg um náttúrufriðing**
Í sambandi við nýggju náttúruverndarlógina vórðu partar av løgtingslóg um náttúrufriðing strikaðir. Náttúrufriðingarlógin er tó framvegis í gildi í avmarkaðum líki. Ásetingarnar, sum eftir eru í náttúrufriðingarlógini, snúgva seg millum annað um lendisdisponering. Endamálið við uppskotinum er at flyta hesar ásetingarnar, møguliga í nakað broyttum líki, yvir í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir. Uppskotið verður lagt fyri tingið í februar.

**Broyting í løgtingslóg um tinglýsing**
Endamálið er at tryggja heimild fyri talgildari innlating til akfarsbókina og seinni eisini til tingbókina og persónbókina. Somuleiðis verða ásettar reglur um talgild skjøl, talgilda undirskrift, talgilda fulltrú, góðkendar fráboðanir, gjaldskipan fyri størri kundar v.m. Uppskotið verður lagt fyri tingið  í oktober.

**Broyting í løgtingslóg um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir**
Endamálið er at tryggja, at verandi lóg fevnir um somu íløt, sum nýggja lógin um pantskipan fer at gera. Broytingin er neyðug fyri at fáa skráseting og inngjald av nýggjum íløtum í komandi pantskipan avgreidd í góðari tíð. Uppskotið verður lagt fyri tingið í oktobur.

**Broyting í løgtingslóg um barsilsskipan**
Endamálið er at tryggja, at foreldur at ov tíðliga føddum børnum og foreldur at tvíburum ella fleirburum fáa fleiri vikur við barsilspeningi, og at tryggja størri fleksibilitet í skipanini. Sannlíkt verða aðrar broytingar eisini gjørdar við støði í breiðari politiska semju. Uppskotið verður lagt fyri tingið  í november.

**Løgtingslóg um at stytta arbeiðsvikuna**
Endamálið við uppskotinum er, at 37 tímar arbeiðsvika verður skipað við lóg. Arbeitt hevur verið við at finna semju um leist í trípartasamráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

## LØGMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um integratión**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at fremja integratión í Føroyum. Yvirskipað eigur ein integratiónslóg at fevna um málfrálæru, kunning og ymisk integratiónstiltøk. Høvuðsdenturin í integratiónslógini eigur at leggjast á tey, sum ætla at verða verandi í Føroyum. Lógin eigur at fevna um tilboð og krøv um frálæru í føroyskum. Eisini er neyðugt, at kunnað verður væl um rættindi og skyldur í føroyska samfelagnum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í oktober 2024.

**Uppskot til løgtingslóg um at taka gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at heimila kommunum at taka hóskandi gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi. Uppskotið verður lagt fyri tingið í oktober 2024.

**Broyting í Rúsdrekkalógini**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva matstovum og heilsølum at flyta inn vín, øl o.a. beinleiðis heldur enn um Rúsdrekkasølu Landsins. Uppskotið verður lagt fyri tingið í oktober 2024.

**Broyting í Ættleiðingarlógini**
Uppskotið skal heimila landsstýrinum at gera samstarvsavtalur við onnur lond og loyva innlendis ættleiðing. Uppskotið verður lagt fyri tingið í oktober 2024.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í revsilógini**

Ymiskar broytingar skulu gerast í revsilógini so sum at seta inn § 119a um chikanu móti almennum starvsfólki, § 216, stk. 2 um kynslig brotsverk móti børnum, § 242 um tráfylging, § 243 um sálarligan harðskap, § 244, stk. 2 um harðskap, § 264e um samleikastuldur, § 299c viðvíkjandi broti á kappingarlóggávuna. Uppskotið verður lagt fyri tingið í februar 2025.

**Ríkislógartilmæli um broyting í Útlendingalógini**

Broytingar í sambandi við heimild til Útlendingastovuna at taka avgerð um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Somuleiðis heimild at fáa upplýsingar beinleiðis frá TAKS og Landsfólkayvirlitinum, taka gjald o.a. Uppskotið verður lagt fyri tingið í februar 2025.